# Frágreiðing um Landsverk

5. mai 2015
Frágreiðing um Landsverk
umbiðin av landsstýrismanninum í fíggjarmálum

Í arbeiðsbólkinum hava sitið:
Arne Poulsen, fyrrverandi aðalstjóri
Petur Alberg Lamhauge, fyrrverandi aðalstjóri
Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki
Johan Syderbø, ráðgevi í Vinnuhúsinum
Skrivstovan var mannað við Egon Joensen og Tórir Michelsen,
búskaparfrøðingar í Fíggjarmálaráðnum

# Innihald

**Yvirlit yvir fylgiskjøl til frágreiðingina** ..... 3

**Inngangur og bakgrund** ..... 4

**Framferðarháttur** ..... 5

**Niðurstøður og tilráðingar frá arbeiðsbólkinum** ..... 6

*Gjøgnumskygni* ..... 6

*Møguligar nýggjar uppgávur til Landsverk* ..... 6

*Metingar um virksemi stovnsins* ..... 6

*Útveiting av virksemi hjá Landsverki* ..... 6

*Mannagongdir í sambandi við útbjóðing* ..... 7

**Stutt um Landsverk og virksemi stovnsins** ..... 8

**Gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki** ..... 10

**Møguligar nýggjar uppgávur at leggja til Landsverk** ..... 12

*Landsverk sum eigari av bygningum landsins* ..... 12

*Undirsjóvartunlar* ..... 14

*At leggja aðrar stovnar saman við Landsverki* ..... 14

**Metingar um virksemi stovnsins** ..... 18

**Metingar um útveiting av virkseminum hjá Landsverki** ..... 19

*Byggiverkætlanir* ..... 20

*Umvæling og viðlíkahald av landsins bygningum* ..... 23

*Rammusáttmálar/ESCO* ..... 24

*Landsvegahald* ..... 25

*Havnir* ..... 26

*Flogferðsla* ..... 27

*Inntøkufíggjaða virksemið hjá Landsverki* ..... 27

*Samlað potentiali fyri útveiting* ..... 31

**Mannagongdir í sambandi við útbjóðing** ..... 31

## Yvirlit yvir fylgiskjøl til frágreiðingina

A. Innanhýsis stovnslýsing av Landsverki. *Landsverk – lýsing av virksemi og uppgávum á stovninum.*
B. Fylgiskjal til frágreiðing um Landsverk frá Vinnuhúsinum. *Vinnusjónarmið um virksemið hjá Landsverk.*
C. Spurnablað, sum bólkurin sendi til aðalráð og stovnsleiðarar.
D. Svar frá Mentamálaráðnum til spurnablað frá bólkinum.
E. Svar frá Kringvarpi Føroya til spurnablað frá bólkinum.
F. Svar frá Føroya Stiftsstjórn til spurnablað frá bólkinum.
G. Svar frá Suðuroyar Sjúkrahúsi til spurnablað frá bólkinum.
H. Svar frá Landssjúkrahúsinum til spurnablað frá bólkinum.
I. Svar frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi til spurnablað frá bólkinum.
J. Svar frá Apoteksverkinum til spurnablað frá bólkinum.
K. Viðmerkingar frá Landsverki til svar frá aðalráðum og stovnsleiðarum um samstarvið við Landsverk.
L. Yvirlit yvir skrivstovubygningar og leigumál landsins.
M. Yvirlit yvir virksemi hjá Landsverki, sum potentielt kann útveitast.
N. Landsverk. *Markamót. Ábyrgdarbýtið ímillum Landsverk og landsins stovnar.* Vegleiðing, ið lýsir, hvussu býtið av viðlíkahaldi o. øðr. á stovnum og bygningum, ið Landsverk varðar av, er býtt ímillum Landsverk og stovnarnar.

# Inngangur og bakgrund

Landsverk er ein av stóru og mest týðandi stovnum landsins, ikki bert fyri borgaran og tað almenna, men eisini fyri vinnuna. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og landsstýrið ynskja tí at fáa lýst og mett um virksemið hjá Landsverki og útfrá hesum koma við uppskotum til møguligar broytingar og betringar.

Arbeiðið skal snúgva seg um:

- At lýsa á hvørjum grundarlagi, virksemið hjá Landsverki hvílir á
- At gera metingar, hvussu gjøgnumskygnið við stovnsins virksemi kann tryggjast betri
- At gera metingar um, hvørt onkur partur av virkseminum átti at ligið aðrastaðir
- At gera metingar um, hvørt onkrar almennar uppgávur kundu verið fluttar til Landsverk
- At gera metingar um, hvussu rationelt stovnurin virkar og gera uppskot um møguligar betringar – benchmarking og hvussu gjørt verður í øðrum londum kann havast í huga í hesum sambandi
- At gera metingar um býtið millum uppgávur, framdar innanhýsis og uttan fyri stovnin, og gera uppskot um møguligar broytingar
- At gera metingar um mannagongdir í sambandi við útbjóðing og gera uppskot um møguligar broytingar – gjøgnumskygni og javnbjóðis kapping eru lyklaorð í hesum sambandi. Harumframt at meta um, hvørt tað er neyðugt at gera skipanir, sum tryggja, at smærri veitarar fáa størri møguleika at bjóða upp á uppgávur

Til at fremja hetta arbeiðið hevur landsstýrismaðurin sett ein arbeiðsbólk, mannaður við fólki við kunnleika til byggi- og ráðgevaravinnuna, almenna fyrisiting og játtanarskipanina og búskap, umframt at Fíggjarmálaráðið er skrivstova hjá bólkinum, og Landsverk skal ganga arbeiðsbólkinum til handa.

Arbeiðsbólkurin er mannaður við Arna Poulsen, fyrrverandi aðalstjóra sum formanni, Petur Alberg Lamhauge, fyrrverandi aðalstjóra, Ewald Kjølbro, stjóra á Landsverki og Johan Syderbø, ráðgeva í Vinnuhúsinum.

Skrivstova bólksins er mannað við Tórir Michelsen og Egon Joensen, búskaparfrøðingar í Fíggjarmálaráðnum.

Ætlanin er, at fólkini, ið manna arbeiðsbólkin, kunnu vera liðug við uppgávuna 1. apríl 2015. Formaðurin verður løntur av Fíggjarmálaráðnum, meðan hini í arbeiðsbólkinum ikki verða lønt serstakt fyri at luttaka í arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin varð settur 13. januar 2015. Orsakað av stuttu tíðarfreistini í hesum føri, verður serligur dentur lagdur á at lýsa hesi viðurskiftini:

- Meta um, hvørt meira av virkseminum hjá Landsverki kann útveitast við fyrimunum fyri landið og samfelagið sum heild
- Lýsa gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki og meta um, hvørt gjøgnumskygnið kann gerast betri
- Um almennar uppgávur eru, sum kunnu flytast til Landsverk

## Framferðarháttur

Fíggjarmálaráðið hevur orðað arbeiðssetningin, men orsakað av stuttu tíðini, sum er sett av til arbeiðið, er, sum víst á frammanfyri, serligur dentur lagdur á at kanna møguleikar fyri útveiting, gjøgnumskygnið og at kanna, um uppgávur eru, sum við fyrimuni kunnu leggjast til Landsverk.

Arbeiðsbólkurin hevur fingið tilfar frá Landsverki, sí fylgiskjølini A, K, L og N og sjónarmið frá Vinnuhúsinum, sí fylgiskjal B. Yvirlit yvir fylgiskjøl til frágreiðingina er á bls. 3.

Eisini hevur arbeiðsbólkurin sent Løgmansskrivstovuni, Mentamálaráðnum, Almannaráðnum og Heilsumálaráðnum spurnaskjal, sí hjálagda fylgiskjal C.

Umboð fyri arbeiðsbólkin hava havt fundir við umboð fyri Løgmansskrivstovuna, Mentamálaráðið og Heilsumálaráðið og hava eisini fingið tilfar frá teimum og stovnum, sí fylgiskjølini D til J.

Sjálv frágreiðingin er í høvuðsheitum skrivað av umboðunum fyri Fíggjarmálaráðið og formanninum, og umboðini fyri Landsverk og Vinnuhúsið hava síðani gjørt sínar viðmerkingar.

Í bólkinum hevur verið roynt at koma til felags niðurstøður og annars at lýsa ymisku sjónarmiðini.

Arne Poulsen

Petur Alberg Lamhauge

Ewald Kjølbro

Johan Syderbø

# Niðurstøður og tilráðingar frá arbeiðsbólkinum

Niðanfyri er tikið samanum nøkur av tilmælunum í frágreiðingini.

### *Gjøgnumskygni*

- Landsverk almannakunnger árligar uppgerðir yvir, hvussu stórur partur av játtanum fer til Landsverk, og hvussu stórur partur fer til uttanhýsis ráðgevar og arbeiðstakarar. Uppgerðirnar verða býttar á tær ymisku verkætlanirnar, sum Landsverk varðar av.
- Ætlan um at betra um roknskaparliga og fíggjarliga gjøgnumskygnið á Landsverki verður partur av mál- og avrikssáttmálum í framtíðini.
- Vinnufeløgini taka meira ítøkiliga upp við Landsverk, hvussu gjøgnumskygnið kann betrast, og á hvørjum økjum tørvur er á betri gjøgnumskygni.

### *Møguligar nýggjar uppgávur til Landsverk*

- Landsverk gerst formligur eigari av skrivstovu- og lagurbygningum landsins.
- Stovnar og ráð koma stigvíst at gjalda eina marknaðargrundaða leigu.
- Fígging til hetta kann millum annað fáast við effektiviseringum og sparingum innan orkunýtslu og innan hølisnýtslu.
- Møguleikin at Landsverk yvirtekur byggiharraleiklutin hjá Bústaðir verður umhugsaður og kannaður.
- Landsverk fær ábyrgdina av rakstri og haldi av báðum undirsjóvartunlunum.
- Mælt verður til at kanna, hvørjir fyrimunir eru av at leggja Landsverk, Akstovuna, Strandfaraskip Landsins og Ráðið fyri ferðslutrygd saman í ein stovn og hvussu til ber at fremja hetta í verki.

### *Metingar um virksemi stovnsins*

- Hóast nakrir av stovnunum eru misnøgdir við tænastur frá Landsverki, benda svarini frá aðalráðunum á, at skipanin við byggi- og bygningsumsiting landsins hjá Landsverki hevur eydnast væl, og at endamálini í hesum sambandi eru ella kunna røkkast.

### *Útveiting av virksemi hjá Landsverki*

- Hildið verður fast við verandi mannagongdir innan bygging, men hildið verður støðugt eyga við, hvørt til ber at fara longur í sambandi við tað at bjóða út verkætlanir, ráðgevara- og eftirlitsuppgávur og arbeiðstøkur.
- Mælt verður til at leggja seg eftir at fremja skipanir, sum hava við sær betri viðlíkahald av landsins bygningum, harundir nýtslu av vanligum rammusáttmálum, ESCO og at aðalráð og stovnar, sum frálíður, gjalda leigu fyri skrivstovuhøli, sum landið eigur.
- Mælt verður til, at landsvegahaldið í Sandoynni saman við grót- og skervframleiðsluni og viðlíkahaldinum av ferjurampuni í Skopun verður veitt út.
- Vera góðar royndir av hesum, ber til at seta saman onnur hóskandi øki og virksemi og síðani bjóða hesi út.
- Mælt verður til at samskipa møguliga meiri útveiting innan havnir við útveiting innan landsvegahaldið.
- Arbeiðsbólkurin mælir til at kanna, hvørjir fyrimunir vera av at leggja raksturin av tyrlupallunum til Vága Floghavn at umsita.

- Mælt verður til, at bitumen-goymslan framhaldandi verður rikin av Landsverki á sama hátt sum í dag.
- Mælt verður til, at Fíggjarmálaráðið staðfestir verandi prísásetingarskipan fyri grót- og skervframleiðslu, asfaltframleiðslu og arbeiði, ið verða framd fyri onnur, og tá ið bjóðað verður uppá arbeiði í kapping við privatu vinnuna.
- Í royndini miðvíst at taka seg burtur úr inntøkufíggjaðum virksemi verður mælt til sum eina royndarætlan at veita alt virksemið í grótbrotinum í Porkeri út.

### *Mannagongdir í sambandi við útbjóðing*

- Mælt verður til, at Landsverk í høvuðsheitum heldur fram við at bjóða út sum higartil. Í hesum tilmæli liggur eisini, at Landsverk støðugt eftirmetir royndir við útbjóðingum og leggur hesar til rættis, soleiðis at sum mest fæst burturúr fyri byggiánara samanlagt.
- Mælt verður til at gera royndir við at skilja útboð av arbeiðstøku og tilfarsveiting sundur og somuleiðis at gera royndir við at skipa verkætlanir í smærri arbeiðspartar (WBS).
- Mælt verður til at kanna møguleikarnar fyri at gera eina skipan, sum í einum avmarkaðum tíðarskeiði gevur fyritøkum góðkenning til at bjóða uppá veitingar í ávísum bólkum, ið hava hóskandi samsvar við førleikar og royndir hjá fyritøkunum.
- Eru ynski ella ætlanir um prinsipiellar broytingar í útbjóðingartilgongd, verður mælt til, at hesar verða umrøddar millum vinnuna og Byggiharrasamtakið, ið umframt Landsverk eisini telur aðrar stórar byggiánarar.

## Stutt um Landsverk og virksemi stovnsins

Landsverk varð stovnað í 1948 undir heitinum Landsverkfrøðingurin. Í dag er Landsverk stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Áðrenn hetta hevur stovnurin verið undir Vinnumálaráðnum og Innlendismálaráðnum.

Virksemið hjá stovninum er skipað sambært fleiri lógum, kunngerðum og reglugerðum. Í hesum sambandi kunnu takast fram:

- Reglugerð fyri Landsverkfrøðingin frá 22. apríl 1998
- Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisiting
- Løgtingsfíggjarlógin, §3
- Játtanarskipan landsins og kunngerðir í sambandi við hana
- Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins
- Galdandi verklagslógir
- Løgtingslóg nr. 133 frá 1993 um innlit í fyrisitingina

Stovnurin hevur høvuðssæti í Tórshavn, har millum annað skrivstovuhald og byggitekniskar uppgávur í breiðari merking verða fyrisitnar. Kring landið eru átta vegastøðir, tríggjar smiðjur, eitt asfaltverk, fýra grót- og skervverk, ein bitumen-goymsla og ein saltgoymsla.

Umroknað til fulltíðarstørv starvast í dag umleið 125 fólk hjá Landsverki. Nevnast kann, at í 1980'árunum vóru eitt tíðarskeið omanfyri 600 starvsfólk á Landsverki.

Samanumtikið er virksemið hjá Landsverki sera fjølbroytt. Stovnurin hevur um hendi vega-, havna- og byggiharrauppgávur, og arbeiðið fevnir millum annað um at ráðleggja, gera ætlanir, forkanningar og útinna byggiuppgávur, umframt at reka og viðlíkahalda landsvegir, tunlar, brýr, havnir, bygningar og tyrlupallar. Í sambandi við byggi- og anleggsuppgávur er Landsverk tað, ið á fakmáli nevnist ein professionellur byggiharri, tað er ein byggiharri, ið hevur sína egnu organisasjón til at røkja byggiharrauppgávuna.

Landsverk er eisini veitari av ymiskum vørum og tænastum, harundir sølu av gróti, skervi, sandi og ymiskum sløgum av asfalti og oljugrúsi. Stovnurin ger eisini eina røð av mátingum á landi og sjógvi og rekur í hesum sambandi 25 veðurstøðir, ið veita veðurdátur av ymiskum slagi.

Millum almenningin er Landsverk mest kent fyri sínar uppgávur í sambandi við vegir og ferðslu. Eisini er væl kent, at Landsverk veitir ráðgeving til aðalráð og stovnar í sambandi við leigumál og í sambandi við viðlíkahald og ný- og umbygging av almennum bygningum.

Av øðrum minni kendum uppgávum kunnu nevnast eftirlit við vitum og ymiskar uppgávur í sambandi við aling, harundir gerð av kortum fyri aliøki og alistøðir.

Eisini stendur Landsverk fyri tilbúgvingini hjá landinum, tá ið tað snýr seg um at tryggja samferðslukervið, vegir og havnir, umframt at hava um hendi operativa partin av basing av oljudálking á sjónum.

Fíggingin av virkseminum hjá Landsverki kann skiljast sundur í tríggjar partar, ið eru:

- rakstrarjáttan á fíggjarlógini (til vegir, havnir og bygningar landsins)
- inntøkufíggjað virksemi (tað er til dømis søla av gróti, skervi, sandi og asfalti)

- partur av løgujáttanum, ið verður brúktur at fíggja byggiharravirksemið við

Landsverk hevur sjálvt latið ymiskt tilfar úr hondum, ið lýsir virkisøki og arbeiðsuppgávur á stovninum. Er tørvur á størri innliti í uppgávurnar hjá stovninum, verður tí í hesum sambandi víst til heimasíðuna hjá Landsverki (lv.fo) umframt ritið *"Landsverk – lýsing av virksemi og uppgávum á stovninum"*, sí fylgiskjal A.

## Gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki

Landsverk er almennur stovnur og virkar sostatt undir løgtingslóg um innlit í fyrisitingina. Stovnurin virkar eisini undir játtanarskipan landsins, og stovnurin hevur skyldu at halda galdandi kappingarlóggávu. Harafturat er stovnurin undir eftirliti av Landsgrannskoðanini og Kappingareftirlitinum, umframt at uttanhýsis grannskoðarar grannskoða roknskapin fyri bitumen-goymsluna árliga. Harafturat verður alt inntøkufíggjaða virksemið undir einum grannskoðað av uttanhýsis grannskoðara við jøvnum millumbilum (tó ikki árliga).

Ein atfinning, ið ofta er at hoyra ímóti Landsverki, er, at lítið gjøgnumskygni og opinleiki eru í virkseminum hjá Landsverki. Hesar atfinningar um vantandi gjøgnumskygni koma í flestu førum frá privata vinnulívinum og snúgva seg í flestu førum um roknskaparliga og bókhaldsliga gjøgnumskygnið í virkseminum og í summum førum um mannagongdir í sambandi við útbjóðingar.

Nakrir av stovnsleiðarunum, sum hava svarað spurnablaðnum frá arbeiðsbólkinum, hava viðmerkt, at í ávísum førum hevur roknskaparliga gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki og í teimum verkætlanum, sum Landsverk varðar av, ikki verið nøktandi eftir teirra hugsan.

Privata vinnulívið hevur serliga eftirlýst størri gjøgnumskygni og kunning um, hvussu nógvar útreiðslur Landsverk nýtir til ymiskar verkætlanir og løgur, har ið Landsverk virkar sum byggiharri og hevur byggileiðslu um hendi vegna landið. Vinnulívið hevur millum annað eftirlýst upplýsingar um, hvussu stórur partur av játtanum til verkætlanir fer til Landsverk, og hvussu stórur partur fer til uttanhýsis ráðgevar, ið veita tænastur, til dømis prosjektering, gransking, kanningar og eftirlit.

Upplýsingar um útreiðslur til innanhýsis lønir og til uttanhýsis ráðgevar á verkætlanum, sum Landsverk varðar av, eru tøkir í tilfari, sum Landsverk hevur latið arbeiðsbólkinum. Í talvunum 1 og 2 á bls. 31-33 í fylgiskjali A er býtið millum útreiðslur til innanhýsis lønir og uttanhýsis ráðgevar víst býtt á verkætlanir og á stovnsnummar.

Til tess at tryggja gjøgnumskygni í inntøkufíggjaða virkseminum á Landsverki og fyri at lúka ásetingar um inntøkufíggjað virksemi í játtanarskipan landsins (serliga kunngerð nr. 84 frá 7. juni 2011 um rakstrarjáttan) hava inntøkufíggjaða virksemið (bitumen-goymslan, asfalt-framleiðslan og skervverkið) egnar atskildar roknskapir.

Hetta útgangsstøðið, at talan er um almennan stovn, sum virkar undir innlitslógini og játtanarskipan landsins og er undir eftirliti av Kappingareftirlitinum og Landsgrannskoðanini, merkir, at roknskaparliga og fíggjarliga gjøgnumskygnið á stovninum í útgangsstøði átti at verið gott.

Kappingareftirlitið hevur eisini viðgjørt roknskaparliga og bókhaldsliga gjøgnumskygnið á Landsverki. Niðurstøðan hjá Kappingareftirlitinum í sambandi við eina avgerð um prísáseting á bitumen var, at "*Landsverk hevur gjørt sær ómak at áseta prísir í tráð við játtanarskipanina og hevur gjørt eitt munagott arbeiði at skipa gjøgnumskygni í teirra virksemi, soleiðis at gjørligt hevur verið at áseta prísir í tráð við veruliga kostnaðin*" og "*samanumtikið metir Kappingareftirlitið, at Landsverk hevur gjørt eitt munagott arbeiði at skapa gjøgnumskygni í inntøkufíggjaða virkseminum.*"

Landsverk hevur játtan til byggimál, men hevur ikki nakra serstaka játtan til at umsita løgur og viðlíkahald. Tí verða fólk sett og lønt av játtanunum til løgur og viðlíkahald, og útreiðslur verða

bókaðar út á verkætlanir eftir tímauppgerð. Henda loysnin er eisini vald, soleiðis at til ber at síggja veruliga kostnaðin á løgunum og viðlíkahaldinum, sum landið ger.

Av samlaðu játtanunum til løgur verða sambært Landsverki brúktar 2-3% innanhýsis á stovninum og eini 8-10% av játtanunum til viðlíkahald á landsins bygningar til umsiting og verkætlanarleiðslu á stovninum. Byggi- og bygningsumsitingin á Landsverki verður soleiðis fyri ein part fíggjað við, at lønarútreiðslur verða skrásettar út á einstøku løgu- og viðlíkahaldsjáttanirnar, sum stovnurin hevur ræðisrættin á, og har ið stovnurin arbeiðir við fyrireiking, forkanningum, at gera byggiskráir, útbjóðingartilfar og at standa fyri útbjóðingum og lisitasjónum.

Byggi- og bygningsumsitingin á Landsverki virkar í stóran mun sum byggiharri fyri einstøku aðalráðini, tá ið verkætlanir verða framdar. Hetta merkir, at Byggi- og bygningsumsitingin evnar til og fyrireikar verkætlanir saman við aðalráðum, ger í summum førum byggiskráir, stendur fyri útboðum og hevur byggileiðslu í summum førum. Byggi- og bygningsumsitingin loysir sostatt uppgávur tvørfakliga tvørturum aðalráðini. Hetta kann sammetast við deildina KT Landsins á Gjaldstovuni, sum somuleiðis loysir uppgávur tvørturum aðalráð og stovnar.

Ein tann týdningarmesta uppgávan hjá Landsverki í hesum sambandi er prosjektleiðsla, har ið Landsverk hevur ábyrgdina av tilgongdini í øllum fasum frá byrjan til enda, tað er í fyrireikandi fasunum, í prosjekteringsfasuni, í útbjóðingarfasuni og í útinningarfasuni. Eisini aftan á avhending hevur Landsverk eina ávísa ábyrgd í sambandi við 1 ára og 5 ára garantisýn.

Landsverk hevur ongantíð fingið serstaka játtan til ta arbeiðsorku, sum tað krevur at virka sum professionellur byggiharri, tá ið verkætlanir verða framdar. Landsverk fíggjar tí í stóran mun byggiharravirksemið við at skráseta lønarútreiðslur á einstøku løgujáttanirnar eftir tímauppgerð (kontan verkætlanarleiðsla fevnir um hetta virksemi). Loysnin við at skráseta lønarútreiðslur á einstøku løgujáttanirnar hevur verið brúkt í mong ár og er millum annað vald, soleiðis at til ber at síggja veruliga kostnaðin á landsins løgum.

Til ber helst at bøta um gjøgnumskygnið á stovninum við árliga at almannakunngera uppgerðir yvir, hvussu stórur partur av játtanum fer til Landsverk, og hvussu stórur partur fer til uttanhýsis ráðgevar og arbeiðstakarar. Í flestu førum verða tílíkar uppgerðir gjørdar og eru tøkar, longu sum er, men dømi kunnu vera um, at henda mannagongd í størri mun kann verða brúkt. Ein ætlan fyri at kunngera tílíkar uppgerðir kann eisini gerast partur av komandi mál- og avrikssáttmálum millum Landsverk og avvarðandi aðalráð.

**Tilmæli:**

- Landsverk almannakunnger árligar uppgerðir yvir, hvussu stórur partur av játtanum fer til Landsverk, og hvussu stórur partur fer til uttannhýsis ráðgevar og arbeiðstakarar. Uppgerðirnar verða býttar á tær ymisku verkætlanirnar, sum Landsverk varðar av. Mælt verður til, at Landsverk og vinnan samskifta nærri um, hvussu tílíkar uppgerðir kunnu útgreinast og setast upp.
- Ætlan um at betra um roknskaparliga og fíggjarliga gjøgnumskygnið á Landsverki verður partur av mál- og avrikssáttmálum í framtíðini.
- Vinnufeløgini taka meira ítøkiliga upp við Landsverk, hvussu gjøgnumskygnið kann betrast, og á hvørjum økjum tørvur er á betri gjøgnumskygni.

## Møguligar nýggjar uppgávur at leggja til Landsverk

Í samskiftinum við ráðini hava vit ikki fingið uppskot um møguligar uppgávur at leggja til Landsverk at umsita.

Vit vilja niðanfyri vísa á nakrar uppgávur, sum kundu verið lagdar ella sum kundu verið umhugsaðar at leggja til Landsverk at umsita.

### *Landsverk sum eigari av bygningum landsins*

Í arbeiðinum hevur verið umrøtt, hvørt til ber at víðka byggiharra- og eigaraleiklutin hjá Landsverki. Endamálini kunnu til dømis vera:

- at gagnnýta bygningar landsins betur
- at gera greiðari, hvørt bygging ella leiga svarar seg best
- at fremja miðvíst og effektivt viðlíkahald av landsins bygningum
- at fremja orkusparing og umlegging av orkunýtsluni
- at fremja samtyktar byggistandardir
- at stuðla undir ein marknaðargrundaðan byggi- og leigumarknað
- at fremja byggingar og umbyggingar í samstarvi við privat feløg

Í 1999 setti løgmaður eina nevnd at gera tilmæli um skipan av eini miðsavnaðari byggi- og bygningsumsiting. Nevndin handaði tilmæli sítt sama ár. Byggiumsiting landsins varð skipað undir táverandi Landsverkfrøðingsstovni frá 1. januar 2001.

Í 2002 mælti landsstýrismaðurin í Vinnumálum til at taka undir við eini byggireglugerð, sum millum annað hevði við sær, at viðkomandi ráð skuldi fáa pening játtaðan til programmering og fyrireiking annars til byggiverkætlanir, meðan játtanin til prosjektering og bygging skuldi vera hjá landsstýrismanninum, ið varðar av Landsverki.

Landsverk skuldi vera byggiharri frá og við prosjekteringini, og til byggimálið er lokið.

Í 2006 mælti løgmaður til at skipa byggi- og bygningaumsiting sum málsøki við hesum uppgávum:

- Ný- og umbygging
- Viðlíkahald
- Leigumál og keyp
- Studningsmál
- Byggiráðgeving í sambandi við málsviðgerð hjá stovnum
- Leiðreglur og yvirlit

Mett varð ikki, at hetta fór at hava beinleiðis fíggjarligar avleiðingar við sær. Formliga støðan er í dag, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur, eftir at hava fingið samtykki til tess á landsstýrisfundi, heimild at geva øllum aðalráðum og stovnum undir landinum tænastuboð um:

- Leigumál og keyp av fastogn
- Ný- og umbygging
- Nýtslu av byggiráðgeving
- Viðgerð av studningsmálum viðvíkjandi fastogn
- Viðlíkahald

Tá ið umræður játtan, er øll viðlíkahaldsjáttanin hjá landinum savnað hjá Landsverki, meðan játtanin til nýbygging er hjá hvørjum einstøkum aðalráði.

Viðlíkahaldið verður raðfest av Landsverki í samstarvi við einstøku ráðini. Nakað er sostatt komið ávegis at skipa greiðar og góðar karmar fyri byggi- og bygningaumsiting landsins, soleiðis at nøkur av omanfyri umrøddu endamálum betur kunna verða rokkin. Fyri at koma longur á hesi leið og frægast møguligt at røkka endamálunum, mælir arbeiðsbólkurin til, at Landsverk gerst formligur eigari og byggiharri av landsins bygningum.

Á fundunum við Løgmansskrivstovuna, Mentamálaráðið og Heilsumálaráðið varð umrøtt, hvørt annað virksemi kundi verið hjá Landsverki, sum í dag er hjá einstøku aðalráðunum ella hjá stovnum.

Longu í dag er støðan tann, at Landsverk hevur avtalu við fleiri av aðalráðunum um, at Landsverk er byggiharri teirra vegna, umframt at Landsverk heldur allar bygningar landsins viðlíka eftir ávísum leisti og uppgávubýti.

Tað er tí ikki eitt ógvuliga stórt stig nú at taka, at Landsverk gerst formligi eigari av bygningum landsins, og hetta stig hevði ikki sum so havt nýggjar útreiðslur við sær. Men eins og tað hevur verið ein tilgongd, at Landsverk í verki er byggiharri landsins og formliga er viðlíkahaldari av bygningum landsins, kann tað vera skilagott at Landsverk í stigum tók á seg formliga eigaraleiklutin av bygningum landsins.

Byrjað kundi verið við, at Landsverk gjørdist eigari av øllum skrivstovu- og lagurbygningum landsins. Krøv til slíkar bygningar eru nøkulunda eins tvørtur um aðalráð og stovnar, og tílíkir bygningar kunnu antin verða bygdir av landinum ella verða leigaðir frá privatum feløgum, alt eftir hvat svarar seg frægast. Tá ið Landsverk er vorðin formligur eigari av skrivstovu- og lagurbygningum landsins, ber til at fara eitt stig víðari, soleiðis at Landsverk samstundis gjørdist útleigari av øllum skrivstovubygningunum og teimum fermetrum, ið hartil hoyra.

Hugsanin er tó ikki, at stovnar og ráð frá fyrsta degi gjalda leigu til Landsverk, hava tey ikki gjørt tað frammanundan, men at løgd verður ein ætlan fyri, hvussu til ber at koma fram til, at stovnar og aðalráð stigvíst gjalda eina marknaðargrundaða húsaleigu. Á henda hátt ber helst til at fremja endamálinum, at bygningar landsins verða frægast møguliga gagnnýttir og viðlíkahildnir, og at stuðlað verður undir ein byggi- og leigumarknað, har ið støðugt ber til at meta um, hvørt bygging ella leiga svarar seg frægast fyri landið.

Greitt er, at peningur skal til, skulu aðalráð og stovnar gjalda leigu, har ið leiga ikki hevur verið goldin áður. Hesin peningur kann millum annað koma frá:

- Sparingum í hølisnýtslu
- Sparingum í orkunýtslu
- Effektiviseringum í umsitingini, millum annað við betri samskipan millum aðalráð og stovnar

Sambært metingum skulu umsitingarligir stovnar og aðalráð fremja sparingar ella effektiviseringar fyri umleið 4% av samlaðu rakstrarútreiðslunum fyri í miðal at kunna gjalda nýáløgdu leiguútreiðslurnar, sí fylgiskjal L.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini umrøtt møguleikan, at Landsverk kundi verið byggiharri vegna Bústaðir, eins og Landsverk er byggiharri vegna aðalráðini. Uttan at arbeiðsbólkurin hevur gjørt sær metingar um virksemið hjá Bústaðir, mælir arbeiðsbólkurin til at umhugsa henda møguleikan og við somu grundgevingum sum fyri at flyta byggiharraleiklutin frá aðalráðunum til Landsverk.

**Tilmæli:**

- Landsverk gerst formligur eigari av skrivstovu- og lagurbygningum landsins.
- Stovnar og ráð koma stigvíst at gjalda marknaðargrundaða leigu.
- Fígging til hetta kann millum annað fáast við effektiviseringum og sparingum.
- Møguleikin at Landsverk yvirtekur byggiharraleiklutin hjá Bústaðir verður umhugsaður og kannaður.

## *Undirsjóvartunlar*

Tá ið undirsjóartunlarnir undir Vestmannasund og Leirvíksfjørð vórðu bygdir, varð hetta virksemi lagt í hvør sítt partafelag, sum framdu verkætlanirnar og eftirfylgjandi hava rikið tunlarnar.

Tá ið verkætlanirnar vórða framdar, hevði Landsverk ábyrgd av mótvegis landsstýrismanninum at góðkenna tunnilsverkætlanina, áðrenn arbeiðið varð sett í gongd. Somuleiðis hevði Landsverk eftirlit við, at verkætlanirnar vórðu framdar samsvarandi góðkendu ætlanunum. Harumframt gjørdi Landsverk uppskot til linjuføringar.

Ein av kjarnuuppgávunum hjá Landsverki er rakstur og hald av vegum, tunlum og brúm. Tí hevði tað hóskað væl til verandi virkisøki hjá Landsverki, um raksturin av báðum undirsjóartunlunum varð lagdur til Landsverk at umsita.

Tað er greitt, at tað verður nakað at spara í hesum sambandi. Hinvegin verður neyðugt at fíggja kostnaðin av at reka og halda teir báðar undirsjóvartunlarnar.

**Tilmæli:**

- Landsverk fær ábyrgdina av rakstri og haldi av báðum undirsjóvartunlunum.

## *At leggja aðrar stovnar saman við Landsverki*

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, um stovnar ella annað virksemi kann hugsast at vera, sum við fyrimunum ber til at leggja saman við Landsverki, soleiðis at felags funksjónir, fasilitetir, vitan og starvsfólkahópur kunnu gagnnýtast betur enn í dag. Arbeiðsbólkurin heldur í fyrsta umfari, at tað er vert at kanna, um teir tríggir niðanfyri umrøddu stovnar, sum virka innan infrastruktur, við fyrimuni kunnu leggjast saman við Landsverki. Eitt annað endamál at leggja stovnar saman við Landsverki er at styrkja um møguleikarnar at útveita, tí Landverk hevur longu í dag drúgvar royndir við útbjóðing og sáttmálastýring.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini kannað, hvørjar uppgávur stovnar sum Landsverk hava í okkara grannalondum. Gongdin í okkara grannalondum er sum heild, at fleiri og fleiri uppgávur verða savnaðar á einum stovni, sum hevur ábyrgdina av landsvegakervi og samferðslu sum heild. Til dømis kann verða nevnt, at

- Landsverkstovnurin í Íslandi (Vegagerðin) hevur ábyrgdina av ferjusambondum, har ið sjálvur raksturin er útveittur.

- Í Finnlandi umsitur Trafikvärket jarnbreytir og siglingarleiðir.
- Statens Vegvesen í Noregi hevur uppgávur, sum Akstovan og Ráðið fyri Ferðslutrygd røkja í Føroyum, tað er bileftirlit, koyrikort og ferðslutrygd.
- Trafikverket í Svøríki umsitur vegir, jarnbreytir, strandferðslu og flogferðslu, tað er at kalla alt undirstøðukervið í Svøríki.
- Vejdirektoratet í Danmark umsitur vegir og brýr, men ikki havnir, strandferðslu ella flogferðslu.

Eitt grundsjónarmið í bólkinum er, at í einum smáum samfelagi sum tí føroyska er sum heild umráðandi, at almennir stovnar ikki gerast ov smáir. Hjá smáum almennum stovnum er torført at varðveita servitan og dugnalig starvsfólk, og stórur vandi er fyri, at servitan tá verður spjadd á ymiskar stovnar ella í ringasta føri fer heilt fyri skeyti. Eisini er vandi fyri, at dygdin á til dømis lóggávuarbeiði, sum verður gjørd á stovnum, verður ymisk, sum er óheppið fyri borgarar og vinnulív. At stovnar hava ávísa stødd og ein ávísan starvsfólkahóp skapar eisini betri møguleikar fyri tvørfakligum samstarvi innanhýsis á stovnum og millum stovnar.

Viðmerkjast skal, at tíðin, sum er sett av til hetta arbeiðið, hevur verið ov stutt til at gera nágreiniligar kanningar av, hvørjir fyrimunir vera fyri samfelagið av at leggja hesar stovnar saman við Landsverki. Arbeiðsbólkurin mælir í hesum sambandi til, at nærri kanningar og útgreiningar verða gjørdar. Sparingar av at leggja stovnar saman við Landsverki koma sjálvsagt ikki alt fyri eitt, men fara at koma, sum frálíður.

**Akstovan**

Landsverk hevur millum annað um hendi planlegging, gerð, umsiting, hald og rakstur av landsvegakervinum og arbeiðir miðvíst fyri, at ferðslan til eina og hvørja tíð tænir bæði tí ferðandi og samfelagnum optimalt. Tað skal vera trygt, lætt og skjótt at ferðast á landsvegakervinum.

Eisini arbeiðir Landsverk áhaldandi við at betra um ferðslutrygdina á landsvegakervinum. Hetta verður gjørt við at gera ferðslufrágreiðingar, seta í verk ferðslutrygdartiltøk, gera ferðslugrannskoðan og samferðsluætlanir. Landsverk hevur átta vegastøðir kring landið umframt tríggjar smiðjur.

Endamálið hjá Akstovuni er at virka fyri størri trygd í ferðsluni. Umframt at stíla fyri koyriroyndum, fremja akfaratøkniligar kanningar og vera øðrum myndugleikum til hjálpar í ferðslumálum, varð virkisøkið munandi víðkað, tá ið Akstovan í 1996 yvirtók umsitingina av akfaraskránni og koyrikortskránni frá Føroya Landfúta. Í 2000 yvirtók stovnurin vegskattaumsitingina frá Føroya Gjaldstovu, og í 2004 varð umsitingin av skrásetingargjøldum yvirtikin frá Toll og Skattstovu Føroya.

Akstovan hevur umframt høvuðsdeildina í Tórshavn eftirlitsdeildir í Klaksvík, Saltangará og Suðuroy.

Tað tykist at vera ávíst samanfall millum arbeiðs- og virksøkini hjá Landsverki og Akstovuni. Verða Akstovan og Landsverk løgd saman, ber til at gagnnýta teir fasilitetir hjá Landsverki, sum longu eru kring landið. Eisini ber til at fremja sparingar innan umsiting, tí sleppast kann undan dupultfunksjónum. Á tann hátt ber til at fremja sparingar, sum kunnu hava við sær, at til ber at veita betri og bíligari tænastur til borgara og vinnu. Tí kundi tað verið vert at kannað, hvat til ber at

spara innan umsiting og gagnnýtslu av fasilitetum hjá báðum stovnunum, um sleppast kann undan dupultfunksjónum og harumframt hvørjar uppgávur við fyrimuni kunnu útveitast.

**Tilmæli:**

- Arbeiðsbólkurin mælir til at kanna, hvørjir fyrimunir vera av at leggja Landsverk og Akstovuna saman, og hvussu hetta kann fremjast í verki.

### Ráðið fyri ferðslutrygd

Sum nevnt omanfyri, hevur Landsverk millum annað um hendi planlegging, gerð, umsiting, hald og rakstur av landsvegakervinum og arbeiðir miðvíst fyri, at ferðslan til eina og hvørja tíð tænir bæði tí ferðandi og samfelagnum optimalt. Landsverk arbeiðir tí áhaldandi við at betra um ferðslutrygdina á landsvegakervinum. Hetta verður gjørt við at gera ferðslufrágreiðingar, seta í verk ferðslutrygdartiltøk, gera ferðslugrannskoðan og samferðsluætlanir.

Endamálið hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd er somuleiðis sambært viðtøkunum at gera ferðsluna tryggari við:

- at betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi
- at stuðla ferðsluundirvísingina við ráðgeving og stuðuli
- at útvega tíðarhóskandi og viðkomandi undirvísingarmiðlar í ferðslulæru
- at skipa fyri skeiðvirksemi og trygdarfremjandi verkætlanum
- at geva sakliga upplýsing um øll tey viðurskifti, sum eru til ampa fyri ferðslutrygdina
- at samstarva í góðum stevi og hóskandi vavi við myndugleikar, stovnar og einstaklingar í ferðslutrygdarspurningum
- at fáa støðugar og viðkomandi upplýsingar um ferðsluóhapp/-vanlukkur, skaðaorsakir o.a. at nýta í ferðslutrygdararbeiðinum og
- at fáa regluligt fjølmiðlainnivist við ferðslutrygdarboðskapi ráðsins

Tað tykist tí somuleiðis at vera ávíst samanfall millum uppgávurnar hjá Landsverki og uppgávurnar hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd. Arbeiðsbólkurin heldur eisini, at Ráðið fyri ferðslutrygd hevði fingið sín boðskap um ferðslutrygd meira sjónliga fram, um kunningarátøk hjá ráðnum vórðu samskipað betur við kunningarátøk hjá Landsverki. Eisini hevði helst borið til at spart nakað av umsitingarútreiðslum og møguliga eisini í skrivstovuhaldi og hølisnýtslu.

**Tilmæli:**

- Arbeiðsbólkurin mælir til at kanna, hvørjir fyrimunir vera av at leggja Ráðið fyri ferðslutrygd saman við Landsverki, og hvussu hetta kann fremjast í verki.

### Strandfaraskip Landsins

Sigling millum oyggjar og ferðing millum bygdir eru nær tengd at teimum tænastum, sum Landsverk longu veitir í dag. Eisini kann sigling millum oyggjar og ferðing millum bygdir roknast sum ein partur av verandi undirstøðukervi.

Eins og nevnt er omanfyri, er alt samferðsluøkið, vegir, havnir, ferjur, bussar, jarnbreytir og flogferðsla, lagt undir ein og sama stovn at umsita í fleiri av okkara grannalondum.

Verða Strandfaraskip Landsins løgd saman við Landsverki, ber til at fáa fyrimunir av stórrakstri og møguliga at fremja sparingar í samlaðu almennu umsitingini og møguliga eisini í skrivstovuhaldi og hølisnýtslu. Hetta merkir helst, at til ber at veita betri og bíligari tænastu til samfelag og vinnu.

**Tilmæli:**

- Arbeiðsbólkurin mælir til at kanna, hvørjir fyrimunir vera av at leggja Strandfaraskip Landsins saman við Landsverki og hvussu hetta kann fremjast í verki.

## Metingar um virksemi stovnsins

Sambært arbeiðssetninginum skal arbeiðsbólkurin gera metingar um, hvussu stovnurin virkar og gera uppskot til møguligar betringar – benchmarking, og hvussu gjørt verður í øðrum londum kann havast í huga í hesum sambandi.

Í hesum sambandi sendi arbeiðsbólkurin Løgmansskrivstovuni, Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum og Heilsumálaráðnum spurnaskjøl, sí hjálagda fylgiskjal C. Vit fingu svar frá Løgmansskrivstovuni, Mentamálaráðnum og Heilsumálaráðnum og nøkrum av stovnum teirra, sí fylgiskjølini D til J.

Eisini høvdu vit fundir við aðalráðini, sum vit fingu svar frá. Fundirnir við aðalráðini hava millum annað víst, at tær ætlanir, sum hava verið um, at Landsverk, sum frálíður, skal virka sum ein professionellur byggiharri vegna landið hava eydnast ella í øllum førum kunnu fara at eydnast heilt væl.

**Niðurstøða:**

- Hóast nakrir av stovnunum eru misnøgdir við tænastur frá Landsverki, benda svarini frá aðalráðunum á, at skipanin við byggi- og bygningaumsiting landsins hjá Landsverki hevur eydnast væl og at endamálini í hesum sambandi eru ella kunna røkkast.

Landsverk hevur greitt frá umstøðunum og gjørt viðmerkingar til, hví ávísir stovnar hava verið misnøgdir við tænastur frá Landsverki og handfaring av ávísum málum, sí hjálagda fylgiskjal K. Ein orsøk til ávísa misnøgd millum summar stovnar og aðalráð við tænastur frá Landsverki tykist vera, at samlaða játtanin til viðlíkahald og umvælingar av bygningum landsins er ov tepur sammett við tørvin. Hetta merkir, at Landsverk má raðfesta neyvt á hesi játtan, og hetta kann sjálvsagt hava við sær ávísa misnøgd á summum stovnum og í summum aðalráðum.

Harafturat gjørdi Gallup-Føroyar í februar mánaði í ár eina nøgdsemiskanning millum borgarar fyri Landsverk. Í kanningini varð spurt um ymisk viðurskifti í sambandi við virksemið hjá Landsverki (kanningin sæst á http://www.landsverk.fo/Default.aspx?pageid=15939&NewsItemID=15466). Kanningin vísir sum heild, at borgarar eru nøgdir við tænasturnar, sum stovnurin veitir, og tað arbeiðið, sum gjørt verður.

Sum víst á frammanfyri, er serligur dentur lagdur á ávís viðurskifti í arbeiðssetninginum. Vit fara tí at mæla til, at meira útgreinaðar metingar verða gjørdar av, hvussu rationelt stovnurin virkar og at gera benchmarkingar. Hetta eigur at verða gjørt av uttanhýsis persónum, sum hava serligar førleikar og royndir við tílíkum arbeiði. Eisini kann verða víst á, at okkum kunnugt fer fram í løtuni arbeiði innanhýsis á Landsverki, sum snýr seg um at benchmarka stovnin.

Í arbeiði okkara hava vit fingið góða, skjóta og væl kvalifiseraða hjálp bæði frá umboðnum hjá Landsverki í arbeiðsbólkinum og frá stovninum sum heild.

## Metingar um útveiting av virkseminum hjá Landsverki

Í hesum partinum verður greitt frá og gjørdar metingar um møguleikarnar fyri útveiting innan:

- bygging
- viðlíkahald av landsins bygningum
- hald av landsvegum, havnum og tyrlupallum
- inntøkufíggjað virksemi, ið fevnir um grót- og skervframleiðslu, asfaltframleiðslu, bitumen-goymslu og ymisk arbeiði vunnin í kapping

Omanfyri umrødda virksemi verður fyristaðið av trimum ymiskum deildum á Landsverki – Byggideildini, Deildini fyri Infrakervi og Framleiðsludeildini.

Tá ið umræður uppgávur hjá Byggideildini – bygging og viðlíkahald – eru hesar uppgávurnar hjá landinum síðani í 2001 alt meira savnaðar hjá Landsverki, soleiðis at tað á Landsverki kann fáast eitt heildaryvirlit yvir hølisviðurskiftini hjá tí almenna umframt at menna førleikarnar hjá landinum, tá ið tað snýr seg um bygging, viðlíkahald, keyp og sølu av ognum, leigumálum og at gera tilmæli um landsins hølistørv.

Hesar uppgávur hava í stóran mun verið loystar av einstøku ráðunum og stovnunum. Í summum førum hava ráð og stovnar havt fakligan førleika at loysa uppgávurnar, meðan tær í nógvum førum hava verið latnar upp í hendurnar á privatum ráðgevarafyritøkum ella í summum førum latnar Landsverki at loysa.

Hendan tilgongdin at miðsavna umrøddu uppgávur hjá Landsverki verður tí av ráðgevara-fyritøkum fatað sum ein flyting av uppgávum frá tí privata til tað almenna.

Ein tilgongd øvugta vegin hevur verið, tá ið tað snýr seg um verkætlanir innan vegakervið og vegagerð, har ið Landsverk hevur minkað munandi um sín leiklut sum arbeiðstakari og prosjekterandi.

Niðanfyri verður viðgjørt, hvussu farið verður fram og ætlandi verður farið fram á virkisøkjunum hjá teimum trimum deildunum, og hvørjir møguleikar eru fyri útveiting.

Ein útveiting kann hava við sær sparingar, umframt at útveittar uppgávur kunnu vera við til at stimbra privatar fyritøkur og harvið eisini vera við til at skapa grundarlag fyri nýggjum og harvið øktum virksemi, og útveiting kann eisini vera við til at menna økir í landinum vinnuliga. Hetta er sjálvsagt treytað av, at rætt verður farið fram og at privatar fyritøkur eru á marknaðum, sum eru førar fyri at loysa uppgávur eins væl og bíliga sum almennir stovnar.

Hinvegin er eisini neyðugt at hava í huga, at ikki allar uppgávur eru egnaðar til útveiting. Hetta eru til dømis uppgávur innanfyri undirstøðukervið, har ið landið hevur áhuga í at uppgávur verða loystar á ávísan hátt, til ávísan kostnað, dygd og við somu tænastu til øll. Talan kann eisini vera um myndugleika- og eftirlitsuppgávur, sum ikki eru væl egnaðar at útveita.

Neyðugt er eisini at hava í huga, at føroyski búskapurin er lítil. Hetta merkir, at fyritøkurnar á fleiri marknaðum eru fáar og smáar. Smáar fyritøkur hava í flestu førum ikki stórrakstrarfyrimunir á sama hátt sum til dømis Landsverk, sum hevur virksemi um alt landið. Tá ið metingar verða gjørdar um útveiting, skal eisini havast í huga, hvussu møguleikarnir eru fyri áhaldandi kapping, og hvørt monopol- ella duopolstøður valda ella koma at valda á marknaðum.

## *Byggiverkætlanir*

Samlaða tilgongdin í sambandi við eina bygging kann býtast upp í sjey fasur ella stig, sí mynd á síðu 21:

- Fyrireiking
- Útboð av ráðgeving
- Prosjektering
- Útboð av bygging
- Bygging
- Avhending
- Garanti

Í sambandi við byggiverkætlanir er vanligt, at aðalráð avtala við Landsverk, at Landsverk virkar sum byggiharri vegna aðalráðið og stýrir gongdini, harímillum at Landsverk hevur ræðisrættin á løgujáttanum til verkætlanir, har ið Landsverk virkar sum byggiharri. Arbeiðsbólkurin er samdur um, at hetta er skilagóð mannagongd, sum eigur at halda fram.

Til tess at fremja landsins byggistandardir, byggifrøðilig og onnur krøv og atlit til landsins bygningar, er skilagott, at vitanin og kunnleikin hjá landinum um tílík mál eru savnað á einum stovni, sum á effektivan hátt kann virka sum landsins byggiharri, heldur enn at vitanin verður spjadd í fleiri aðalráðum og stovnum.

*Hugskot*

Í fyrireikingarfasuni fer eitt samskifti fram millum byggiánara/brúkara og byggiharra, har ið innleiðandi grundarlag, hugskot, krøv og tørvur verða umrødd. Hetta verður ofta nevnt hugskotsfasan. Hetta er á einum yvirskipaðum stigi, og er mest at skilja sum ein tillaging av væntanum til eina møguliga verkætlan millum hesar báðar partar.

Í hesi fasuni verður ætlanin bíløgd og skal vera so mikið væl lýst frá bíleggjara, at bygginevndin kann gera krøv og ynski greið til at fara undir byggiskránna. Hetta merkir, at her skal játtan vera tøk til at gera byggiskránna.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at hetta er ein partur av byggiverkætlanini, sum Landsverk í høvuðsheitinum tekur sær av og eigur at taka sær av frameftir. Í summum førum kann hugsast, at bygginevndin og Landsverk skipa fyri hugskotskappingum – arkitektakappingum – serliga fyri at stimbra fagurfrøðiliga partin av verkætlanunum.

*Byggiskrá*

Byggiskráin er ein lýsing av krøvum, ynskjum og tørvi hjá brúkaranum og ánaranum. Landsverk metir arbeiðið at tilevna eina byggiskrá sum eitt serskilt arbeiði, ið kann hugsast avgreitt, áðrenn farið verður undir at samstarva við ráðgeva um prosjektering. Alt eftir hvat slag av byggiverkætlan, talan er um, verður byggiskráin gjørd innanhýsis á Landsverki, ella verður hon boðin út. Byggiskrá verður gjørd í tøttum samstarvi við byggiánaran og brúkaran.

Uppgávan at gera byggiskráir verður í dag vanliga boðin út, tá tað snýr seg um størri verkætlanir, meðan hetta ikki altíð verður gjørt, tá ið tað snýr seg um smærri verkætlanir, tí at Landsverk í summum førum metir, at tað svarar seg ikki fíggjarliga.


Landsverk - Byggiharri
Fyrireiking
Útboð
Prosjektering
Útboð
Bygging
Avhending
Garanti
Hugskot
Byggiskrá
Útboð av ráðgeving
Skipanaruppskot
Prosjektuppskot
Forprosjekt
Høvuðsprosjekt
Lisitatión
Byggileiðsla
Byggiarbeiði
Prosjekt uppfylging
Fakeftirlit
Avhending
1 ára Garantisýn
5 ára Garantisýn
Ikki altíð útveit
Ikki bjóða út
Verður bjóða út

*Útboð av ráðgeving og lisitasjón*
Útbjóðing er eitt amboð til at tryggja sunna og javnbjóðis kapping, soleiðis at brúkarin fær eina optimala loysn sæð frá einum heildarsjónarmiði.

Útboð av ráðgeving snýr seg um kapping um førleikar og prís. Landsverk er í eini áhaldandi tilgongd at menna ein útbjóðingarhátt, sum minnir um danska "værdibyg", og vinnan er og verður í hesum sambandi tikin við uppá ráð.

Útboð av entreprenørvirksemi – lisitasjón – sum Landsverk stendur fyri, snýr seg um reina prískapping. Í nógvum verkætlanum verður útboðið gjørt í felag av ráðgeva og Landsverki.

*Byggileiðsla*
Mett verður í hvørjum einstøkum føri um, hvørt byggileiðslan skal bjóðast út.

Er talan um smáar verkætlanir kann byggileiðslan veitast av somu ráðgevarafyritøku, sum prosjekterar og møguliga eisini hevur fakeftirlitið um hendi.

Er talan um høvuðsarbeiðstøku, hevur høvuðsarbeiðstakarin fulla ábyrgd av at leiða egið arbeiði, herundir eisini arbeiðið hjá sínum undirarbeiðstakarum.

*Prosjektering, bygging, avhending og garanti*
Allar hesar uppgávurnar – tó ikki altíð byggileiðsla, sum lýst omanfyri - verða, sum er, útveittar ella boðnar út.

### Útveiting innan byggiverkætlanir

Vinnuumboðið í bólkinum váttar, at omanfyri umrøddu mannagongdir fyri tað mesta verða fylgdar, og at tað bert í einstøkum førum verður vikið frá teimum.

Landsverk hevur gjørt tvær uppstillingar av, hvat verður gjørt innanhýsis, og hvat verður gjørt av uttanhýsis ráðgevum fyri nøkur útvald stovnsnummar árini 2006 til 2013 og fyri nakrar útvaldar verkætlanir frá 2006 og frameftir, sí talvurnar 1 og 2 á bls. 31-33 í fylgiskjali A.

Tann fyrra uppstillingin – býtt á stovnsnummar – gevur eina meira rættvísandi mynd av miðaltølunum, og hon vísir fylgjandi:

| Árini 2006 til 2013 tús. kr. og % | Kostnaður | Innanhýsis lønir | Uttanhýsis ráðgevar | %-partur innanhýsis lønir | %-partur uttanhýsis lønir |
|---|---|---|---|---|---|
| Samlað fyri allar løgur | 1.288.419 | 30.979 | 165.505 | 2,4% | 12,8% |
| Miðal hvørt ár | 161.052 | 3.872 | 20.688 | 2,4% | 12,8% |

Av hesum sæst, at í meðal vórðu árini 2006-2013 brúktar 3,9 mió. kr. um árið í innanhýsis lønum og 20,7 mió. kr. til uttanhýsis ráðgeving til byggiverkætlanir, sum Landsverk stóð fyri, svarandi til ávikavist 2,4 og 12,8% av samlaðu íløgukostnaðunum.

Vert er í hesum sambandinum at hava í huga, at ráðgevaraparturin er munandi lægri, tá ið tað snýr seg um bygging av vegum samanborið við bygging av bygningum.

Umframt innanhýsis lønir, sum eru knýttar at einstøku verkætlanunum, kostar generelli raksturin av Byggi- og Bygningsumsitingini umleið 3 mió. kr. um árið.

**Tilmæli:**

Sum víst á frammanfyri, eru uppgávur, sum Landsverk sum byggiharri vegna landið skal taka sær av, og at tað kunnu vera uppgávur, til dømis at gera byggiskráir, forkanningar, fyrireiking og útbjóðingartilfar, ið tað ikki loysir seg at bjóða út. Tí má roknast við, at Landsverk altíð kemur at brúka nakað av innanhýsis lønum í sambandi við einstøku byggiverkætlanirnar.

- Arbeiðsbólkurin mælir til at halda fast í hesar mannagongdir, men at tað støðugt verður hildið eyga við, hvørt tað kann farast longur í sambandi við tað at bjóða verkætlanir, ráðgevara- og eftirlitsuppgávur og arbeiðstøkur út.

## *Umvæling og viðlíkahald av landsins bygningum*

Endamálið við bygningsviðlíkahaldi er at tryggja bygningsvirðið á almennum bygningum, og at tryggja virkseminum í bygningunum fullgóðar og vælvirkandi karmar. Uppgávurnar innan hetta virksemi eru:

- at staðfesta viðlíkahaldstørvin við at sýna bygningar
- at raðfesta viðlíkahaldið innanfyri játtan í samráði við brúkara
- um raðfestingin verður góðkend av avvarðandi aðalráði, í samráði við stovnin at fyrireika, seta í gongd, leiða og samskipa viðlíkahaldsarbeiðið, umframt at hava eftirlit við og fíggjarstýra viðlíkahaldsarbeiðinum

Praktiska mannagongdin – sí fylgiskjal N – er, at aðalráð og stovnar meta árliga um tørvin á umvælingum og viðlíkahaldi á teimum bygningum, ið tey varða av, og kunna síðani Landsverk um hetta.

Landsverk ger støðulýsingar av bygningum og metir eisini út frá ynskjum frá stovnum um neyðug átøk innan hesar fimm raðfestingar:

1) myndugleikakrøv

2) álvarslig brek og tørvur

3) brúksfunksjón

4) útsjónd

5) brúkaraynski

Verandi játtan til umvælingar og viðlíkahald er ikki nóg mikið til raðfestingar av 1 og 2 omanfyri. Tí verður samskift neyvt við ráðini, hvar raðfestingin ger størst nyttu. Fyri at stuðla undir, hvussu arbeiðið verður lagt til rættis, hevur Landsverk gjørt eitt skjal, sí fylgiskjal N, ið lýsir markamótið millum, hvat er fevnt av viðlíkahaldsjáttanini, og hvat stovnurin sjálvur skal taka sær av.

**Útveiting innan umvæling og viðlíkahald**

Staðfestingar, tørvsmetingar, raðfestingar og planlegging fer fram á Landsverki og í samráði við aðalráð og stovnar, meðan viðlíkahaldsarbeiðið uttan og lutvíst innan verður boðið út.

Tøl sambært fíggjarlógini og roknskapinum hjá Landsverki:

| Tøl í tús. kr. og í % | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|
| Umvæling, almennir bygningar (FL) | 14.936 | 24.631 | 26.964 | 27.269 |
| Verkætlanarleiðsla hjá Landsverki | 1.084 | 1.333 | 2.179 | 2.675 |
| Verkætlanarleiðsla hjá LV í % av útr. | 7,3% | 5,4% | 8,1% | 9,8% |

Sum talvan vísir, er parturin, sum verður gjørdur innanhýsis á Landsverki størri, sammett við tá ið tað snýr seg um løgur og hevur hug til at vaksa. Sum nevnt aðrastaðni í frágreiðingini, bókar Landsverk lønarútreiðslur til verkætlanarleiðslu út á verkætlanir eftir tímauppgerðum. Hetta verður gjørt í teimum førum, har ið Landsverk varðar av verkætlanum og hevur ræðisrættin á játtanum.

Neyðugt er at hava í huga, at Landsverk broytti uppgerðarhátt viðvíkjandi lønarútreiðslum frá og við 2012, soleiðis at lønarútreiðslurnar nú fevna um samlaðu útreiðslurnar til starvsfólkið, ið er sami uppgerðarháttur, sum privatar ráðgevarafyritøkur brúka. Møguleikin at Kappingareftirlitið eftirhyggur prísáseting á ráðgevaraveitingum hjá Landsverki kann verða umhugsaður.

Størsta orsøkin til, at lutfalsliga meira verður brúkt av Landsverki til innanhýsis lønir og verkætlanarleiðslu í sambandi við viðlíkahaldsarbeiði sammett við byggiverkætlanir, er helst at verkætlanirnar sum heild eru munandi smærri. Tí loysir tað seg ikki í øllum førum fíggjarliga eins væl at bjóða ráðgevaraarbeiði út, við tað at tað kostar í sjálvum sær í umsiting, útbjóðingartilfari og øðrum at fara undir eina útbjóðing.

## *Rammusáttmálar/ESCO*

Rakstur, viðlíkahald og umvælingar av almennum ognum er alsamt vaksandi og tyngir kostnaðin av almenna búskapinum sum heild.

Ein gongd leið, sum bæði hjálpir á samlaðu rakstrarstøðuna við at minka um orkunýtsluna, og somuleiðis kann vera við at lyfta bygningar landsins á eitt hægri stig, bæði tá ið umræður orkunýtslu, rakstrarkostnað, byggitøkniliga góðsku, inniluft og annað, og sum aftur er við til at økja um trivnaðin hjá brúkarum og starvsfólki, er at nýta ESCO-leistin. (ESCO er stytting av Energy Solution Company.)

ESCO-leisturin er eitt alment-privat samstarv, har ið tað privata felagið kann bjóða seg fram til at fremja orkusparandi loysnir í verki. Ein rammusáttmáli verður gjørdur við privatar fyritøkur, har ið fyritøkurnar átaka sær fígging, umbygging, viðlíkahald og rakstur av hesum í einum avtalaðum sáttmálatíðarskeiði.

Meginreglan í sambandi við ESCO er, at bygningar verða dagførdir, tá ið umræður orkunýtslu, og at bæði fígging, prosjektering og byggiarbeiði, sum verður sett í verk, verður goldið av orkusparingum innan eitt avtalað sáttmálatíðarskeið. ESCO-veitarin skal sostatt tryggja eina orkusparing í avtalaða tíðarskeiðinum.

Grundreglan er, at ESCO loysir seg best til eldri ótíðarhóskandi bygningar, og bygningar, sum eru í ringum standi.

Við ESCO-leistinum kann landið vera við til at menna vinnuna við avbjóðingum, sum vinnan ikki hevur havt møguleika at royna áður innan hetta økið. Vinnan fær møguleika at vera við til at ávirka og fremja loysnir í verki, ið skulu fáa bestu úrslitini.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at stórir møguleikar eru fyri framman í sambandi við ESCO-leistin, og at arbeitt eigur at verða víðari eftir hesum leisti. Enn er kortini ov tíðliga at gera endaligar niðurstøður um ESCO-leistin, og í hvønn mun tað finst váðafús fígging til hetta slag av íløgum í Føroyum.

Annar møguleiki er at gera rammusáttmálar við privatar fyritøkur um at átaka sær at viðlíkahalda bygningar í ávíst áramál í senn og sambært nærri ásettum treytum.

**Tilmæli:**

Av samskiftinum, sum arbeiðsbólkurin hevur havt við aðalráð og fleiri undirliggjandi stovnar, var greitt, at samlaða játtanin til umvælingar og viðlíkahald av bygningum landsins er ov tepur sammett við tørvin. Hetta hevur við sær, at landsins bygningar, sum frálíður, fara illa av vantandi viðlíkahaldi og umvælingum. Tí er tað í longdini kostnaðarmikið at játta ov lítið av peningi til viðlíkahald av landsins bygningum.

Tepra játtanin til viðlíkahald ger tað neyðugt hjá Landsverki at raðfesta neyvt alt eftir tørvinum á viðlíkahaldi. Hetta hevur sjálvsagt við sær eina ávísa ónøgd millum aðalráð og stovnar, tí mestsum eingin stovnur ella ráð fær játtað alt til teirra metta tørv á viðlíkahaldi og umvælingum.

Víst varð frammanfyri á møguleikan, at tað sum frálíður verður kravd leiga frá ráðum og stovnum fyri at vera inni í skrivstovubygningum, sum landið eigur, og omanfyri varð víst á ESCO-leistin. Bæði hesi kunnu vera við til at bøta um møguleikan at viðlíkahalda bygningar landsins.

Betri viðlíkahald av landsins bygningum hevði eisini verið við til at stimbra handverkaravinnuna í Føroyum, millum annað smáar fyritøkur, sum eru førar fyri at gera smærri umvælingar og viðlíkahaldsarbeiði. Mett verður, at viðlíkahald av almennum bygningum er ein góður og effektivur háttur at stimbra búskapin og at skapa nýggj arbeiðspláss í Føroyum, eru politisk ynski og vilji til tess.

- Mælt verður til at leggja seg eftir at fremja skipanir, sum hava við sær betri viðlíkahald av landsins bygningum, harundir nýtslu av vanligum rammusáttmálum, ESCO og at ráð og stovnar, sum frálíður, fara at gjalda leigu fyri skrivstovuhøli, sum landið eigur.

### *Landsvegahald*

Uppgávurnar í landsvegahaldinum eru í høvuðsheitinum:

- Asfaltumvælingar
- Reinhald og burturbeining av lutum á vegunum
- Ábøtur á vandamikil viðurskifti
- Gerð av alternativum farleiðum
- Strípíng, skelting, prestar og bilverjur
- Mekaniskar og elektriskar innleggingar

- Vetrarhald – harundir at salta vegir og at burturbeina kava

Virksemið innan landsvegahaldið er ymiskt alt eftir árstíðini, og harumframt kann vetrarhaldið eisini vera ymiskt frá ári til ár. Sama manning verður fyri ein part brúkt til hetta virksemi, meðan nakað av útgerðini bert verður brúkt til vetrarhaldið. Samlaða nýtslan árini 2010-2013 hevur verið um einar 50 mió. kr., og av hesum er longu útveitt fyri góðar 20 mió. kr., sí fylgiskjøl A og M.

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt møguleikan at útveita meira av landsvegahaldinum. Sjónarmiðið hjá Landsverki er, at trupult er at útveita meira á hesum øki, tí manning og útgerð verða brúkt alt eftir, hvar á stendur, og neyðugt er at hava nógvar uppgávur at fremja, skal arbeiðsmegin og amboðini brúkast so rationelt sum til ber. Eisini førir Landsverk fram, at tilbúgvingin hjá Landsverki hevur til uppgávu at tryggja samferðslukervið, og at Landsverk hevur um hendi operativa partin av basing av oljudálking á sjónum og er eitt slag av sivilverju.

Vinnuumboðið førir hinvegin fram, at tað í høvuðsheitinum snýr seg um at seta uppgávurnar og økini í landinum saman, soleiðis at til ber at bjóða uppá uppgávurnar, tí vinnan kennir hesar uppgávur og vil útvega sær fólk og útgerð alt eftir, hvat uppgávurnar snúgva seg um.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað kann vera vert at royna at bjóða landsvegahaldið í ávísum økjum í landinum út, meðan støða verður tikin til, hvussu farast skal víðari fram. Landsvegahaldið í viðkomandi øki má vera soleiðis samansett – saman við øðrum møguligum uppgávum – at tað ber til at nýta arbeiðsmegi og útgerð so skynsamt, sum til ber. Tá ið fleiri útbjóðingar verða fyrireikaðar eigur harumframt at verða havt í huga, at útbjóðingarøkini verða skynsamt sett saman. Harumframt eigur at verða hugsað um, at monopol- og duopolstøður kunnu taka seg upp.

Landsverk mælir til, at virksemið sum heild í Sandoynni verður bjóðað út sum ein royndarverkætlan, ið síðani verður eftirmett. Virksemið snýr seg um:

- Rakstur og viðlíkahald av landsvegunum
- Kavarudding
- Hald av ferjurampuni í Skopun
- Framleiðslu og sølu av gróti á Sandi

**Tilmæli:**

- Eru politisk ynski um at royna at útveita meira av virkseminum, er ein møguleiki at gera, sum skotið verður upp av Landsverki, at alt virksemið hjá Landsverki á Sandoynni verður útveitt sum eitt fyrsta stig í eini royndarverkætlan.
- Vera góðar royndir av hesum, ber til at seta saman onnur hóskandi øki og virksemi og bjóða hesi út.

### *Havnir*

Landsverk røkir tær fýra landshavnirnar í Føroyum – Gomlurætt, Syðradalur, Oyrargjógv og Krambatangi – umframt ferjurampurnar í Klaksvík og í Skopun. Samlaða nýtslan árini 2010-2013 hevur verið einar 5-6 mió. kr., og av hesum hevur verið útveitt fyri einar 2,5 til 3,5 mió. kr., sí fylgiskjøl A og M.

Sum er, verður meginparturin av at halda havnir útveittur. Eru politisk ynski um at royna at útveita meira, hevði borið til at veitt tann partin út saman við útveiting av landsvegahaldinum fyri betur at kunna gagnnýta arbeiðsmegi, maskinur og amboð innan tey ymisku arbeiðini, sum verða boðin út.

**Tilmæli:**

- Mælt verður til, at møgulig meiri útveiting innan havnir verður samskipað við útveiting innan landsvegahaldið.

## *Flogferðsla*

Landsverk hevur raksturin og viðlíkahaldið av 10 av teimum 11 tyrlupallunum í landinum, meðan Landssjúkrahúsið hevur ábyrgdina av tí eina. Landsverk hevur umsjónarfólk úti um landið, sum eru knýtt at hvørjum tyrlupalli sær. Umframt uppgávur fyri Landsverk taka hesi fólk sær av avgreiðsluni av ferðaseðlum, manifestum, farmi og líknandi fyri Atlantic Airways, sum rekur sjálva tyrluflúgvingina.

Nýtslan á hesum øki hevur árini 2010 til 2013 verið millum eina og tvær mió. kr. árliga.

Við tað at samanfall tykist vera millum hetta virksemið og virksemið hjá Vága Floghavn, kann vera vert at kanna, hvørjir fyrimunir eru av at leggja raksturin av tyrlupallunum til Vága Floghavn at umsita.

**Tilmæli:**

- Arbeiðsbólkurin mælir til at kanna, hvørjir fyrimunir vera av at leggja raksturin av tyrlupallunum til Vága Floghavn at umsita.

## *Inntøkufíggjaða virksemið hjá Landsverki*

Inntøkufíggjaða virksemið hjá Landsverki er í høvuðsheitum bitumen-goymslan, skervverkið, asfaltverkið og uppgávur, sum Landsverk vinnur í kapping við privatu vinnuna. Aftrat hesum eru akfarsdeildin og saltgoymslan, sum leiga akfør og maskinur út til deildir innanhýsis hjá Landsverki og selja salt innanhýsis á Landsverki til vetrarhaldið. Deildirnar á Landsverki rinda leigu fyri maskinur, sum tær brúka til verkætlanir. Vetrarhaldið keypir salt innanhýsis á Landsverki frá saltgoymsluni.

Bruttosølan innan inntøkufíggjaða virksemið á Landsverki hevur síðstu árini verið 60-80 mió. kr. árliga. Bókhaldið hjá Landsverki er sundurskilt, soleiðis at skilnaður er millum inntøkufíggjað virksemi og restina av virkseminum. Harafturat er skilnaður innan inntøkufíggjaða virksemið millum bitumen-goymsluna, skervverkið, asfaltverkið og aðrar uppgávur.

Sambært játtanarskipan landsins kunnu stovnar hava inntøkufíggjað virksemi, um hesar treytir eru loknar:

- Viðskiftafólkini hava ikki nakra skyldu at taka móti vøruni ella tænastuni,
- Stovnurin skal kunna skilja virksemið, sum ætlanin er at hava sum inntøkufíggjað virksemi, frá øðrum uppgávum hjá stovninum, og
- Tað inntøkufíggjaða virksemið skal verða sprottið náttúrliga úr vanliga virksemi stovnsins.

Í játtanarskipan landsins, sum Landsverk virkar undir og hevur skyldu at fylgja, eru fleiri ásetingar um, hvussu almennir stovnar, sum hava inntøkufíggjað virksemi, skulu bera seg at roknskaparliga og um hvussu prísir skulu ásetast. Til dømis áseta greinarnar 21 til 23 í Kunngerð nr. 84 frá 7. juni 2011 um rakstrarjáttan:

> **§ 21.** Hevur inntøkufíggjað virksemi einkarrætt ella støðan líkist einkarrætti, so kann prísurin fyri vøruna ella tænastuna ikki vera hægri enn miðal langtíðarkostnaðurin.
>
> **§ 22.** Inntøkufíggjað virksemi verður sett upp á serskildari undirkontu undir rakstrarjáttan.
>
> **§ 23.** Inntøkufíggjað virksemi skal í størst møguligan mun javnviga ella geva yvirskot.
> *Stk. 2.* Yvirskot kann verða nýtt til vanliga virksemið, og undirskot verður fíggjað av vanliga virkseminum.

Í grein 20 í somu kunngerð eru neyvari ásetingar um prísáseting. Endamálið við ásetingunum omanfyri er bæði at tryggja gjøgnumskygni í virkseminum og at tryggja, at almennir stovnar ikki avlaga kappingina á marknaðum, har ið kapping er millum fleiri fyritøkur. Landsverk fylgir øllum ásetingum í játtanarskipan landsins um prísáseting og roknskaparligar ásetingar, umframt at Landsverk roknar sær ein vinning eftir rakstrar- og fíggjarkostnað, íroknað avskrivingar og rentuútreiðslur.

**Grót- og skervframleiðsla**

Landsverk hevur fleiri grótbrot, har ið grót og skervur verða framleidd. Somuleiðis innflytir stovnurin eina røð av skervsløgum og sandi. Grótbrot liggja í Hundsarabotni, á Hústoft, oman fyri Porkeri og á Sandi. Størsta brotið er í Hundsarabotni.

Sølan av skervi og gróti hevur árini 2010-2013 verið ávikavist 15,9, 16,9, 24,1 og 23,7 mió. kr. íroknað tað, sum Landsverk sjálvt keypir, sí fylgiskjøl A og M.

Tað er ikki nøkur sjálvsøgd uppgáva hjá landinum at framleiða grót og skerv, men hetta virksemið stavar helst frá, at landið fyrr hevur havt ein alt dominerandi leiklut, tá ið umræður størri anleggsarbeiði. Grót- og skervframleiðsla hevur verið ein avleiðing av hesum.

**Asfaltframleiðsla**

Landsverk hevur í umleið 40 ár framleitt asfalt og lagt asfalt til nógv ymisk endamál. Framleiðarar av asfalti eru í dag Landsverk og eitt privat felag. Innan álegging av asfalti eru í høvuðsheitum Landsverk og tvey privat feløg í landinum. Í 2013 var aktiviteturin so nøkulunda javnt býttur millum allar tríggjar partarnar.

Asfaltverkið í Hundsarabotni framleiðir asfalt til ymisk endamál, til dømis til vegir, havnir, ídnaðarøki, gongubreytir og tún. Asfaltið verður framleitt eftir góðkendum uppskriftum, og allir liðir í framleiðsluni verða eftirkannaðir sambært altjóða krøvum.

Sølan av asfalti hevur árini 2010-2013 verið ávikavist 16,0, 14,8, 18,2 og 14,7 mió. kr. íroknað tað, sum Landsverk sjálvt keypir, sí fylgiskjøl A og M.

**Bitumen-goymslan**

Bitumen er oljuúrdráttur, sum verður nýttur í framleiðsluni av asfalti. Kostnaðurin av bitumen er vanliga 40-50% av samlaða kostnaðinum í asfaltframleiðslu. Broytingarnar í prísinum á bitumen hava tí stóran týdning fyri asfaltframleiðarar.

Bara ein bitumen-goymsla er í landinum, sum Landsverk rekur. Tað er ikki sannlíkt, at onnur feløg koma inn á henda marknaðin, tí tað lønar seg ikki at hava fleiri enn ta einu goymsluna í landinum. Landsverk flytur inn bitumen til landið 3-4 ferðir um árið.

Landsverk ásetir prísin á bitumen við at leggja allan kostnaðin av at reka bitumen-goymsluna afturat keypsprísinum á bitumen. Síðani verður vinningur lagdur aftrat, soleiðis at goymslan ikki verður rikin við halli. Síðani rindar goymslan við ársenda møguligan vinning lutfalsliga til sínar kundar. Henda loysnin er góðkend av Kappingareftirlitinum og varð upprunaliga sett í verk í samráði millum Kappingareftirlitið og Landsverk fyri at tryggja, at prísásetingin samsvarar við ásetingar í játtanarskipan landsins og við galdandi kappingarlóggávu.

Íroknað kostnaðin av at reka bitumen-goymsluna er keyp av bitumen, lønir, olja, el, trygging, maskinleiga, umvælingar, flutningur og annar kostnaður. Avskrivingar og kapitalkostnaður verða eisini roknað í kostnaðin av at reka goymsluna. Kostnaðurin av at keypa bitumen er umleið 80% av samlaða kostnaðinum av at reka goymsluna.

Bitumen-goymslan hevur havt egnan roknskap síðani 2005, og roknskapurin verður grannskoðaður av uttanhýsis grannskoðara árliga. Kappingareftirlitið hevur eisini eftirhugt og kannað bitumen-goymsluna hjá Landsverki, millum annað prísáseting, og um Landsverk selur bitumen bíligari til innanhýsis nýtslu á Landsverki enn til privat feløg, sum keypa bitumen frá Landsverki.

Niðurstøðan var, at Landsverk ger ikki mun á egnum asfaltverki og øðrum feløgum. Ein onnur niðurstøða var, at Landsverk hevur gjørt eitt munandi arbeiði til tess at fáa gott gjøgnumskygni í goymsluna og í inntøkufíggjaða virksemið sum heild.

**Arbeiði fyri onnur og uppgávur vunnar í kapping**

Restin av inntøkufíggjaða virkseminum er

- innanhýsis útleigan og viðlíkahald av maskinamboðum hjá Landsverki
- innkeyp og goymslustýring av eykalutum, rávørum til vegahaldið, harundir salt
- entreprenørvirksemi, fyri tað mesta asfaltering, fresing og tunnilsarbeiði

Umsetningurin hevur árini 2010-2013 verið ávikavist 37,5, 38,2, 15,2 og 16,7 mió. kr. íroknað tað, sum Landsverk sjálvt keypir, sí fylgiskjøl A og M.

Ein munandi partur av hesum virkseminum eru uttanhýsis entreprenøruppgávur fyri onnur og entreprenøruppgávur fyri landið, sum Landsverk hevur vunnið í kapping við privatar veitarar. Tað er nevniliga so, at Landsverk viðhvørt bjóðar uppá entreprenøruppgávur hjá landinum, eru útlit til, at kappingin verður ov lítil.

**Útveiting av inntøkufíggjaða virkseminum hjá Landsverki**

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, hvørt landið átti at tikið seg burtur úr inntøkufíggjaðum virksemi sum heild, ella at landið bert skal leggja seg eftir ikki at vera í vegin fyri, at hetta virksemið verður yvirtikið av privatum feløgum.

Tá ið tað snýr seg um bitumen-goymsluna hjá Landsverki, verður ikki mett, at tað verður nakar fyrimunur fyri landið ella samfelagið sum heild at selja ella einskilja bitumen-goymsluna. Verður goymslan seld, fær eitt privat felag monopolstøðu á hesum marknaði. Kappingareftirlitið mælir frá, at hetta verður gjørt, tí størri vandi er tá fyri, at felagið fer at misnýta hesa marknaðarstøðu og at prísir tá fara at hækka, sum frálíður.

Hjá privatum feløgum er lættari at misnýta eina monopolstøðu, av tí at tey eru ikki fevnd av játtanarskipan landsins, innlitslóggávu og verða ikki grannskoðað av Landsgrannskoðanini. Gjøgnumskygnið er tí verri í einum privatum felagi, og torførari er at fáa greiðu á prísáseting í einum privatum felagi sammett við á einum almennum stovni, sum virkar undir játtanarskipan landsins og verður grannskoðaður av Landsgrannskoðanini.

Eru politisk ynski um, at landið tekur seg burtur úr grót- og skervframleiðsluni, asfaltframleiðsluni og at gera arbeiði fyri onnur ella at bjóða uppá arbeiði í kapping við privatu vinnuna, ella at landið ikki leggur seg í vegin fyri, at hetta verður yvirtikið av privatum fyritøkum, kann hetta verða gjørt við, at landið avger at taka seg burtur úr hesum virkseminum og selur útgerðina, ella at landið staðfestir verandi skipan hjá Landsverki á hesum øki. Hetta merkir, at Landsverk fylgir øllum ásetingum í játtanarskipan landsins um prísáseting og roknskaparligar ásetingar, umframt at Landsverk roknar sær ein vinning eftir rakstrar- og fíggjarkostnað, íroknað avskrivingar og rentuútreiðslur.

Arbeiðsbólkurin heldur eisini, at tað harumframt er skilagott at royna fyrra møguleikan, at landið miðvíst roynir at taka seg burtur úr onkrum av inntøkufíggjaða virkseminum, og meirilutin í arbeiðsbólkinum tekur undir við uppskotinum hjá Landsverki sum eina royndarætlan at veita alt virksemið í grótbrotinum í Porkeri út. Maskinur og amboð kunnu leigast út ella seljast til tann, sum yvirtekur virksemið.

Greitt er, at tekur Landsverk seg úr inntøkufíggjaða virkseminum sum heild, má ansast eftir, hvørt privatar monopol- og duopolstøður kunnu taka seg upp.

**Tilmæli:**

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Fíggjarmálaráðið staðfestir eina líknandi prísásetingarskipan sum umrøtt omanfyri fyri grót- og skervframleiðslu, asfaltframleiðslu og arbeiði, ið verða framd fyri onnur, og tá ið bjóðað verður uppá arbeiði í kapping við privatu vinnuna. Fíggjarmálaráðið eigur regluliga at eftirkanna, hvussu hetta virksemið hjá Landsverki verður framt, og møguleiki er eisini at fáa Kappingarfetirlitið at meta um hetta virksemið hjá Landsverki, verður hildið, at orsøk er til tess.

- Mælt verður til, at bitumen-goymslan framhaldandi verður rikin av Landsverki á sama hátt sum í dag.
- Mælt verður til, at Fíggjarmálaráðið staðfestir verandi prísásetingarskipan fyri grót- og skervframleiðslu, asfaltframleiðslu og arbeiði, ið verða framd fyri onnur, og tá ið bjóðað verður uppá arbeiði í kapping við privatu vinnuna.

- Í royndini miðvíst at taka seg burtur úr inntøkufíggjaðum virksemi verður mælt til sum eina royndarætlan at veita alt virksemið í grótbrotinum í Porkeri út.

***Samlað potentiali fyri útveiting***

Verður roknað við, at tað ikki er stórvegis at útveita meira enn longu verður gjørt, tá ið tað snýr seg um bygging og viðlíkahald, so hevði maksimala potentialið fyri útveiting, varð alt bjóðað út, sum enn ikki er bjóðað út innan

- Landsvegahald
- Havnir
- Flogferðslu
- Grót- og skervframleiðslu
- Asfaltframleiðslu
- Arbeiði fyri onnur og vunnar uppgávur

fyri árini 2010-2013 ávikavist verið 100,6, 98,6, 88,3 og 86,6 mió. kr., sí fylgiskjøl A og M. Frá hesum tølum skal dragast myndugleikauppgávur og álagdar uppgávur hjá Landsverki innan landsvegahald, havnir, flogferðslu og aling.

Hetta eru ikki tøl, sum kunnu røkkast beinanvegin, men verður farið fram sum skotið upp omanfyri, varð helst ein munandi partur av almennum virksemi fluttur í privata geiran.

## Mannagongdir í sambandi við útbjóðing

Í fylgiskjali 3 til hjálagda skjal A "*Landsverk – Lýsing av virksemi og uppgávum hjá stovninum*" verður greitt frá vegleiðingini hjá Landsverki í sambandi við útbjóðingar.

Her verður millum annað lýst:

- Útbjóðingarpolitikkur
- Gildisøki
- Endamál
- Tilgongd
- Hví bjóðað verður út
- Hvat verður bjóðað út
- Hvussu bjóðað verður út
- Tær einstøku uppgávurnar, ið verða bjóðaðar út
- Metingarfrymil

Arbeiðsbólkurin heldur, at mannagongdirnar, soleiðis sum tær eru lýstar, sum heild eru skilagóðar bæði sæð frá einum byggiharra- og arbeiðstakarasjónarmiði.

Landsverk skipar fyri útbjóðing av bæði ráðgevaraveitingum og arbeiðstakaraveitingum, og brúktir verða ymiskir útbjóðingarhættir, alt eftir, hvat verður mett at hóska seg frægast til ítøkiligu uppgávuna. Mest brúktu útbjóðingarhættirnir hjá Landsverki eru almenn lisitasjón, innboðin lisitasjón, við ella uttan undangóðkenning, og undirhondsboð. Í ávísum førum hevur Landsverk eisini brúkt øvugta lisitasjón, og tá talan er um ráðgeving, er eisini boðið út í arkitektakappingum.

Burtursæð frá sjálvum byggiharraleiklutinum verða sambært Landsverki sum meginregla allar veitingar í einari byggiverkætlan bodnar út, eins og lýst er aðrastaðni í frágreiðingini. Undantøk

verða tó gjørd frá hesari meginreglu. Til dømis kann hetta koma fyri, tá ið uppgávan er ov lítil til, at tað fíggjarliga loysir seg at skipa fyri útboði, ella um talan er um so torgreidd umbyggingararbeiði, at tað letur seg illa gera at greina veitingina so neyvt, at hon kann bjóðast út.

Ymiskt er, um Landsverk velur at bjóða veitingar út í einum, ella um hesar verða býttar sundur í smærri uppgávur. Til dømis kunnu prosjektering og aðrar ráðgevarauppgávur verða bodnar út saman sum heildarráðgeving ella hvør sær sum deild ráðgeving. Somuleiðis kunnu arbeiðstøkurnar til dømis verða bodnar út í einari høvuðsarbeiðstøku ella í fleiri smærri fakarbeiðstøkum. Hvønn av hesum hættum Landsverk velur at bjóða út eftir, verður avgjørt við støði í einstøku uppgávuni ella einstaka arbeiðinum.

Partur av arbeiðssetninginum er at meta um, hvørt tað er neyðugt at gera skipanir, sum tryggja, at smærri arbeiðstakarar fáa fleiri møguleikar at bjóða uppá uppgávur. Hesin møguleiki kann til dømis vera avmarkaður av, at arbeiði í almennari lisitasjón eru ov stór til smáar arbeiðstakarar at bjóða uppá, ella at arbeiði verða útboðin við undirhondsboð ella innbodnari lisitasjón, har ið bert eitt avmarkað tal av arbeiðstakarum fær høvi at luttaka.

Í hesum sambandi skal havast í huga, at Landsverk sjálvandi leggur dent á, at góðskan er í hásæti, samstundis sum verkætlanir verða framdar innan ásettar tíðar- og játtanarkarmar. Stovnurin leggur eisini dent á at brúka skipanir og samstarvsformar, sum eru kend úr grannalondum. Hetta eisini fyri at halda ábyrgdina millum partarnar eftir einum skipaðum leisti.

Skal Landsverk tillaga verkætlanir soleiðis, at fleiri smærri veitarar kunnu bjóða, kann hugsast, at tað fær ávirkan á byggitíðina og á innanhýsis umsitingina hjá Landsverki og møguliga eisini á prísir. Smærri veitarar eru í sjálvum sær veikari til at loysa byggiverkætlanir. Hetta millum annað orsakað av fløskuhálsum viðvíkjandi útgerð, kunnleika, manning og organisasjón. Tá ið verkætlanir verða býttar sundur, er eisini givið, at avbjóðingin við at stýra ábyrgdarbýtinum verður størri.

Samstundis sum spurt verður, hvørt tað er neyðugt at gera skipanir, sum tryggja, at smærri arbeiðstakarar fáa fleiri møguleikar at bjóða uppá uppgávur, eigur tí eisini at verða spurt, hvørja ávirkan hetta kann hava á verkætlanirnar.

Eru ynski um at stimbra størri luttøku frá smærri arbeiðstakarum, eru ymiskir hættir at gera hetta. Til dømis arbeiðir Landsverk við einari ítøkiligari ætlan, har ið royndir verða gjørdar við at skilja arbeiðstøkur og tilfarsveitingar sundur í útbjóðingini. Hetta soleiðis, at til ber at bjóða uppá arbeiðstøku fyri seg og tilfarsveiting fyri seg.

Í dag er vanliga mannagongdin, at bjóðað verður uppá byggiarbeiði íroknað tilfar, og í nógvum førum er talan um, at tilfarsparturin er ein stórur partur av samlaðu upphæddini. Hetta kann forða fyri, at smærri byggifyritøkur kunnu bjóða seg fram, millum annað tí at trygd skal veitast fyri samlaða arbeiðinum, sum bjóðað verður uppá, og tí at fyritøkurnar eisini skulu bera stórar útreiðslur í sambandi við innkeypið.

Um byggiarbeiði verða boðin út, har ið byggifyritøkur ikki skulu veita tilfar, men bara sjálvt arbeiðið, verður væntandi størri møguleiki hjá smærri byggifyritøkum at bjóða seg fram. Samstundis kann hugsast, at størri kapping tá eisini verður um veiting av byggitilfarinum, ið Landsverk sjálvt keypir inn. Roknast kann tó við, at ein tílíkur leistur fer at krevja meira av byggiharranum, tí tørvurin á neyvum eftirliti og neyvari stýring fer helst at økjast, um veitingin av arbeiði og tilfari verður skild sundur.

Meirilutin í arbeiðsbólkinum tekur undir við at royna útboð eftir hesum leisti, og at tað síðani verður mett um, hvørt hetta svarar seg fíggjarliga, og um hetta kann vera við til at menna og skapa størri kapping, har ið smærri byggifyritøkur eisini kunnu luttaka. Vinnuumboðið í bólkinum tekur tó ikki undir við hesum, millum annað við tí grundgeving at avbjóðingin at stýra ábyrgdarbýtinum og váðanum tá verður munandi størri.

Í sambandi við at tryggja smærri arbeiðstakarum betri møguleikar at bjóða uppá uppgávur, hevur vinnuumboðið víst á, at umframt at skipa sáttmálar í fakarbeiðstøkur, ber eisini til at skipa verkætlanir í smærri arbeiðspartar. Á fakmáli verður hetta rópt "WBS" ella "Work Breakdown Structure". Hetta snýr seg í stuttum um at býta byggimál upp í hóskandi byggistig. Havast skal tó í huga, at ein tílíkur framferðarháttur sannlíkt eisini merkir, at byggiharrin skal brúka størri orku til fyrireikandi arbeiði.

Til tess at menna smærri fyritøkur soleiðis at hesar við tíðini styrkjast og gerast førar fyri at átaka sær størri og torgreiddari uppgávur ber til í samráði við vinnuna at umhugsa skipan, har ið fyritøkur verða bólkaðar og mettar eftir ymiskum krøvum, ið siga nakað um, í hvønn mun fyritøkurnar eru førar fyri at loysa uppgávur við ávísari støðd. Nøkur av hesum krøvum kundu til dømis verið byggitøkniligir førleikar, fíggjarligir førleikar, organisatoriskir førleikar, og førleikar viðvíkjandi manning, amboðum og útgerð. Til ber í hesum sambandi eisini at seta krøv um ávíst tal av lærlingum og harvið at eggja fyritøkum at útbúgva sveinar.

Ein fyritøka í ávísum metingarbólki kundi eftir hesum leisti havt góðkenning til at bjóða uppá uppgávur, sum høvdu eitt vavi, ið hóskaði til førleikar og royndir hjá fyritøkum í hesum bólki. Tá ið fyritøkur í eina tíð hava ment seg og fingið royndir í ávísum bólki, kunnu tær vera skikkaðar at fáa góðkenning til ein hægri bólk.[1]

Umframt at vísa fyritøkum á eina stigvísa leið at menna seg eftir, tryggjar ein tílík skipan eisini, at fyritøkur, sum bjóða upp á stórar og torgreiddar uppgávur, sannlíkt hava førleika, royndir og fíggjarliga orku at loysa hesar uppgávur til fulnar. Um farið verður undir at tilevna eina góðkenningarskipan, eigur hetta sjálvandi at gerast við tí í huga, at ein tílík skipan eisini eigur at stimbra heldur enn at avmarka kapping.

**Tilmæli:**

- Mælt verður til, at Landsverk í høvuðsheitum heldur fram við at bjóða út sum higartil. Í hesum tilmæli liggur eisini, at Landsverk støðugt eftirmetir royndir við útbjóðingum og leggur hesar til rættis, soleiðis at sum mest fæst burturúr fyri byggiánara samanlagt.
- Mælt verður til at gera royndir við at skilja útboð av arbeiðstøku og tilfarsveiting sundur og somuleiðis at gera royndir við at skipa verkætlanir í smærri arbeiðspartar (WBS).
- Mælt verður til at umhugsa og kanna møguleikar fyri at gera eina skipan, sum í einum avmarkaðum tíðarskeiði gevur fyritøkum góðkenning til at bjóða uppá veitingar í ávísum bólkum, ið hava hóskandi samsvar við førleikar og royndir hjá fyritøkunum.
- Eru ynski ella ætlanir um prinsipiellar broytingar í útbjóðingartilgongdum, verður mælt til, at hesar verða umrøddar millum vinnuna og Byggiharrasamtakið, ið umframt Landsverk telur aðrar stórar byggiharrar.

[1] Víst kann verða á, at nakrar føroyskar fyritøkur hava góðkenning úr Noregi (Sentral Godkjenning) frá Direktoratet for Byggekvalitet, ið gevur teimum møguleika at bjóða uppá ávísar arbeiðstøkur í Noregi.

Fylgiskjal A

# Landsverk

*“Lýsing av virksemi og uppgávum hjá stovninum.”*





LANDSVERK
*byggir land*

30.04.2015

# Innihaldsyvirlit:


**1.0. Inngangur** **3**

**2.0. Byggideildin** **4**
2.1. Yvirskipaðu uppgávurnar 4
2.2. Bygningsviðlíkahald 5
2.2.1. Langtíðar raðfestingar 5
2.3. Leigumál og keyp 5
2.4. Húsaskoðan 6
2.5. Rakstur av landsins ognum 6
2.6. ESCO 6
2.7. Ný- og umbygging 6
2.8. Arkitekturpolitikkur 7
2.9. Bygningskunngerðin 7
2.10. Vegleiðing 8

**3.0. Deildin fyri Infrakervi** **9**
3.1. Kjarnuuppgávurnar 9
3.2. Ferðsluplanlegging 10
3.3. Samferðsluplanlegging 10
3.4. Ferðsluhagtøl 10
3.5. Ferðslutrygdartiltøk 11
3.6. Basing av oljudálking á sjónum 11
3.7. ISPS tilbúgving í havnum 11
3.8. Uppmáting og avseting á landi 11
3.9. Sjóuppmátingar 12
3.10. Aldu- og streymmátingar 12
3.11. Vatnstøðumátingar 12
3.12. Tilbúgving 12
3.13. Havnir, lendingar og brimgarðar 13
3.14. Tyrlupallar 13
3.15. Vitar og siglingarleiðir 13
3.16. Rakstur og viðlíkahald av landsvegakervinum 14
3.17. Vetrarhald á landsvegunum 14
3.18. Fíggjarviðurskifti hjá haldinum 14

**4.0. Framleiðsludeildin** **18**
4.1. Uppgávur Maskinmiðstøðin/Goymslur og LV smiðjur 18
4.2. Grót, skerv og asfaltframleiðsla 19
4.3. Royndarstova 20
4.4. Góðskustýring innan asfaltútlegging. Skráseting av umstøðum fyri útlegging 21
4.5. Góðskustýring - Eftirmeting av fresing 22
4.6. Uppgávur tunnilsliðið 22
4.7. Asfaltframleiðsla 23

**5.0. Prísásetingar** **24**
5.1. Prísáseting av ráðgeving og tímaløntum arbeiðsfólki 24
5.2. Prísútrokningar fyri bitumen, skerv og asfalt 24
5.2.1. Bitumengoymslan í Hósvík. Prísútrokningarháttur 25
5.3. Skervverkini. 26
5.4. Asfaltverkið - Hundsarabotnur 28
5.5. Verkætlanir: Lønarútreiðslur innanhýsis/uttanhýsis 30

**Fylgiskjøl** **34**

# 1.0. Inngangur



Landsverk varð stovnað í 1948 undir heitinum Landsverkfrøðingurin. Landsverk hevur frá byrjan fyrisitið byggitekniskar uppgávur í breiðastu merking fyri land og kommunur og er í dag stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Í byrjanini var uppgávan hjá Landsverki í høvuðsheitum at reka og útbyggja samferðslukervið, meðan stovnurin í dag tekur sær av einum størri og fjølbroyttari ábyrgdarøki. Stovnurin hevur havt alstóran týdning fyri føroyska samfelagið, og hevur virksemið hjá stovninum verið ein fortreyt fyri tí menning, sum øllum samfelagnum hevur verið fyri fram ímóti tí nýmótans samfelagi, vit kenna í dag.

Við umleið 150 starvsfólkum - umroknað til umleið 125 fulltíðarstørv - telist Landsverk millum størstu arbeiðspláss í landinum, hóast talið á starvsfólkum er nógv skert seinnu árini.

Í endanum av 2014 settu landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og landsstýrið fram ynski um at fáa lýst og mett um virksemið hjá Landsverki í dag, og við støði í eini slíkari greining av stovninum gera uppskot um møguligar broytingar og betringar á Landsverki.

Til at fremja hetta arbeiðið er ein arbeiðsbólkur settur, mannaður við fólki við kunnleika til byggi- og ráðgevingarvinnuna, almenna fyrisiting og játtanarskipanina og búskap. Ætlanin er, at arbeiðsbólkurin verður liðugur við hetta greiningararbeiðið 1. apríl 2015.

Leiðslan á Landsverki vil við hesi frágreiðing lýsa kjarnuvirksemi og uppgávur á stovninum, soleiðis at arbeiðsbólkurin fær betri innlit í hesi viðurskiftir og soleiðis betri grundarlag at arbeiða útfrá.

Fyrst i frágreiðingini er ein lýsing av virkseminum og høvuðsuppgávunum á ávikavist Byggideildini, deildini fyri Infrakervi og Framleiðsludeildini. Síðani verður prísásetingin á Landsverki gjøgnumgingin, og at enda í frágreiðingini eru fylgiskjøl, har lesarin fær yvirlit yvir verkætlanartilgongdina á Landsverki, samlaðu kjarnuuppgávurnar umframt týdningarmikil samstørv og sambond, sum stovnurin hevur her heima og uttanlands.

Hendan frágreiðing er sostatt eitt íkast frá Landsverki til arbeiðið at gera eitt greiningararbeiði av øllum virkseminum hjá Landsverki.

*Ewald Kjølbro, stjóri*

# 2.0. Byggideildin

Høvuðsuppgávan hjá Byggideildini er at ráðgeva, planleggja, kravfesta, góðkenna og viðlíkahalda almennar bygningar. Deildin er skipað í 3 eindir: Bygging og Nýgerð, Bygningsviðlíkahald og Byggirák, og eru samanlagt 19 starvsfólk knýtt at Byggideildini.

Tað eru longu fleiri ár síðani, at Landsverk fekk hetta málsøkið at umsita. Orsøkina til, at málsøkið kom undir Landsverk at umsita, finnur tú millum annað soleiðis orðaða í einum uppriti til landsstýrisfund í 2006:

“Ynski er at skipa og menna eina byggi- og bygningaumsiting, soleiðis at henda hevur eitt ***heildaryvirlit*** yvir hølisviðurskifti hjá tí almenna og ***mentan førleika*** at gera faklig tilmæli, raðfesting og kravfesting um viðlíkahald, keyp og sølu av ognum, leigumál og tilmæli um landsins hølistørv. Ynski er eisini, at byggi- og bygningaumsiting verður byggiharri fyri stjórnarráðini.

Meiriluti var fyri hesum uppskoti, tí staðfest var, at tað var ein trupulleiki, at tann myndugleiki sum skuldi taka avgerð um hølisviðurskifti í síni heild, ikki hevði ta atgongd til fakliga ráðgeving, sum ynskiligt var. Hetta var galdandi, bæði tá tosað varð um at flyta almennan stovn, at leggja saman stovnar, at leiga hølir, at viðlíkahalda hølir og at ný- ella umbyggja hølir hjá tí almenna. Til tess at landið skuldi fáa sum mest burturúr, og at tryggjað varð, at nýtsluvirðið varð fullnýtt, var ***neyðugt at stýra og skipað hetta økið*** og at ***samla vitan og royndir á einum staði***. Tí varð samtykt at skipa byggi- og bygningaumsiting sum eitt málsøki hjá Landsverki at umsita.

## 2.1. Yvirskipaðu uppgávurnar

Ábyrgdarøkið hjá Byggideildini er fjølbroytt og umfatar byggilistarlig og byggifrøðilig mál. Uppgávurnar snúgva seg í høvuðsheitum um ný- og umbygging, viðlíkahald, leigumál og ráðgeving fyri aðalráð og avvarðandi stovnar. Harumframt ger og skipar Byggideildin ymiskar reglugerðir, vegleiðingar og luttekur í ymiskum nevndararbeiði og verkætlanarbólkaarbeiði, sum á byggilistarligan ella byggifrøðiligan hátt er til frama fyri føroyska bygging.

Byggideildin er byggiharri, tá ið nýggir vegir, bygningar og havnir skulu byggjast. Deildin hevur eisini ábyrgdina av størri umbyggingum og umvælingum av bygningsverkum. Deildin samstarvar við fakdeildirnar og Framleiðsludeildina og hevur serkunnleika, tá tað ræður um stýring av byggitilgongdini, t.e. avtalum, loyvum, tíðarætlanum, fíggjarviðurskiftum, myndugleikaviðurskiftum og samskifti (sí lýsing av tilgongdini í eini byggiverkætlan í Fylgiskjali 2 á s. 30).

Høvuðsuppgávan hjá byggideildini er sum byggiharri at skipa fyri, leggja til rættis og stýra byggitilgongdini frá byrjan til enda. Arbeiðið skal fremjast so, at eigararnir av byggingini fáa júst tað, ið avtalað varð, til ásettu tíðina, fyri avtalaða kostnaðin og í kravdu góðskuni. Ein annar partur av arbeiðinum hjá Byggideildini er teknistovuvirksemi. Í hesum sambandi verða veittar tænastur til stovnin sum heild, bæði vanligt teknistovuarbeiði og aðrar atknýttar tænastur.

Byggideildin hevur seinastu árini fingið alt størri uppgávur og arbeiðsøki at taka sær av. Almennir bygningar kring alt landið – skúlar, sambýli, sjúkrahús o.s.fr. – skulu byggjast, umbyggjast og haldast viðlíka. Í sambandi við nýbygging er tað uppgávan hjá Byggideildini at

greina og raðfesta krøvini til byggingina við atliti at funktionaliteti, byggilistafrøði og góðskustøði, so at verkætlanin
eydnast so væl sum gjørligt. Haraftrat tekur deildin lut í viðgerðini av nógvum øðrum málum, har bygningar, landslag og formlist eru í brennideplinum. Byggideildin savnar vitan um almennar bygningar saman í dátugrunn til tess at fáa framkomna stýring av viðlíkahaldsarbeiðinum.

## 2.2. Bygningsviðlíkahald

Uppgávan varð latin Landsverki í 2001. Yvirskipaða endamálið við bygningsviðlíkahaldi er at tryggja bygningsvirðið av almennum bygningum, og at tryggja virkseminum í bygningunum fullgóðar og vælvirkandi karmar.

**Uppgávan er at:**
- Staðfesta viðlíkahaldstørvin við bygningssýni
- Í samráði við brúkaran, raðfesta viðlíkahaldið
- Í samráði við ráðini/ánaran, raðfesta viðlíkahaldið í mun til játtan
- Í samráði við stovnin fyrireika, seta í gongd, leiða og samskipa viðlíkahaldsarbeiðið
- Umframt hava yvirskipað eftirlit við og fíggjarstýra viðlíkahaldsarbeiðið.

### 2.2.1. Langtíðar raðfestingar

Byggideildin skipar fyri, at allir bygningar hjá landinum verða skrásettir, soleiðis at møguligt er at gera eina langtíðar viðlíkahaldsætlan fyri hesar bygningar. Hetta arbeiðið verður gjørt í samráði við aðalráðini og avvarðandi stovnar.

**Arbeiðið inniber at:**
- Gera tørvsmeting og skipan av bygningum hjá tí almenna til tess at fullnýta nýtsluvirðið
- Skilhalda og dagføra ***heildaryvirlit*** yvir landsins ognir
- Hava ***yvirlit*** yvir stand og viðlíkahaldstørv
  Ráðgeva, tá fíggjarlóg og eykajáttanarlógir skulu gerast
  Gera tilmæli til aðalráð í sambandi við áseting av íløgukarmi og viðlíkahaldskarmi

## 2.3. Leigumál og keyp

Byggideildin hevur uppgávuna at góðkenna øll leigumál hjá landinum.

**Arbeiðið inniber at:**
- Viðgera leigusáttmálan í mun til nýtsluna av bygninginum, góðskuna og leigukostnaðin.
- Kanna og góðkenna leigusáttmálar við atliti at myndugleikakrøvum og góðsku.
- Saman við brúkara, samráðast, sýna og ráðgeva í sambandi við leigu og keyp.

Landsverk skal góðkenna allar leigusáttmálar hjá almennum stovnum til tess at tryggja, at prísir, góðska og skyldur í sambandi við viðlíkahald og aðrar treytir fylgja vanliga støðinum í almennum leigusáttmálum.

## 2.4. Húsaskoðan

Byggideildin umsitur húsaskoðanarskipanina sambært løgtingslóg nr. 137, frá 6. okt. 2011, lagt til Landsverk 1. Januar í 2014. eftir boðum frá Løgmansskrivstovuni. Skipanin er galdandi í sambandi við keyp og sølu av fastogn.

**Arbeiðið inniber at:**
- Tilnevna (seta) og endurtilnevna byggikøn
- Skráseta og hava yvirlit yvir tilnevnd byggikøn
- Viðmæla upptøku av byggikønum til upptøkuskeið
- Upplýsa tey tilnevndu byggikønu, tá broytingar verða gjørdar í húsaskoðanarskipanini
- Tilevna og góðkenna serligt oyðiblað til Húsaskoðan

- skráseta støðumetingarnar, og fylgja upp treytir hesum viðv.
- savna saman hagtøl um húsaskoðanarskipanina

## 2.5. Rakstur av landsins ognum

Landið yvirtók bygningar frá Færøernes Kommando 1. januar í 2014. Uppgávan varð løgd til Landsverk uttan at neyðug játtan fylgdi við. Byggideildin hevur sostatt fingið til uppgávu at umsita og reka nakrar av landsins ognum. Talan er um ognirnar í Mjørkadali, kuplarnir á Sornfelli og Kommandørhúsið í Tórshavn.

**Arbeiðið inniber:**
- At umsita og reka ognirnar
- At umsita yvirtiknu leigumál og leiguinntøku
- At viðlíkahalda ognirnar
- At leigu út tað, sum kann leigast út

## 2.6. ESCO

Byggideildin hevur, eftir áheitan frá Fíggjarmálaráðnum, fyrireikað eitt ESCO útboð í 2014. Í eini royndarverkætlan verða 10 bygningar bodnir út í 2015. Talan er um bygningar, sum skulu umvælast, tí teir hava stóran tørv á orkuábøtum.

**Arbeiðið inniber at:**
- Fyriskipa skráseting av landsins bygningum í mun til støðulýsing og orkunýtslu
- Lýsa bygningarnar í mun til SAVE, t.e. ein arkitektonisk lýsing av bygningunum
- Taka og senda royndir av bygningslutum fyri vandamikil evni til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna
- Samskipan av ESCO millum Landsverk og Fíggjarmálaráðið og millum Landsverk og ráðgeva
- Samskifta við avvarðandi av bygningunum t.e. leiðara, húsavørð o.a.
- Samskipa tíðarætlan, sáttmálar, útbjóðing, fígging, føroyska arbeiðsmegi o.a.

## 2.7. Ný- og umbygging

Í 2001 varð byggiumsitingin, sum áður hevði ligið í Tinganesi og øðrum aðalráðum, flutt til Landsverkfrøðingin. Tað hevði við sær, at Landsverk eisini skuldi vegleiða aðalráð og stovnar í

sambandi við at leggja til rættis ný- og umbyggingar av landsins ognum í teimum innleiðandi umførunum.

Eftir ynski frá aðalráðnum virkar Byggideildin sum byggiharri, og tá hevur Byggideildin eisini ræðisrættin yvir íløgujáttanini.

**Byggiharraleikluturin inniber at:**
- Hava verkætlanarleiðslu ísv. almenna bygging, at tryggja at verklagslógin verður fylgd og at hava eftrirlit við, at raðfestingar verða fylgdar
- At skipa fyri samskifti og kunning við partar, ið hava við verkætlanir at gera. Herundir eisini ráðini, bygginevndir og onnur
- Gera byggiskráir í samstarvi við bygginevndina, sum inniber at gera kravfestingar og byggiskráir til almenna bygging og tryggja, at arbeiðssetningur verður fylgdur
- Skipa fyri, at prosjektgransking verður gjørd av verkætlanunum, soleiðis at tryggjað verður, at bygt verður sambært verklagslógini og raðfestingunum, og soleiðis at eykakostnaðir verða minst møguligir
- Standa fyri útbjóðing av byggi- og anleggsverkætlanum

- Gera sáttmálar við ráðgevarar, arbeiðstakarar og veitarar fyri allar veitingar, ið hava við verkætlanir at gera, og hava eftirlit við, at sáttmálarnir verða fylgdir
- Tryggja at bygging verður handað frá arbeiðstakara, at manglar eru gjørdir, soleiðis at byggingin kann handast ráði og til viðlíkahaldseindina hjá Landsverki, soleiðis at bygningur verður viðlíkahildin framyvir

## 2.8. Arkitekturpolitikkur

Tað er umráðandi, at tað almenna er ein fyrimynd og gongur á odda í byggilistarligum viðurskiftum. Byggideildin tekur lut í norðurlendskum samstarvi um Arkitekturpolitikk, og arbeiðir deildin við at orða ein arkitekturpolitikk.

**Uppgávan inniber:**
- At skipa fyri eitt nú evnisdøgum og verkstovum um arkitekturpolitikk
- At skipa og skriva arkitekturpolitikkin
- At halda interessentar kunnaðar og lata teir fáa ávirkan
- At kunna alment um arkitekturpolitikkin og íverksetan av arkitekturpolitikkinum

## 2.9. Bygningskunngerðin

Innlendismálaráðið lat Landsverki hesa uppgávu í 2009 at orða eitt uppskot til eina nýggja bygningsreglugerð fyri Føroyar. Arbeiðið er liðugt, og málsøkið hoyrir nú til Fiskimálaráðið, sum hevur heitt á Landsverk um at umsita økið.

Tað er Byggideldin, sum hevur samskipanarleiklutin í verkætlanarbólkinum, sum arbeiðir við at orða føroysku bygningskunngerðina. Bygningskunngerðin fevnir um krøv til føroyska bygging, eitt nú krøv til innrætting av bygningum, orkukrøv o.a.

**Uppgávan fevnir um:**
- At samskipa og dagføra bygningskunngerðina

- At luttaka og kunna stýrisbólkin, sum er mannaður av Landsverki og Fiskimálaráðnum
- At standa fyri lærandi skeiðum og tiltøkum fyri kommunir, stovnar, fyritøkur og almenningin
- At vera upplýsandi myndugleikin hjá kommununum, stovnum. fyritøkum og almenninginum

## 2.10. Vegleiðing

Byggideildin tekur sær av at ráðgeva og vegleiða aðalráð, stovnum teirra og i summum førum eisini privatum stovnum og feløgum. Talan kann vera um ráðgeving í sambandi við byggilistarlig og byggifrøðilig mál.

**Vegleiðingin fevnir um:**
- Eitt nú vegleiðing í sambandi við, tá ráðið planleggur keyp av jørð, har bygningur og/ella vegur skal kostnaðarmetast, áðrenn keypið kann fara fram
- Tá ráðið ynskir at tryggja sær, at eitt hvørt privat byggiarbeiðið, sum ráðið onkursvegna er knýtt at, verður gjørt sambært avtalaðum leisti
- At granska og viðmerkja tilfar fyri Mentamálaráðið, tá fólkaskúlar verða planlagdir og prosjekteraðir
- Byggiharraleiklutin ísv. búðstaðarbroytingar, sum Almannaverkið varðar av

# 3.0. Deildin fyri Infrakervi

Høvuðsuppgávan hjá deildini fyri Infrakervi  er at ráðgeva, planleggja, kravfesta, góðkenna, reka og viðlíkahalda havnir, lendingar og landsvegir. Eitt nú leggur deildin ætlanir fyri framtíðar vegalinjum, og skipar fyri fysiskari planlegging av sundum og firðum. Harumframt umsitur deildin onnur øki, so sum oljubasing á sjónum, trygd í havnum, eftirlit við vitum, aliøkjum, tyrlupallum og flogvallamál.

Meira ítøkiliga fevna uppgávurnar hjá deildini fyri Infrakervi um hesi øki:
- samferðslukervið hjá landinum, og at byggja og halda landsvegirnar
- at halda samferðsluhavnir og landshavnir; gera botnkort, sjókort og myndugleikauppgávur í sambandi við kommunalar vitar, eins og at góðkenna ISPS-havnir
- tilbúgving í sambandi við basing av oljudálking á sjónum
- gera, umsita og reka tyrlupallar
- kanna og gera ætlanir fyri flogvallaviðurskiftum í Føroyum
- ymisk onnur tøknilig mál fyri land og kommunur

Um endamálið við virkseminum á deildini skal vera at fáa sum mest burtur úr játtanini og at varðveita tænastustøðið, sum er í dag, er neyðugt at síggja alt virksemið á deildini fyri Infrakervi sum eina heild, serliga í haldinum av landsvegunum. Øll starvsfólk í haldinum eru við í øllum virksemi, t.e. somu fólk eru í vanliga haldinum og asfaltering o.a., sum í vetrarhaldinum. Skal Landsverk hava um hendi t.d. oljubasing á sjónum og aðra tilbúgving, er neyðugt við einum ávísum tali av fólki, og ikki minni enn í dag.

## 3.1. Kjarnuuppgávurnar og bygnaður

**Deildin fyri Infrakervið varar av hesum infrakervinum:**
- Íalt 476 km av vegum og tunlum
- 16 vanligir tunlar íalt 30 km
- Um 250 brúgvar
- 2 byrgingar
- 4 havnir
- 10 tyrlupallar

**Myndugleikaviðgerð í mun til landsvegalógina**
Landsverk er landsvegamynduleiki og røkir myndugleikauppgávur ísv. hetta.

**Bygnaður og starvsfólk**
Deildin fyri Infrakervi er, umframt deildarleiðaran og myndugleikaviðgerðina, sum verður umsitin av 2 fulltrúum,  í høvuðsheitum býtt í tvær eindir - eina plan- og eina rakstrareind.

Á planeindini eru 4 verkfrøðingar og 3 teknikkarar. Høvuðsuppgávurnar eru ferðsluplanlegging, ferðsluhagtøl, projsektering og prosjektgransking, tilbúgving, uppmáting, ISPS og siglingarleiðir.

Á rakstrareindini eru 4 verkfrøðingar, 5 teknikkarar,  5 arbeiðsformenn, 20 maskinførarar og umleið 10 í vetrarhaldinum. Haraftrat eru 10 fólk knýtt at tyrlupallunum. Høvuðsuppgávurnar eru

viðlíkahald og rakstur av infrakervinum (landsvegir, landshavnir og tyrlupallar), íroknað vetrarhald, tunlar, veðurstøðir, aldumátarar og kunning um koyrilíkindi.

## 3.2. Ferðsluplanlegging

Landsverk arbeiðir áhaldandi við at betra um ferðslutrygdina á landsvegakervinum. Hetta verður gjørt við at gera ferðslufrágreiðingar, seta í verk ferðslutrygdartiltøk, gera ferðslugrannskoðan og samferðsluætlanir.

Áðrenn sett verður út í kortið fyri einum nýggjum landsvegi ella aðrari infrakervisútbygging, og óansæð um hetta er eitt stig, sum Landsverk sjálvt tekur, ella tað er eitt politiskt ynski, so byggir ein slík ætlan altíð á eitt sera gjølligt forarbeiði.

Síðani samferðsluætlanirnar vóru veruleiki, hava tær verið grundarlag fyri nýggjum verkætlanum. Tá farið verður undir nýggja verkætlan, er fyrsta stigið at savna inn hagtøl, fyri at kunna lýsa tørvin nágreiniliga. Tá fíggjarligu karmarnir eru komnir upp á pláss, kann prosjekteringin bjóðast út, og at enda verður arbeiðið boðið út (sí lýsing av tilgongdini í eini byggiverkætlan í Fylgiskjali 2 á s. 30).

Landsverk hevur fólk við servitan innan hetta økið, og hevur síðan 1948 upparbeitt sær serkunnleika og vitan, sum er ein treyt fyri at røkja uppgávuna.

## 3.3. Samferðsluplanlegging

Eitt vælvirkandi samferðslukervi hevur stóra ávirkan á, hvussu samfelagið virkar. Tað hevur ávirkan á, hvar fólk búseta seg og arbeiða, hvar vinna, skúlar og aðrar tænastuveitingar verða staðsettar. Krøvini til samferðsluplanlegging eru økt munandi seinastu árini. Ein yvirskipað samferðsluætlan er ein langtíðarætlan, sum skal tryggja, at samferðslukervið til eina og hvørja tíð nøktar samtíðarinnar krøv og tørv, og at peningur í flutningskervið skal verða brúktir so optimalt sum til ber.

Endamálið við infrakervinum er flytføri – tað at kunna ferðast úr stað í stað – og framkomuleikin, sum er ferðatíðin, smidleikin og dygdin á ferðini. Samstundis skal havast í huga, hvørja ávirkan betri flytføri og framkomuleiki hava á bæði ferðslutrygd og umhvørvi.

Samferðsluplanleggingin hjá Landsverki verður gjørd í samstarvi við aðrar partar við áhuga í og ábyrgd av infrakervinum, serliga viðkomandi ráð, Strandfaraskip Landsins og til dømis ferðavinnan og aðrar áhugabólkar.

## 3.4. Ferðsluhagtøl

Ein umráðandi partur av arbeiðinum at tilrættisleggja og tryggja ferðsluna eru ferðsluhagtøl. Landsverk hevur síðani mitt í áttati-árunum gjørt ferðsluteljingar á landsvegunum. Hesar vísa, hvussu ferðslan er broytt seinastu árini, og virka sum grundarlag, tá ferðslutrygdartiltøk og -ætlanir skulu gerast. Talan er fyrst og fremst um teljingar av akførum, umframt at slag av akfari, koyrirætningur og ferð eisini verður staðfest.

Landsverk hevur síðani miðskeiðis í áttati-árunum skrásett øll ferðsluóhapp út frá politifrágreiðingum. Fyri miðvíst at minka um ferðsluóhapp, er umráðandi at vita, hvat hendi, hví tað hendi, og ikki minst, hvat kann gerast fyri at fyribyrgja, at tað hendir aftur.

## 3.5. Ferðslutrygdartiltøk

Endamálið við ferðslutrygdartiltøkunum er at betra ferðslutrygdina á verandi vegakervi. Talan er sum oftast um tiltøk, ið eru neyðug, tí ferðslan er økt ella broytt, síðani ein vegur ella tunnil varð tikin í nýtslu. Ella har nýggj vitan hevur gjørt tað neyðugt at broyta verandi veg, tí hann ikki lýkur trygdarkrøvini í dag.

Ferðslutrygdartiltøkini verða raðfest soleiðis, at mest møgulig trygd fæst fyri játtanina. Tað merkir, at tiltøk verða sett í verk, har tú fyribyrgir flest ferðsluóhappum.

## 3.6. Basing av oljudálking á sjónum

Tann 1. januar í 2011 yvirtók Landsverk ábyrgdina av basing av oljudálking á sjónum uttan fyri havnir. Ábyrgdin av at taka upp oljudálking á sjónum er tvídeild. Sambært §22 í Havumhvørvislógini, hava kommunurnar ábyrgdina, um oljan kemur av landi út á sjógv, og um oljudálkingin er inni í eini havn. Tað er hinvegin landið, sum hevur ábyrgdina av eini oljudálking, um hon hendir uttan fyri hetta økið. Eingin játtan er til hesa uppgávu. Umleið 70 fólk, sum annars eru partur av haldinum av landsvegunum og vetrarhaldinum kring landið og á høvuðsskrivstovuni luttaka í operationella partinum av hesi uppgávu saman við sløkkiliðum kring landið.

## 3.7. ISPS tilbúgving í havnum

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur, við heimild í løgtingslóg nr. 11 frá 31. mars 2004 og kunngerð nr. 33 frá 25. mai 2004, álagt Landsverki at røkja niðanfyri nevndu myndugleikauppgávur í sambandi við at verja havnir ímóti yvirgangi:

- Áseta trygdarstigið fyri føroyskar ISPS havnir
- Góðkenna váðametingar fyri føroyskar ISPS havnir
- Góðkenna verndarætlanir fyri ISPS havnir
- Hava eftirlit við og skipa fyri venjingum fyri at kanna eftir, hvussu væl ætlanirnar virka
- Góðkenna verndarfeløg, sum kunnu røkja ávísar uppgávur í sambandi við váðametingar og verndarætlanir

## 3.8. Uppmáting og avseting á landi

Landsverk hevur í mong ár gjørt uppmátingar í sambandi við forkanningar, innanhýsis prosjektering, eftirlitsuppgávur, sýn og aðrar uppgávur, sum krevja neyva staðseting. Landsverk setir eisini av byggilinjur, veglinjur, peililinjur og annað. Landsverk hevur starvsfólk, ið hava førleikar og útgerð til at gera sera neyvar uppmátingar og avsetingar og kunnu veita punkt og tekningar til fleiri ymisk forrit.

## 3.9. Sjóuppmátingar

Við serútbúnum starvsfólki og framkomnari útgerð hevur Landsverk teir bestu møguleikarnar og førleikarnar til at bjóða seg fram at gera alskyns uppmátingar á sjónum. Hesar fara fram við einum sonenvdum fleirstráluekkoloddi (high resolution multibeam system) á firðum og sundum.

Mátingarnar verða millum annað gjørdar í sambandi við:
• viðlíkahald av sjókortum og fyri at fáa vissu um dýpið í havnum og innsiglingum
• nýgerð og dýping av havnum o.a.
• eftirlit við havnaanleggum og grótkastum
• simuleringar og modellroyndir
• úlegging av sjókaðalum
• leiting eftir og eftirlit við lutum á havbotninum
• flokking av botnløgum við umhvørvisligum ella jarðfrøðiligum endamáli
• ætlanir um nýggj aliøki

Landsverk ger nógvar uppmátingar fyri kommunur, almennar stovnar, ráðgevandi fyritøkur, arbeiðstakarar og onnur.

## 3.10. Aldu- og streymmátingar

Landsverk hevur síðani seinast í sjeytiárunum gjørt aldumátingar kring Føroyar. Mátingarnar liggja sum grundarlag fyri hagtølum, sum til dømis verða nýtt til at áseta styrki og skap av brimgørðum.

Í sambandi við verkætlanir og annað, ger Landsverk harafturat kanningar av streymi og aldu á firðum og sundum. Við somu útgerð ger Landsverk eisini sanntíðar streymmátingar av sjóvarfallinum.

Tænastan verður nógv brúkt av skipum, DMI v.m., og hevur stóran týdning fyri trygd á sjónum. Landsverk ger uppgávur fyri kommunur, ráðgevarar, alarar og onnur, sum ynskja at keypa áðurnevndu tænastur.

## 3.11. Vatnstøðumátingar

Landsverk rekur sjey vatnstøðumátarar, sum eru settir upp við útvaldar havnir, ið umboða innanoyggja sjóøkið. Mátararnir máta vatnstøðu og hita í sjónum. Við mátingunum verða útvegað hagtøl fyri flóð og fjøru, ið verða brúkt í sambandi við sigling og havnagerð og annað. Flóð- og fjørumátingarnar eru eisini ein liður í at fastleggja eitt nýtt 0-punkt og betra um GPS neyvleikan. Hesir upplýsingar eru at finna á heimasíðuni hjá Landsverki, og verða brúktir ísv. sigling inn og út úr havnum. Umframt føstu flóð- og fjørumátararnar hevur Landsverk útgerð, sum kann setast upp í sambandi við avtalu um kanning á ávísum støðum.

## 3.12. Tilbúgving

Tilbúgvingin hjá Landsverki hevur til endamáls at tryggja samferðslukervið, vegir og havnir, umframt at hava um hendi operativa partin av basing av oljudálking á sjónum.

Tilbúgvingararbeiðið fevnir um bæði planlegging og myndugleikaviðgerð og i summum førum eisini tann operativa partin. Landsverk virkar sum eitt slag av sivilverju, t.e. at fólk og amboð eru til taks, tá ið kreppurstøður íkoma, eitt nú sum vit kenna tað frá kavaódnum, har neyðugt er at bjarga fólki í bilum, at hjálpa til og grava fyri sjúkraflutningi. Landsverk hevur í dag gott og tætt samstarv við Løgreglu, Sjúkrahúsverk, Bjargingarfeløg, Tilbúgvingarstovnin, Umhvørvisstovuna, MRCC og onnur, ið varða av, bæði innan tilbúgvingina á landi og í sambandi við basing av oljudálking á sjónum. Samstarv er eisini við grannalondini innan hesi øki.

## 3.13. Havnir, lendingar og brimgarðar

Fyrisitingin av havnunum varð latin Landsverki í seksti-árunum. Síðani 1974 hava smærri og størri ábøtur verið framdar í flest øllum havnarløgum í Føroyum. Summar av teimum vanligu lendingunum eru so líðandi umbygdar til havnir. Tað eru samanlagt fýra landshavnir í Føroyum, á Gomlurætt, á Syðradali, Oyrargjógv og á Krambatanga. Umframt hetta røkir Landsverk ferjurampur í Klaksvík og í Skopun. Kommunurnar eiga og reka allar hinar havnirnar í landinum.

## 3.14. Tyrlupallar

Síðani 1995 hevur Landsverk havt raksturin og viðlíkahald av flest øllum tyrlupallum í landinum um hendi. Samanlagt 11 tyrlupallar eru, og av teimum tekur Landsverk sær av teimum 10. Landssjúkrahúsið hevur ábyrgdina av tí eina. Landsverk hevur umsjónarfólk úti um landið, sum eru knýtt at hvørjum tyrlupalli sær. Umframt uppgávur fyri Landsverk, taka hesi fólk sær av avgreiðsluni av ferðaseðlum, manifestum, farmi og líknandi fyri Atlantic Airways, sum røkir sjálva tyrluflúgvingina.

## 3.15. Vitar og siglingarleiðir

Landsverk er fyrisitingarligur myndugleiki ísv. staðseting av aliøkjum og øðrum á sjónum í mun til siglingarleiðir. Landsverk hevur eftirlit við 61 vitum kring landið, t.e. vitar, sum landið eigur, og kommunalir vitar v.m. Eftirlitið fevnir um skipað sýn av lanternum, fýrvinklum, vitahúsum og streymveiting. Søfartsstyrelsen umsitur teir 27 statsvitarnar.

Líka síðan 1948, tá ið Landsverk varð stovnað, hevur stovnurin verið partur av umsitingini av málsøkinum “Vitar, merking og siglingarleiðir” í Føroyum. Uppgávan er fyrst og fremst at tryggja fría og trygga sigling á firðum og sundum. Ábyrgdarøkið fevnir um eftirlit, viðlíkahald, at syrgja fyri at ljósviðurskiftini eru í lagi, og at ráðgeva vitaeigarum í sambandi við uppseting og rakstur av vitum v.m. Arbeiðið verður framt í samstarvi við Søfartsstyrelsen. Harafturat eigur Landsverk og leigar út ljósboyur til fyribils avmerking, tá nýbyggingar ella umvælingar fara fram í føroyskum havnum og sjóøki.

Saman við vitaansaranum, sum í flestum førum er havnarmeistarin, er vitaeftirlitið hjá Landsverki skipað soleiðis, at allir vitar verða sýnaðir í minsta lagi eina ferð um árið. Vitaansarin hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum og viðlíkahaldinum, sum at skifta út perur, reingerð av linsum, avfukting og máling. Landsverk tryggjar, at vitarnir lýsa samsvarandi vitalistunum og altjóða reglum. Størri umvælingar og broytingar av kommunalum og privatum vitum verða altíð gjørdar í samstarvi við Landsverk.

## 3.16. Rakstur og viðlíkahald av landsvegakervinum

**Uppgávurnar í vanliga haldinum eru í stuttum hesar:**
Asfaltumvælingar tvs.umvæling av bráfeingis skaðum so sum slaghol.

Tilbúgving, ið umfatar burturbeining av mistum lutum á vegi, gera neyðugar ábøtur á vandamikil viðurskifti, á t.d bilverjur, rulluportur, skelti, omanlop, skriðulop, skalvalop og steinar á vegnum. Upprudding og merking í sambandi við ferðsluóhapp, burturbeining av deyðum seyði o.l.

Gerð av alternativum farleiðum, eitt nú í sambandi við óhapp í tunlum.

Dagligur rakstur umfatar reinhald av økjum fram við vegi og á havnum, bygningar, brúgvar og tunlar. Tryggja avvatning av vegum, vegjaðarum, grøvum og tvørrennum. Umframt viðlíkahalda vegstrípur, skelti, prestar og aðra avmerking. Grassláing fram við vegum og reinsan av ókrúti. Upprætting, umvæling og útskifting av bilverjum.

Mekaniskar og elektriskar innleggingar umfata byggitekniskar installatiónir og skipanir (eitt nú SRO og el í tunlum eru útveitt). Ljós, ferðgáar og teljistøðir verða regluliga eftirhugd.

Samlaða játtanin til viðlíkahald av landsvegum er umleið 43 mió. kr. Av hesi játtan fara umleið 9 mió. kr. til vetrarhald, 11 mió. kr. til asfaltering/striking, 3,5 mió. kr. til planlegging & tilbúgving og 3,5 mió til myndugleikaviðgerð og umsiting. Tær síðstu 16 mió. kr. eru til rakstur og viðlíkahald av vegum og tunlum.

## 3.17. Vetrarhald á landsvegunum

Tá ið veðurstøðirnar boða frá hálku, verða teir vegirnir saltaðir fyrst, har mesta ferðslan er. Landsverk hevur nú samanlagt 27 veðurstøðir kring landið, sum veita upplýsingar um millum annað hita, vind, ætt og hvirlur hvørt 10. minutt alt samdøgrið. Av teimum 27 veðurstøðunum hava 14 vevmyndatól, soleiðis at til ber at síggja støðuna á vegnum á heimasíðuni ella í fartelefonini, um ein nýtir veðurappina hjá Landsverki. Samanlagt hevur Landsverk um hendi 34 vemyndatól kring landið, á landsvegum, havnum, bygginggum, umframt at vevmyndatól eru í trimum av tunlunum.

Játtan og útgerð er ikki til at rudda kava og salta allar landsvegir 24 tímar um samdøgrið. Landsverk hevur tí bólkað landsvegirnar í fýra ymiskar vegaflokkar: A, B, C og D. Arbeitt verður í tíðarbilinum, tá tað er mest ferðsla – millum kl. 05 og 21– sunnu- og halgidagar frá kl. 06.

## 3.18. Fíggjarviðurskifti hjá haldinum

Soleiðis er rakstrajáttanin til landsvegahaldið, ið hevur eina játtan á 28 mió. kr. Íroknaðar eru

3 mió. kr. frá íløgum, men uttan tær 9 mió. kr., ið er settar av til asfaltering og 2 mió til stríping.




Uppgávurnar er ymiskar gjøgnum árið, sum tað eisini framgongur niðanfyri.




Til vetrahaldið krevst rættiliga stór manning at hava til taks, og tí krevst tøk manning til hetta, bæði frá Infrakervi og Framleiðsludeildini.

## Haldið í 2013

| Hald av landsvegum tilsamans 2013 | | Játtan |
|---|---|---|
| ENTREPRENØRVIRKSEMI VEGADL | -156.211 | |
| VANLIGT HALD | 17.481.143 | |
| LEIÐSLA OG UMSITING | 4.710.560 | |
| VETRARHALD | 9.006.561 | |
| ASFALTERING | 9.227.975 | |
| FERÐSLUDEPIL | 3.075.346 | |
| Tilsamans | 43.345.374 | 43.200 |




## Vetrarhald 2013

| | |
|---|---|
| Lønir | 2.228.276 |
| Orkunýtsla | 458432 |
| Maskinleiga | 3155243 |
| Lastbilakoyring | 158.298 |
| Salt | 1.321.888 |
| Annað | 415.449 |
| Søla | -569.280 |



## Vanligt viðlíkahald 2013

| | |
|---|---|
| Lønir v.m. | 7.500.468 |
| Keyp av vørum og tænastum | 8.536.990 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 38.821 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.012.519 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 6.516 |
| Søla av vørum og tænastum | -665.352 |
| Útvegan av løgu o.ø. | 54.830 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 16.323 |
| Keyps-mvg | 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -19.973 |
| Tilsamans | 17.481.143 |



# 4.0. Framleiðsludeildin

Framleiðsludeildin arbeiðir tvørtur um fakdeildirnar, og kann í nógvum førum kallast ein tænastudeild. Hon hevur serkunnleika og eina vøru, sum fakdeildirnar gagnnýta í byggingum, rakstri og viðlíkahaldi.

**Høvuðsuppgávan hjá framleiðsludeildini er:**

- Framleiðsla av gróti, skervi og asfalti
- Útleigan og viðlíkahald av maskinamboðum hjá Landsverki
- Innkeyp og goymslustýring fyri Landsverk av eykalutum, rávørum til vegahaldi herundir bitumen og salt
- Entreprenørvirksemi, primert asfaltering, fresing og tunnilsarbeiði

**Bygnaður og starvsfólk**

Á Framleiðsludeildini starvast í løtuni 46 starvsfólk, harav ein er deildarleiðari, 2 eru millumleiðarar og 7 eru formenn. Deildin er skipað í 3 høvuðusøkir, og eru tey framleiðsla, smiðjur/goymsla og entreprenørvirksemi.

Framleiðslan fevnir um tað virksemið, sum Landsverk hevur í grótbrotunum kring landið, sum eru í Hundsarabotni, á Hústoft við Lambareiði, í Porkeri og við Krókafoss á Sandoynni. Virksemið umfatar framleiðslu og sølu av gróti, skervi og asfalti, herundir eisini oljugrúsi, sum er nógv nýtt á útoyggjunum.

Høvuðussmiðjan og goymslan er Maskinmiðstøðin í Kollafirði. Hartil kemur alt innkeyp av eykalutum og tilfari, og er tað eisini haðani at akfør og amboð verða útleigað. Harumframt eru smiðjur á Lambareiði og í Porkeri. Ein goymsla er í Hósvík, har bitumen verður innflutt og salt verður goymt.

Entreprenørvirksemi umfatar fyrst og fremst asfalt og fresiarbeiðið. Harumframt er nakað av tunnilsviðlíkahaldsarbeiði og kjarnuboringum.

**Framleiðsludeildin er ikki á fíggjarlógini:.**

- Alt virksemi er inntøkufíggjað
- Krav um avkast, til gagns fyri landskassa og íløgutørv hjá Landsverk.

## 4.1. Uppgávur Maskinmiðstøðin/Goymslur og LV-smiðjur

**Maskin- og amboðsumsiting**

- Útleigan av maskinum og amboðum til deildirnar á Landsverki
- Innkeyp av nýggjari útgerð

**Goymsla í Kollafirði**

- Goymsluumsiting og herundir innkeyp og tolling
- Eykalutir av alskins slagi

- Annað tilfar ið nýtt verður

**Smiðjur í Kollafirði, Lambareiði og Øravík**
- Viðlíkahald av maskinum og amboðum hjá Landsverki
- Hjálpa til við viðlíkahaldi av asfaltverki og skervverkum

**Bitumengoymsla í Hósvík**
- Rakstur av goymslu
- Veitir bitumen til asfaltverki í Hundsarabotni og á Sundi

**Saltgoymsla í Hósvík**
- Veitir salt til vegahaldið
- Alt innkeyp eftir reglunum hjá Almenna Innkeypsportalinum

**Uppgávur hjá asfalt- og fresiliðunum**

Asfalt og fresiuppgávur fyri:.

Infrakervið, kommunur og privat

## 4.2. Grót, skerv og asfaltframleiðsla

**Hundsarabotnur:**
- Grótbrot
- Skervverk
- Asfaltverk
- Nýtsla av føroyskum gróttilfari
- Endurnýtsla umleið 10 % í miðal

**Hústoft og Porkeri:**
- Grótbrot
- Skerverk

**Sandoy:**
- Grótbrot
- Skervsøla

## 4.3. Royndarstova

070 AB 8 | Slitlag AB 8 | Asfaltroyndir 2013

INNANSTOVNS

LANDSVERK byggir land

### Royndarstovan í Hundsarabotni

**Asfaltroynd nr. : 070 - 2013**

Krøv sambært Landsverk - Asfaltarbeiðir 2011.

| | |
|---|---|
| Framleiðslustað : | Hundsarabotnur |
| Stað Endamál Verkætlan : | 4090 5503 7431 |
| Arbeiðsánari : | Eik Banki |
| Arbeiðsøki : | Eik Banki úti við Strond |
| Asfaltlið : | LV - Jóan Petur Petersen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Slitlag :* | *AC 8 surf 160/220* AB 8 | *LV vøru nr :* | *T 69* |
| Resept nr. | 2 | Bitumen frá effo : | B 160/220 |
| Roynd úttikin : | 18. desember 2013 | Úttikið hevur : | ZT |
| Heintingarstað : | Undan hundinum | Kl : | 10.07 |
| Máldur hiti °C : | 160 | Krav, blandihiti °C : | 130-170 |
| Veðrið í Hundsarabotni : | Hampuligt veður í dag | Krav, útlegging °C : | min. 120 |

*Marshallkanning :*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marshall RV : | 2,595 | | Marshallslag : | 2 x 50 |
| Kompakt RV : | 2,686 | | | |
| HS % - Holrúm í steinskeletti : | 18,6 | Marshall ásetingar | Avvik | kg/tons |
| HA % - Bitumenfylt holrúm : | 15,1 | ÁFS < 5000 | Bitumen | -0,4 |
| HM % - Holrúm í asfalti : | 3,5 | 1-4,5 | Filler (Støv) | -7 |
| Z % - Bitumen útfyllingarstig : | 81,0 | 72-89% | SU 0-2 mm | 13 |
| Stabilitetur, N (min) : | 9300 | 4000 N | SU 2-4 mm | 4 |
| Deformatión, mm : | 3,0 | 1,5-4,6 mm | SU 4-8 mm | -10 |
| Stivleiki, N/mm (min) : | 3111 | 1100 | | |
| Evnistyngd á skervi - $Mg/m^3$ : | 3,000 | Porkerisgrót | | |
| Bitumen % resept : | 5,90 | | | |
| Bitumen % við brenning : | 5,86 | *Troxler NTO 4731* | Bitumentangi 91 | |
| Kannað hevur : | Jónleif Joensen | | | |
| Viðmerkingar : | 20 tons til LV og 20 t til TK | | | |

*Sáldiroynd AB 8*





Tel: 290 770
Faks: 421 095
T-postur: jonleif@lv.fo
www.landsverk.fo


Sign : ....................................

Roynderstovan í Hundsarabotni | Jónleif Joensen

Krumtappur innan góðskustýring og menning innan asfaltøkið í Føroyum. Leypandi tillaging av receptum við atliti at góðskukrøvum. Stakroyndir av LV-framleiðslu, bæði skervi og asfalti. Asfaltroyndir av vegateinum eftir umbøn. Góðskuroyndir fyri Asfaltverkið á Sundi og onnur eftir umbøn. Fyri at tryggja góðsku/haldføri og fáa góðskubetringar yvir tíð – menning á økinum.

## 4.4. Góðskustýring innan asfaltútlegging Skráseting av umstøðum fyri útlegging

**GÓÐSKUSTÝRING** **LANDSVERK**

**Vikuseðil fyri heittblandað asfalt**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Asfaltlið nr.: | 1 | Arbeiðsánari: | LV | Vika nr.: 51 | 2013 |
| Vegastrekki: | Asfaltarbeiði-Eik banki | | Vega nr.: | Verkætlanar nr.: | 4090 5503 7431 |

| Dagur | Dagfest | Frá statión | Til statión | Emulsións mongd | Ovara / niðara breyt | Slag av slitlag | Slag av undirlag | Slitlag mjtala í tons | Undirlag mjtala í tons | Vídd breidd x longd | Arbeiðsdagur tímar | Fólk til arbeiðis | Hvussu nógvir lastbilatímar eru brúktir til arbeiðið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadagur | 16-des | | | | | | | | | Gjørt klárt deksil -fresa | 9 | 5 | |
| Týsdagur | 17-des | | | | | AB 8 av sundi | 0 -12 | 40 ton | 15 ton | | 8 | 5 | 13 |
| Mikudagur | 18-des | | | | | AB 8 | | 40 ton | | | 8 | 5 | 7,5 |
| Hósdagur | 19-des | | | | | | | | | Gjørt klárt og stormur | 8 | 5 | |
| Fríggjadagur | 20-des | | | | | AB 8 | | 40 tons | | | 9 | 5 | 12 |
| Leygardagur | | | | | | | | | | | | | |
| Sunnudagur | | | | | | | | | | | | | |

**Veðurlíkindi:**

| Dagur | Hiti (umleið) | Sól Ja/nei/av og á | Regn ja/nei/av og á | Vindur (m/s umleið) |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagur | 8 stig | nei | av/á | 15 m/s |
| Týsdagur | 8 stig | nei | av/á | 15 m/s |
| Mikudagur | 7 stig | nei | av/á | 13 m/s |
| Hósdagur | 8 stig | nei | ja | 22 m/s |
| Fríggjadagur | 7 stig | nei | nei | 8 m/s |
| Leygardagur | | | | |
| Sunnudagur | | | | |

**Undirlag:**

| Reint ja/nei | Vátt ja/nei/lutvíst |
|---|---|
| | |
| ja | ja |
| ja | ja |
| | |
| ja | ja |
| | |
| | |

**Asfalt:**

| Asfalt | Hiti mátingar nr. | | |
|---|---|---|---|
| Feitt/turt | 1 | 2 | 3 |
| | | | |
| ok | 146 | 175 | |
| ok | 156 | 155 | |
| | | | |
| ok | 161 | 158 | |
| | | | |
| | | | |

**Meting av arbeiðinum*:**

| Hvussu javnur er vegurin (frá 1 til 10) | Hvussu eru skoytini (frá 1 til 10) |
|---|---|
| | |
| 8 | 7 |
| 8 | 8 |
| | |
| 8 | 8 |
| | |
| | |

Viðmerkingar:

* Við meting av arbeiðinum verður 10 givið fyri sera gott gjørt arbeiði og 1 fyri sera vánaligt gjørt arbeiði, ið skal gerast umaftur

Jóan Petur Petersen
Undirskrift

## 4.5. Góðskustýring – Eftirmeting av fresing

**GÓÐSKUSTÝRING** **LANDSVERK**

**Vikuseðil fyri fresing**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Asfaltlið nr.: | | Arbeiðsánari: | *Landsverk* | Vika nr.: | *41* | Ár: | *2014* |
| Vegastrekki: | *Hósvík-Kollafjørð* | Vega nr.: | | Verkætlanar nr.: | *4090-5501-1339* | | |

| Dagur | Dagfest | Frá statión | Til statión | Ovara / niðara breyt | Vídd breidd x longd | Arbeiðsdagur tímar | Fólk til arbeiðis | Hvussu nógvir lastbilatímar eru brúktir til arbeiðið | Meting av undirlagnum* (frá 1 til 10) | Hvussu sær arbeiði út** (frá 1 til 10) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadagur | | | | | | | | | | |
| Týsdagur | | | | | | | | | | |
| Mikudagur | *08-10-2014* | *7.400* | *7.900* | *Alt* | *7 mtr x 500 mtr* | *10* | *3* | *28* | *8* | *8* |
| Hósdagur | *09-10-2014* | *7.900* | *8.400* | *Alt* | *7 mtr x 500 mtr* | *10* | *3* | *22,5* | *8* | *8* |
| Fríggjadagur | | | | | | | | | | |
| Leygardagur | | | | | | | | | | |
| Sunnudagur | | | | | | | | | | |

Viðmerkingar: *Úrslit frá St 7.400-7.900. Har tað er fresa, er tað sera slætt. Men asfalti er sera opið í støðum, hví tað er so, veit eg ikki. Kundi verði tekin uppá at tað ikki er blivið nóg væl komprimera í síni tíð. Annars so er hetta mest í slitsporinum.*

*Sporsliti er frá 2,5 cm til 5 cm djúpt.*

* Við meting av arbeiðinum verður 10 givið fyri sera stabilt undirlag og 1 fyri sera vánaligt undirlag.
* *Við meting av arbeiðinum verður 10 givið fyri sera gott gjørt arbeiði og 1 fyri sera vánaligt gjørt arbeiði, ið skal gerast umaftur.

*Páll Hansen*
Undirskrift

## 4.6. Uppgávur tunnilsliðið

Entreprenøruppgávur av ymiskum slagi:

- Skróting í tunlum
- Tryggjan av bergi
- Royndarboring
- Græssáðing
- Autoverja

## 4.7. Asfaltframleiðsla




### Heitt asfalt býtt út á leverandørar 2013

| | |
|---|---|
| E.M Asfalt | 3.852.680 |
| H.J. Asfalt | 2.319.700 |
| Landsverk | 2.812.957 |



# 5.0. Prísásetingar

Tað fjølbroytta virkisøkið hjá Landsverki, setir stór krøv til ásetan av prísum og kostnaði av vørum og tænastum, fyri at tryggja gjøgnumskygnið og rættleikan í ásetingunum.

Nevnast kann prísáseting av ráðgevaratænastum, arbeiðs,- og handverkaratímum. Prísur og kostnaður á gróti og skervi, asfalti og Bitumen. Fylgjandi verður greitt frá teimum hættum, ið verða brúktir til hesa ásetan umframt, hvørjar fortreytir eru galdandi hesum viðvíkjandi.

## 5.1. Prísáseting av ráðgeving og tímaløntum arbeiðsfólki (*innanhýsis og uttanhýsis*)

Við innanhýsis prísi er at skilja prísir, sum verða brúktir, tá ið Landsverk hevur ræðisrættin av játtanini. Støðið verður tikið í sáttmálunum hjá teimum einstøku feløgunum, men fyri ikki at hava ov nógv sløg av tímaprísum, hevur leiðslan valt trý sløg:

- Prísur fyri ein verkfrøðing, arkitekt o.l.
- Prísur fyri ein arbeiðsmann
- Prísur fyri ein handverkara

Í innanhýsis prísinum er eingin vinningur íroknaður.

**Útrokningargrundarlagið:**
**Tímaprísur fyri ein verkfrøðing/tekniskan assistent/arkitekt/byggifrøðing/fulltrúa:**

Umframt sáttmálalønina verða allar beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur tiknar við. Sum beinleiðis kostnaður er at rokna: Gjald til barsilsskipan, gjald til frítíðaríksoyti, eftirløn, arbeiðsmarknaðargjøld. Sum óbeinleiðis kostnaður er at rokna: kostnaðir, sum svara til at hava eina arbeiðsstøð, her íroknað, telefon, hiti, teldukostnaður, leiga og osfr. Hesir óbeinleiðis kostnaðir verða býttir út eftir hesum býtislyklum, tal av starvsfólkum, tal av teldum, tal av fermetrum og tal av bilum.

Hesir tímalønarsatsir verða eftirhugdir javnan, og í minsta lagi eina ferð um árið.

## 5.2. Prísútrokningar fyri bitumen, skerv og asfalt

Landsverk hevur skyldu til at halda galdandi kappingarlóg, og tí er neyðugt at kenna kostnaðirnar, sum er grundlagið fyri ásetingini av søluprísunum. Hetta er serliga galdandi innan tey økið, har tey privatu eisini bjóða tænastur.

- At fastleggja ein máta at gera eitt kostnaðarbýti, sum kann brúkast frameftir. Tað er neyðugt at brúka sama framferðarhátt, soleiðis at prísásetingarmynstrið er tað sama ár um ár. Á hendan hátt kunnu vit eisini í framtíðini greiða frá orsøkini til at prísirnar broytast.
- Við at áseta prísirnar í byrjanini av árinum, ber eisini til at gera eina rakstrarætlan fyri árið. Síðani skulu leypandi tillaðingar av ætlanunum gerast gjøgnum alt árið við passandi millumbilum, til dømis eina ferð um kvartalið. Tá ber til at gera eina neyvari meting av endaliga úrslitinum í góðari tíð. Harvið kann peningurin eisini brúkast á ein meira skilagóðan hátt.

### Fortreytir

- Rentingin av íløgunum av maskinum og útbúnaði er í løtuni sett til 6%.
- Vinningurin aftaná rakstrar- og fíggjarkostnaðir  av bitumen, skervi og asfalti er settur umleið 10%.
- Í útrokningunum av tí roknskaparligu ávirkanini verður skilt millum figgjarútreiðslur (avskrivingar og rentuútreiðslur), beinleiðis framleiðslukostnað, umframt fastan (kapasitet) kostnað.
- Allir prísir eru uttan mvg.
- Útgangsstøðið fyri prísásetingini er realiseraðar mongdir árið fyri.
- Leigufrymilin skal í høvuðsheitum ikki broytast ár um ár, men tað kann tó koma upp á tal at gera smærri broytingar um fortreytirnar broytast munandi.
- Íløgurnar (skervverkið, asfaltverkið, tangarnir í Hósvík) eru býttar út fyri hvørt árið sær fyri at kunnu rokna, hvat avskrivingarnar skulu vera hvørt árið. Avskrivingar eru gjørdar eftir tí liniera háttinum. Áramálið er sett  til 17 ár, svarandi til miðal tekniska livialdurin.
- Rentingin er sett út frá tí bókaða virðinum á framleiðslutólunum og goymslubindingini við ársenda eftir avskrivingar árið frammanundan.

## 5.2.1. Bitumengoymslan í Hósvík

### Prísútrokningarháttur:

Prísirnir eru roknaðir út frá nýggjastu innkeypsprísunum. Innkeypið verður gjørt, tá ið goymslan er tóm, og tí verður prísurin ásettur eftir nýggjasta innkeypsprísinum, LIFO. Herumframt verður væntaður kostnaður i goymsluni, bæði rakstrar og fíggjarkostnaður, innroknaður í prísirnar.

### Roknskaparávirkan Bitumen – dømi

| **Omsætning** | **Dkk** |
|---|---|
| bitumen | 13.839.226 |
| Diamin | 34.720 |
| Petroleum | 48.048 |
| Flux | 72.393 |
| Gassolja | 28.676 |
| Emulsion | 128.496 |
| **Total omsætning** | **14.151.559** |
| | |
| **Omkostninger** | |
| **Direkte omkostninger** | |
| bitumen | (9.342.526) |
| Diamin | (34.720) |
| Petroleum | (48.048) |
| Flux | (72.393) |
| Gassolja | (28.676) |
| Emulsion | (128.496) |
| **Total direkte omkostninger** | **(9.654.859)** |
| | |
| **Dækningsgrad 1** | **4.496.700** |
| | |
| **Indirekte omkostninger** | |
| Lønir | (500.000) |
| Olja | (864.155) |
| El | (80.000) |
| Trygging | (95.000) |
| Maskinleiga | (135.000) |
| Umvælingar | (100.000) |
| Transportomkostninger (havneskat) | (100.000) |
| Ymiskt | (150.000) |
| **Total indirekte omkostninger** | **(2.024.155)** |
| | |
| **Dækningsgrad 2** | **2.472.545** |
| | |
| **Afskrivninger, renter og kapitalomkostninger** | |
| Afskrivninger | (638.132) |
| Kapitalomk. af investeringer | (360.434) |
| Renteomk. af varelagerbinding | (215.808) |
| | |
| **Dækningsgrad 3** | **1.258.171** |

Yvirskotið á 1,258 mió. kr. verður deilt lutfalsliga millum keyparar, asfaltverkið á Sundi/ Asfaltverkið í Hundsarabotni. Hetta er ásett í samráð við Kappingarráðið. Statsautoriseraður grannskoðari grannskoðar roknskapin á hvørjum árið

## 5.3. Skervverkini

### Frágreiðing viðvíkjandi útrokning av prísum á skervi:

Prísurin er roknaður við støði í teimum framleiddu mongdunum og kostnaðinum árið fyri, saman við væntaðu framleiðsluni í árinum.

Kostnaðurin er býttur upp í fastar og skiftandi (variablar) kostnaðir, íroknað fíggjarkostnaðir, (avskrivingar og renting). Teir føstu kostnaðirnir eru býttir líka út á tonsið, meðan teir skiftandi kostnaðirnir eru vektaðir í mun til talið av knúsingum

## Roknskaparávirkan Skerv-dømi

| **Omsætning** | **dkk** |
|---|---|
| SK 0-8 MM | 2.927.008 |
| SK SUG 0-4 MM | 367.975 |
| SK SUG 4-8 MM | 84.130 |
| SK SUG 8-16 MM | 147.789 |
| SK SUG 16-22 MM | 200.733 |
| SK 8-16 MM | 1.656.764 |
| SK-SUG | 38.002 |
| OS 0-75 MM | 7.094.205 |
| GR | 4.174.834 |
| Tilboðsgrót | - |
| SK 16-32 MM | 1.860.459 |
| FS 0-25 MM | 1.160.256 |
| FS 0-50 MM | 1.510.136 |
| FK 0-250 MM | 3.227.552 |
| FK 0-100 MM | 1.271.768 |
| FK SUG 0-250 MM | 6.147.144 |
| SK 16-22 MM | 203.581 |
| SK 22-75 MM | 132.995 |
| SK 0-4 MM | 61.861 |
| SK 4-12 MM | 370 |
| DUR 8-12 MM | 1.011.444 |
| DUR (8-16 MM) | 1.638.842 |
| ÚTLS 0-2 MM | 1.022.691 |
| **Total omsætning** | **35.940.540** |
| | |
| **Omkostninger** | |
| **Direkte omkostninger** | |
| Transportomkostinger | (3.427.500) |
| Løn - Direkte | (6.653.195) |
| DUR 8-12 MM | (795.785) |
| DUR (8-16 MM) | (1.501.647) |
| ÚTLS 0-2 MM | (935.234) |
| **Total direkte omkostninger** | **(13.313.361)** |
| | |
| **Dækningsgrad 1** | **22.627.179** |

| | |
|---|---|
| **Indirekte omkostninger** | |
| Løn - Felags | (1.566.839) |
| Leje af jord/stenbrud | (125.000) |
| Husleje | (164.528) |
| Reperation og vedligehold | (121.272) |
| El | (261.104) |
| Olie og andet energi til maskiner | (1.731.834) |
| Umboðan - repræsentation | (43.987) |
| Ferðing og flutningur - indenlands | (132.787) |
| Ferðing og flutningur - udenlands | (53.054) |
| Telefon | (91.715) |
| Trygging | (20.015) |
| Keyp av tænastum (edv og kunningartøkni) | (263.210) |
| Øvrige mindre omkostninger | (31.467) |
| Reservedele | (1.313.624) |
| Spreingevni og boriútgerð | (1.398.328) |
| Diverse eksterne omkostninger på 1469 | (353.088) |
| Sakkøn hjálp | (200.763) |
| Diverse eksterne omkostninger på 1479 | (147.621) |
| Farmaflutningur og lastvognskoyring | (300.000) |
| Maskinleiga | (6.604.100) |
| Diverse uforudsete omkostninger | (300.000) |
| **Total indirekte omkostninger** | **(15.224.336)** |
| **Dækningsgrad 2** | **7.402.843** |
| **Afskrivninger, renter og kapitalomkostninger** | |
| Afskrivninger | (3.027.776) |
| Kapitalomkostninger som følge af investeringer | (1.366.498) |
| Renteomkostnigner af varelagerbinding | - |
| **Dækningsgrad 3** | **3.008.569** |

Í døminum her væntast, at skervverkini fara at geva eitt yvirskot svarandi til 3 mió.kr.

## 5.4. Asfaltverkið – Hundsarabotnur

### Frágreiðing viðvíkjandi útrokningunum av asfaltprísunum:

Prísurin er roknaður við støði í prísunum á skervi og bitumen, sum eru høvuðspartar av blandingini í asfaltframleiðsluni, umframt løn í sjálvari framleiðsluni. Avskriving av sjálvum asfaltútbúnaðinum skal takast við í hesar útrokningar. Kapasitetsútreiðslurnar skulu eisini takast við í prísásetingina. Grundarlagið fyri prísásetingina er framleiðslan árið fyri og væntað framleiðsla í árinum.

## Roknskaparávirkan Asfalt- dømi

| **Omsætning** | **dkk** |
|---|---|
| OG 8 | 1.171.383 |
| AG 0-16 MM (AG 22 i prislisten) | 761.892 |
| ABO 0-8 MM | 980.319 |
| ABO 0-16 MM | 3.818.245 |
| ABT 0-4 MM | 19.539 |
| ABT 0-8 MM | 12.966.764 |
| ABT 0-16 MM | 3.347.520 |
| ABT 0-12 MM DUR 30% | 70.873 |
| ABT 0-16 MM DUR 35% | 4.136.008 |
| SMA 0-8 MM | 80.348 |
| SMA 16 DUR 55% | 7.283.965 |
| **Total omsætning** | **34.636.856** |
| | |
| **Omkostninger** | |
| **Direkte omkostninger** | |
| OG 8 | (724.001) |
| AG 0-16 MM (AG 22 i prislisten) | (462.403) |
| ABO 0-8 MM | (623.601) |
| ABO 0-16 MM | (2.410.367) |
| ABT 0-4 MM | (12.896) |
| ABT 0-8 MM | (8.398.775) |
| ABT 0-16 MM | (2.129.426) |
| ABT 0-12 MM DUR 30% | (46.092) |
| ABT 0-16 MM DUR 35% | (2.681.717) |
| SMA 0-8 MM | (54.272) |
| SMA 16 DUR 55% | (4.914.828) |
| **Total direkte omkostninger** | **(22.458.378)** |
| | |
| **Dækningsgrad 1** | **12.178.479** |

| | |
|---|---|
| **Indirekte omkostninger** | |
| Løn - Direkte | (1.075.417) |
| Løn - Felags | (1.564.369) |
| Husleje | (164.632) |
| Reperation og vedligehold | (497.168) |
| El | (554.771) |
| Olie og andet energi til maskiner | (1.862.900) |
| Umboðan - repræsentation | (39.243) |
| Ferðing og flutningur - indenlands | (17.532) |
| Ferðing og flutningur - udenlands | (33.115) |
| Telefon | (36.791) |
| Trygging | (108.533) |
| Keyp av tænastum (edv og kunningartøkni) | (236.527) |
| Øvrige mindre omkostninger | (4.680) |
| Reservedele | (233.602) |
| Diverse eksterne omkostninger på 1469 | (446.303) |
| Diverse uforudsete omkostninger | (300.000) |
| Sakkøn hjálp | (48.704) |
| Diverse eksterne omkostninger på 1479 | (34.662) |
| Farmaflutningur og lastvognskoyring | - |
| Maskinleiga | (104.582) |
| **Total indirekte omkostninger** | **(7.363.528)** |
| **Dækningsgrad 2** | **4.814.951** |
| **Afskrivninger, renter og kapitalomkostninger** | |
| Afskrivninger | (983.699) |
| Kapitalomkostninger som følge af investeringer | (498.051) |
| Renteomkostnigner af varelagerbinding | (140.000) |
| **Dækningsgrad 3** | **3.193.201** |

Í døminum omanfyri væntast asfaltverkið at geva eitt yvirskot svarandi til 3 mió. kr.

## 5.5. Verkætlanir: Lønarútreiðslur innanhýsis/uttanhýsis

Av samlaðu játtanini til løgur, ið Landsverk varðar av, verður ein partur goldin til Landsverk. Niðanfyri er gjørd ein lýsing av, hvussu nógvur peningur av einari verkætlan fer til Landsverk, og hvat verður goldið til uttanhýsis ráðgevar, ið veita tænastur so sum prosjektering, gransking og eftirlit.

Kostnaðir til einstøku verkætlanirnar fella ymiskt yvir tíðarskeiðið í livitíðini hjá verkætlanini. Í fyrru helvt av verkætlanini, áðrenn farið verður undir sjálva byggingina, fer størsti parturin av útreiðslunum til prosjektering, gransking o.l. Tá liðugt er at tekna og fyrireika, byrjar byggingin. Tá fer størsti parturin av útreiðslunum til tilfar og lønir til arbeiðstakara.

Víst verður her á tvær talvur. Eina, har hugt verður eftir býtinum á stovnsnummur, og eina, har hugt verður eftir útrvaldum lidnum verkætlanum.  Styrkin við at hyggja á stovnnummur er, at tú fær allar verkætlanir við – bæði smáar og stórar og fáa eitt umboðandi miðal. Eisini fæst eina hóming av, at tað er munur á, hvat slag av verkætlan talan er um. Vansin er tó, at ”hálvar” verkætlanir eisini eru íroknaðar.

Seinna talvan vísir stórar lidnar verkætlanir frá 2006 og frameftir. Styrkin við hesum er, at ein fær eina heilt rætta mynd, men bert av hesum útvaldu verkætlanum. Veikleikin er hinvegin, at hetta sigur møguliga minni um miðal.

### TALVA 1: Innanh. lønir frá 2006 til og við 2013

| Stovnsnummur | Kostnaður í t.kr. | Innanhýsis lønir í t.kr. | Eksternir ráðgevar t.kr. | %-vísi parturin av innanhýsis lønum í mun útreiðslurnar | %-vísi parturin til ektrenari ráðgeving |
|---|---|---|---|---|---|
| Nýggir landsvegir | 489.448 | 7.227 | 22.460 | 1,5% | 4,6% |
| Studentaskúlin og HF skeið í Eysturoynni | 2.023 | 383 | 1.578 | 18,9% | 78,0% |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 9.819 | 334 | 94 | 3,4% | 1,0% |
| Bústovnar | 81.291 | 2.989 | 15.813 | 3,7% | 19,5% |
| Fiskivinnuskúlin í Vestmanna | 35.150 | 167 | 4.755 | 0,5% | 13,5% |
| Skúladepilin í Suðuroy (HOV) | 97.323 | 511 | 9.624 | 0,5% | 9,9% |
| Skúladepilin við Marknagilsvegin | 97.988 | 5.358 | 47.570 | 5,5% | 48,5% |
| Landssjúkrahúsið | 233.501 | 4.007 | 37.690 | 1,7% | 16,1% |
| Umbygging í Tinganesi | 14.064 | 350 | 2.638 | 2,5% | 18,8% |
| Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni | 25.689 | 159 | 6.575 | 0,6% | 25,6% |
| Havnir | 14.727 | 104 | 161 | 0,7% | 1,1% |
| Studentaskúlin í Hoydølum | 24.811 | 513 | 607 | 2,1% | 2,4% |
| Tekniski skúlin í Klaksvík | 21.724 | 608 | 6.149 | 2,8% | 28,3% |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 8.669 | 278 | 536 | 3,2% | 6,2% |
| Ítróttarhøllin á Sandi | 28.318 | 663 | 3.027 | 2,3% | 10,7% |
| Umvæling av almennum bygingum | 103.874 | 7.328 | 6.228 | 7,1% | 6,0% |
| **Samlað fyri allar íløgur** | **1.288.419** | **30.979** | **165.505** | **2,4%** | **12,8%** |

### Talva 1

Talvan vísir partvísa býtið millum tað, ið verður goldið til innanhýsis lønir hjá Landsverki ísv. verkætlanir og tað, ið verður goldið til uttanhýsis ráðgevar til prosjektering, eftirlit o.a. Havast skal í huga, at hugt verður eftir hesum tølum yvir tíðarskeiðið 2006-2013 á stovnsnummur 1. Talan er um fleiri verkætlanir, sum eru lidnar og aðrar, sum bert eru komnar nakað ávegis. Kortini verður mett, at tað gevur eina greiða mynd av býtinum – tó við undantøkum.

Kostnaðurin til ráðgevarafunktiónina er lutfalsliga minni, tá talan er um vegagerð, meðan umbyggingar, har óvissur náttúrliga eru í verkætlanum av hesum slagi, eru útreiðslurnar til samlaða ráðgevarapartin størri. Í Marknagilsverkætlanini sæst, at ráðgevingin framvegis er stórur partur av verkætlanarútreiðslunum. Hetta kemst av, at byggingin ikki er komin so langt. Studentaskúlin í Eysturoy er júst byrjaður, tí eru nærum bert prosjekteringsútreiðslur skrásettar higartil. Á Suðuroyar Sjúkrahúsi var stórur partur av prosjekteringsútreiðslunum avhildnar, áðrenn Landsverk fekk ræðisrættin. Tí tann lága samlaða innan og uttanhýsis partin. Samanumtikið er samlaði parturin, ið fer til Landsverk 2.4%, meðan ráðgevaraparturin er 12,8%.

### TALVA 2: Lidnar verkætl.

| **Verkætlan og heiti** | **Kostnaður í t.kr.** | **Innanhýsis lønir í t.kr.** | **Eksternir ráðgevar t.kr.** | **%-vísi parturin av innanhýsis lønum í mun útreiðslur** | **%-vísi parturin til uttanhýsis ráðgeving** |
|---|---|---|---|---|---|
| 5013 Skálabotn-Strendur | 40.664 | 90 | 1.243 | 0,2% | 3,1% |
| 5181 Rituvíkarvegurin | 15.860 | 636 | 968 | 4,0% | 6,1% |
| 5187 Leirvíksvegurin | 48.936 | 1.144 | 5.596 | 2,3% | 11,4% |
| 5008 Øravík-Hov | 144.593 | 389 | 6.149 | 0,3% | 4,3% |
| 5140 Økisdepil í Suðri, Sinnisveik | 32.639 | 799 | 4.198 | 2,4% | 12,9% |
| 5165 Autistaheim í Klaksvík | 6.735 | 262 | 343 | 3,9% | 5,1% |
| 5252 Sambýli til sálarsjúk Tórshavn | 19.053 | 792 | 1.785 | 4,2% | 9,4% |
| 5198 Ítróttarhøllin á Sandi | 28.306 | 692 | 3.052 | 2,4% | 10,8% |
| 5180 Brúgvin um Streymin | 14.033 | 81 | 213 | 0,6% | 1,5% |
| **Samlað fyri allar íløgur** | **350.819** | **4.885** | **23.547** | **1,4%** | **6,7%** |

[1] Orsøkin til at just hettar tíðarskeiðið er valt, kemst av at vit bert hava sambærlig tøl aftur til 2006

**Talva 2**

Talvan vísir, sum hin talvan,  partvísa býtið millum tað, sum verður goldið til innanhýsis lønir hjá Landsverki ísv. verkætlanir og tað, ið verður goldið til uttanhýsis ráðgevarar til prosjektering, eftirlit o.a. Hugt verður eftir einstøkum størri lidnum verkætlanum.

Samanumtikið vísir talva 2, at fyri stórar lidnar verkætlanir, ið eru umboðandi, er parturin hjá Landsverki 1,6% og uttanhýsis parturin er 6,7%.

# Fylgiskjal 1:

## Virkisøkið stovnsins, virðisgrundarlag og fokusøkir

Høvuðssætið er í Tórshavn. Átta vegastøðir eru kring landið, umframt tríggjar smiðjur, eitt asfaltverk, fýra grót- og skervverk, ein bitumengoymsla og ein saltgoymsla. Stovnurin bæði framleiðir og selir asfalt og skerv.

Landsverk hevur um hendi vega-, havna- og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar, tyrlupallar og økið kring flogvøllin.

Landsverk er tøkniligur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum og tekur sær av:

- At reka og umsita samferðslukervið á landi og gera framtíðarætlanir fyri samferðslukervið
- At kanna og gera ætlanir um framtíðar samferðslukervið
- At hava eina tilbúgving í sambandi við oljudálking á sjónum
- At kanna og gera ætlanir um flogvallaviðurskifti í Føroyum
- At framleiða skerv og asfalt til egið brúk og til privata nýtslu, umframt at reka og viðlíkahalda rakstrargøgnini hjá Landsverki
- At halda samferðsluhavnir, sum eru ogn hjá landinum
- At ISPS- góðkenna havnir
- At ráðgeva landsins ráðum ísv. planlegging, bygging og fyrisiting innan bygging
- At umsita leigusáttmálar fyri leigumál hjá tí almenna
- At hava byggi- og bygningaumsiting landsins um hendi,
- At standa fyri allari nýbygging av almennum bygningum og vegum hjá landinum
- At umsita landsins skyldur í mun til lendislýsing og skráseting.
- Ymsum øðrum tøkniligum málum fyri land og kommunur

## Visjón, missión og virðir

### Missión

Landsverk byggir, viðlíkaheldur og umsitur almennar bygningar og samferðslukervið í Føroyum. Landsverk langtíðarplanleggur og tryggjar fakliga grundaðar og óheftar loysnir. Landsverk skapar haldgóðar loysnir og tryggjar varandi virðir innan almenna infrakervið og bygningar, og veitir tænastur innan grót, skerv og asfalt. Alt hetta ger Landsverk fyri borgara, myndugleika og vinnulív.

### Visjón

Landsverk vil ganga á odda og gera sítt til at skapa fortreytir fyri einum betri samfelagi at búleikast í. Føroyar skulu kennast sum *ein* býur,(ein eind) har tað er gott og trygt hjá borgara og vinnulívi at búgva, virka og ferðast, og har karmarnir um alment virksemi og tænastur eru vælvirkandi.

## Kjarnuvirðir: Ábyrgdarfull – Framsøkin – Samstarvandi – Virðilig - Óheft

Kjarnuvirðini ábyrgdarfull, framsøkin, samstarvandi, virðilig og óheft eru virðir, sum longu eru partur av virkismentanini á Landsverki. Hetta eru livandi, virkin virðir, sum í dagliga arbeiðinum hjá tí einstaka starvsfólkinum og í samstarvinum við onnur altíð liggja til grund fyri, hvussu vit á Landsverki hugsa, uppføra okkum og arbeiða.

## Fokusøkir

### 1. Fakliga framsøkið Landsverki

Landsverk hevur fakkunnleikan og vil vera í *front* við at vísa á loysnir og ætlanir innan tey økir, sum stovnurin varðar av, og Landsverk virkar óheft í allari sínari fakligu ráðgeving.

### 2. Effektivt hugsandi Landsverk

Við virðing fyri uppgávuni, málinum og pengunum, vil Landsverk stýra effektivt. Tey røttu fólkini skulu nýtast til røttu uppgávurnar. Dentur verður lagdur á gjøgnumskygni í allari fyrisitingini eftir galdandi reglum, og øll á Landsverki skulu fyrisita eins.

### 3. Trygdartilvitað Landsverk

Alt kann gerast tryggari, og tað vil Landsverk vísa í verki. Allar uppgávur, sum Landsverk loysir, skulu hava trygd við sum eitt týðandi fokusøki. Alt tað, sum Landsverk ger, skal gerast við trygdini og tryggleika fremst í huga. Bæði tá tað snýr seg um starvsfólk og borgaran.

### 4. Samstarvsmennandi Landsverk

Fyri at gerast enn betur, er neyðugt við øktum samstarvi við allar partar. Landsverk skal hava eina aktiva rødd í føroyska samfelagnum og vera ein nattúrligur samstarvsfelagi at velja. Landsverk vil finna bestu loysnirnar fyri samfelagið. Hetta merkir, at vit eru opin fyri tí góða hugskotinum.

### 5. Aktivt samskiftandi Landsverk

Fyri Landsverk er samskifti ein fortreyt fyri framburði og ein fortreyt fyri, at stovnurin kann fáa ávirkan. Tætt og gott samskifti er ein av fortreytunum fyri, at Landsverk framhaldandi kann virka sum ein virðisøkjandi aktørur í føroyska samfelagnum. Rætt samskifti tryggjar eina felags fatan av málum, ætlanum og arbeiðshættum, er virðiligt og tekur støði í ymiskleikanum hjá hvørjum einstøkum móttakara.

# Fylgiskjal 2:

## Lýsing av tilgongdini í eini byggiverkætlan

Fyrireiking og prosjektering ísv. eina byggiverkætlan, t.e. tað arbeiðið, sum skal gerast, áðrenn eitt byggiarbeiði kann setast í gongd, kann býtast upp í 6 fasur. Landsverk er byggiharri og stýrir gongdini.

**Uppgávur** **Fasur** **Heimild**




Játtan frá ráði at gera byggiskrá

Verklagslóg fyri Løgtingið. Kostnaður upplýstur við ávísari óvissu

Fasa 2 – 6 verða bodnar út til ráðgeva ísv. prosjektering og uppfylging.

Staðfesting av verklagslóg í Løgtingið, um kostnaður er omanfyri upplýsta óvissu

Prosjektuppfylging er, meðan bygt verður.

Fakeftirlit verður boðið út

### Áðrenn prosjekttilgongdin byrjar

Framman fyri hesar fasurnar 1-6, sum eru lýstar í mynd 1, er eitt samskifti millum byggiánara og byggiharra, har innleiðandi grundarlag/hugskot og tørvur verða umrødd. Hetta verður ofta nevnt hugskotsfasan. Hetta er á einum yvirskipaðum støði, og er mest at skilja sum ein tillaging av væntanum til eina møguliga verkætlan millum hesar báðar.

Í hesi fasuni verður ætlanin bíløgd, og skal verða so mikið væl lýst frá bíleggjara, at bygginevndin kann gera krøv/ynski greið til at fara undir byggiskrá. Hetta merkir, at her skal játtan vera tøk til at gera byggiskrá.

### Ad.1 BYGGISKRÁ

Byggiskráin er ein lýsing av krøvum, ynskjum og tørvi hjá brúkaranum og ánaranum.

Landsverk metir arbeiðið at tilevna eina byggiskrá sum eitt serskilt arbeiði, ið kann hugsast avgreitt, áðrenn farið verið undir at samstarva við ráðgeva um prosjektering.

### Innihald

Byggiskráin er skjalið, ið lýsir tørv og raðfestingar hjá byggiánaranum.

Byggiskráin er tískil ikki ein partur av prosjekteringini, men meira eitt amboð, ið byggiharri og ráðgevar brúka til at tryggja, at ynskini hjá byggiánara verða framd. Byggiskráin er grundarlagið fyri útbjóðing av ráðgevingini til prosjektering. Greiningarstøðið á byggiskránni verður tillagað til slagið av verkætlan.

## Ad. 2 SKIPANARUPPSKOT

Skipanaruppskotið er fyrsta tekniuppskot fram móti eini loysn, grundað á eina frammanundan góðkenda byggiskrá.

### Innihald

Skipanaruppskotið er ein greining av fortreytunum undir uppskotinum, t.e. byggilistarliga hugskotið, funktiónir, umhvørvið, og herundir yvirskipað uppskot til tilfarsval, konstruktións- og installatiónsprinsippir. Støðutakan til rakstur og viðlíkahald.

Tíðarætlan, sum lýsir prosjektering, útboð og útinnan.

Kostnaðarmeting grundað á mettar $m^2$- og $m^3$ prísir við einum neyvleika á o.u 75%.

## Ad. 3 PROSJEKTUPPSKOT

Projektuppskotið er eitt víðariført tekniuppskot, grundað á góðkenda skipanaruppskotið, har allir tær fyri verkætlanina bindandi avgerðirnar eru viðgjørdar.

### Innihald

Prosjektuppskotið er grundarlagið hjá byggiharra og ánara fyri at taka avgerð um loysn av byggilist, funktionaliteti, tekniskum og fíggjarligum loysnum. Rakstur og viðlíkahald eru somuleiðis loyst á einum prinsippiellum støði.

Dagførd tíðarætlan, sum lýsir prosjektering, útboð og útinnan.

Kostnaðarmeting, ið er grundað á mettar $m^2$- og $m^3$ prísir við einum neyvleika á o.u 85%.

Henda kostnaðarmetingin er grundarlagi undir endaligu støðutakanini um fíggjarprofilin í verkætlanini.

## Ad. 4 FORPROSJEKT

Forprosjektið (eisini nevnt myndugleikaprosjekt) er eitt víðariført tekniuppskot, grundað á

góðkenda prosjektuppskotið, har allar tær fyri verkætlanina viðkomandi avgerðirnar eru viðgjørdar á einum slíkum støði, at tær kunna gerast grundarlag fyri myndugleikaviðgerð.

### Innihald

Forprosjektið gerst sostatt ein integreraður partur av høvuðsprojektinum í sambandi við myndugleikaviðgerðina. Støða er tikin til byggilist, uttanumumhvørvi, val av konstruktiónum, tilfarsval og tekniskum installatiónum.

Í hesum partinum verður tíðarætlanin dagførd sambært teirri vitan, ið nú fyriliggur. Ein kostnaðarmeting er á hesum støði grundað á ein neyvleika á o.u. 90%.

## Ad. 5 HØVUÐSPROSJEKT

Høvuðsprojektið greiðir tilfarið á einum slíkum støði, at tað gerst grundarlag fyri endaligum byggiloyvi, útboði, sáttmálasamráðingum við arbeiðstakara og endaliga útinnan.

### Innihald

Høvuðsprojektið er grundarlagið fyri útboði og útinnan av arbeiðum. Harumframt eisini seta krøv til greining av arbeiðstøkunum við atliti at framtíðarrakstri og viðlíkahaldi.

Í hesum partinum verður ein neyvari útgreinað tíðarætlan dagførd sambært teirri vitan, ið nú fyriliggur.

Út frá teimum fortreytunum, ið fyriliggja og nú eru innarbeiddar í høvuðsprojektið, kunnleika til vinnuna og búskaparstøðuna, verður ein greinað kostnaðarmeting innan fyri verandi fíggjarkarm gjørd.

Verkætlanin skal verða tillagað, soleiðis at kostnaðarmetingin er í samljóði við kostnaðarmetingina í prosjektuppskotinum, um onki annað er avtalað.

Verkætlanin verður boðin út, og lisitatión hildin. Sáttmálar verða skrivaðir við arbeiðstakarar

## Ad. 6 PROSJEKTUPPFYLGING

Prosjektuppfylging skal ráðgevin, ið hevur prosjekterað taka sær av. T.e. at rætta projektið upp, greina og tillaga tað, meðan bygt verður. Harafturat skal hann tryggja, at verkætlanin verður framd sambært teimum tankum, ynskjum og visiónum, ið upprunaliga var avtalað við byggiánaran.

Ráðgevin skal her lata stuðul til allar neyðugar tillagingar til tíðarætlanina innan fyri avtalaða tíðarkarmin.
Ráðgevin skal her lata stuðul til allar neyðugar tillagingar til verkætlanina innan fyri avtalaða fíggjarkarmin.

# Fylgiskjal 3:

## Vegleiðing ísv. útbjóðing – verkætlanarleistur




## Meginreglur í sambandi við útbjóðing

### Hvat er ein útbjóðingarpolitikkur?

Útbjóðingarpolitikkur Landsverks eru leiðreglur fyri tilgongdina, tá útbjóðingar verða framdar, og fyri, hvussu spurningar av prinsippiellum týdningi í tí sambandi skulu greiðast.

### Gildisøki

Hesin útbjóðingarpolitikkur er galdandi fyri allar byggiuppgávur og hartil hoyrandi veitingar, ið Landsverk er byggiharri fyri.

Endamálið við útbjóðingarpolitikki Landsverks er at áseta karmar og leiðreglur, ið tryggja byggiharranum bestu loysnirnar í mun til góðsku, kostnað og givnar karmar annars. Politikkurin skal tryggja, at avgerðin um útbjóðing verður tikin á einum skikkaðum grundarlagi, at góðskan á útbjóðingartilfarinum er í lagi, og at røttu persónarnir verða tiknir við í tilgongdina. Eisini skal hesin politikkur tryggja, at rætt verður farið fram í tilgongdini, herundir at allir luttakarar fáa eins viðgerð.

### Hvat er ein útbjóðing?

Ein útbjóðing er at skilja sum ein áheitan frá einum byggiharra um at fáa tilboð upp á eina veiting.
Sambært lisitatiónslógini (sitat):

- Sum útbjóðing eftir hesi lóg er at skilja, at arbeiðir ella veitingar verða bodnar út soleiðis, at fleiri, innan somu tíðarfreist og við sama útbjóðingartilfari sum grundarlag, kunnu geva bindandi, skrivlig boð, og soleiðis at tað í útbjóðingini verður upplýst, at eisini aðrir hava fingið høvi at bjóða (løgtingslóg nr. 106 frá 15.11.1984 um útbjóðing v.m., §2, stk. 1)

### Útbjóðingartilgongdin

Útbjóðingartilgongdin er sett saman av tveimum pørtum:
Fyrri partur er at skilja sum fremjan av eini útbjóðingartilgongd eftir galdandi útbjóðingarreglum, har Landsverk í útbjóðingartilfarinum lýsir tær veitingar, ið skulu avgreiðast og avhendast, og tey krøv til veitaran, ið verða løgd til grund fyri tilboðini, ið biðið verður um. Fyrri parturin endar við sjálvari lisitatiónini. Seinni partur av tilgongdini er viðgerð av innkomnum tilboðum, sáttmálasamráðingar og gerð av sáttmálum.

### Hví bjóða vit út?

Útbjóðing er ikki eitt mál í sær sjálvum, men er eitt amboð til at tryggja eina sunna kapping, soleiðis at brúkarin fær eina optimala loysn, sæð frá einum heildarsjónarmiði.

Við at bjóða út tryggja vit okkum lægst møguligan kostnað, við størst møguligari kapping. Grundarlagið fyri at meta um endaliga kostnaðin verður betri, og eins viðferð av luttakarunum verður tryggjað. Í sambandi við ráðgevarauppgávur tryggja vit okkum í eini serligari útbjóðingartilgongd, at ráðgevarnir hava neyðuga førleikan at loysa uppgávuna.

### Hvat bjóða vit út?

Sum meginregla verða allar veitingar í einari byggiverkætlan bodnar út, burtursæð frá sjálvum byggiharraleiklutinum. Tó verða undantøk gjørd frá hesari meginreglu. Undantøkini eru m.o.

- Eingin ella ov lítil kapping
- Ætlanin er ov lítil til, at útbjóðing gevur nakran fyrimun
- Veitingin er ein byggiharraveiting, um mett verður, at hetta er til fyrimuns fyri verkætlanina
- Torført er frammanundan at definera og/ella prísseta veitingina, eitt nú tá talan er um torgreidd umbyggingararbeiðir

Myndin vísir gongdina ísv bygging. Landsverk tekur sær av pørtunum sum eru ífyltir, restin verður í høvuðsheitum útveitt.

**Hvussu bjóða vit út?**

Fyri at fáa so góð úrslit, sum gjørligt, skulu útbjóðingar fyrireikast og fremjast á ein slíkan hátt, at útbjóðingartilfarið er nøktandi og greitt lýsir tey krøv, eitt nú til góðsku og kostnað, ið sett verða til veitingina. Skilt verður ímillum útbjóðing av **ráðgevaraveitingum** og útbjóðing av **arbeiðstakaraveitingum**. Somuleiðis verður skilt ímillum uttanhýsis og innanhýsis veitingar. Útbjóðingarhættir verða lýstir aðra staðni í hesum uppriti.




Ikki altíð útveit

Ikki bjóða út

Verður bjóða út

### Metingarfrymil

Áðrenn ein ráðgevaraveiting verður boðin út, verður gjørdur ein metingarfrymil, (smb værdibyg) ið er at skilja sum ein frágreiðing um, hvørji kriteriir verða løgd til grund fyri metingina um, hvør eigur besta tilboðið, og ein innanhýsis raðfesting av hesum kriterium, soleiðis at virðini av loysnum kunnu lýsast við tølum. Harvið fæst ein eintýðug raðfesting av innkomnum loysnum og tilboðum.

Sami framferðarháttur verður nýttur, tá talan er um undangóðkenningar av ráðgevarum og/ella arbeiðstakarum. Í tí seinna førinum er kostnaðurin tó ikki eitt kriterium í undangóðkenningartilgondini.

### Ráðgevaraveitingar

Veitingarnar verða býttar upp í hesar flokkar:

- Forkanningar og annað fyrireikandi arbeiði
- Programmering/byggiskráir
- Projektering og projektuppfylging
- Projekteringsleiðsla
- Fakeftirlit
- Byggileiðsla
- Serlig ráðgeving

*Forkanningar og annað fyrireikandi arbeiði*

Eru veitingarnar ikki egnaðar til útbjóðing, eitt nú tí at torført er at definera hesar nóg neyvt frammanundan, verður arbeiðið gjørt sum rokningsarbeiði. Ein tímatakstur verður avtalaður, og ein kvalifiserað meting verður gjørd av samlaðu tímanýtsluni. Avtalast skal eitt størst loyvda frávik frá metingini, sum er bindandi uttan so, at fortreytirnar verða broyttar, ella onnur serlig viðurskiftir gera seg galdandi. Miðast skal tó altíð ímóti at fáa avtalu um fastan prís.

*Programmering/byggiskráir*

Byggiskráir eru grundleggjandi ynski og krøv frá ánara til byggingina. Sum meginregla ger Landsverk byggiskráir innanhýsis, fyri at tryggja at fastur frymil verður brúktur, og at ánarin fær síni ynski uppfylt.

Um Landsverk ikki hevur neyðuga arbeiðsorku til at skriva byggiskrá, skulu tvey tilboð innheintast í undirhondsboð. Tilboðini skulu innihalda eina frágreiðing um, hvussu uppgávan verður loyst, og eina tíðarætlan fyri fundir og týðandi deadlines. Frágreiðingin skal saman við kostnaðinum og møguligum øðrum kriterium takast við í metingina um, hvør eigur besta boðið. Alternativt kann programmeringin gerast í rokning eftir somu leiðreglum sum forkanningar og annað fyrireikandi arbeiði. Landsverk fylgir tilgongdini og tryggjar at fasti frymilin verður fylgdur.

*Prosjektering, prosjektuppfylging og prosjekteringarleiðsla*

Sum meginregla verður prosjekteringin bjóðað út alment.
Í serligum førum verður bjóðað út í innbodna lisitatión, møguliga aftan á eina alment innbodna prekvalifikatión, eitt nú um verkætlanin er so stór, at projekteringin krevur serliga stóra manning, ella um verkætlanin krevur fakliga vitan og royndir av serligum slag.

Víkjast kann frá meginregluni og biðjast kann um undirhondsboð um t.d. talan er um smáar ráðgevarauppgávur, ella tá tað er neyðugt vegna tíðarneyð.

Í hvørjum einstøkum føri skal út frá galdandi umstøðum metast um, hvørt projekteringin eigur at bjóðast út sum heildarráðgeving ella sum sundurbýtt ráðgeving.
Verður projekteringin bjóðað út sum sundurbýtt ráðgeving, eiga allir tilboðsgevararnir at fáa møguleika til at bjóða upp á projekteringsleiðsluna sum eina sjálvstøðuga veiting, soleiðis at tað stendur byggiharranum frítt í at velja, hvør fær ta uppgávuna.
Projekteringin skal vera uppdeild í fasur, og tilboðini skulu innihalda fasuuppdeilda tíðarætlan og kostnað fyri hvørja einstaka fasu.

Tilboðini verða mett eftir teimum tillutingarkriterium, sum ásett eru í útbjóðingartilfarinum. Hesi kriteriir skulu nýtast til at gera eina heildarmeting um, hvør tilboðsgevari eigur besta boð. Umframt kostnað kann talan verða um fakligan kunnleika, royndir, álitsemi, fíggjarliga orku, manning v.m. Projekteringsleiðsla kann bjóðast út fyri seg, um tað verður hildið verða til fyrimuns fyri tilgongdina.

*Fakeftirlit*
Fakeftirlitið kann verða útbjóðað saman við projekteringini og verður tá útint av somu fyritøku(m), sum projekterar. Men um tað verður mett at verða mest gagnligt fyri verkætlanina, kann fakeftirlitið bjóðast út fyri seg. Útbjóðingin fylgir tá somu leiðreglum, sum eru galdandi fyri útbjóðing av projektering, projektuppfylging og projekteringsleiðslu.

*Byggileiðsla*
Mett verður í hvørjum einstøkum føri um, um byggleiðslan skal bjóðast út ella um Landsverk skal standa fyri uppgávuni. Støða verður tikin út frá fakligum førleika, og mettum fyrimunum og vansum annars. Tá ið talan er um høvuðsarbeiðstøkur hevur høvuðsarbeiðstakari byggileiðsluna, og Landsverk yvirskipaðu leiðsluna í sambandi við bygging. Tá ið talan er um fakarbeiðstøkur verður mett um hvørt Landsverk skal standa fyri byggileiðsluni ella um hon verður boðin út.

Útbjóðingin fylgir tá somu leiðreglum, sum eru galdandi fyri útbjóðing av projektering, projektuppfylging og projekteringsleiðslu. Tá ið talan er um smáar verkætlanir, har tað ikki verður mett at vera til fyrimuns, at ymisku veitingarnar verða býttar til fleiri partar, kann byggileiðslan veitast av somu ráðgevarafyritøku, sum projekterar og møguliga hevur fakeftirlitið um hendi. Tó skal tryggjast at byggileiðslan er óheft av projekteringsleiðara og fakeftirliti. Í serligum førum kann byggileiðslan bjóðast út í almenna lisitatión. Sum meginregla verður hon útbjóðað í innbodnari lisitatión, ella biðið verður um undirhondsboð. Minstakrav um fakligan førleika og viðkomandi royndir eiga at setast til tann ella teir persónar, ið settir verða at røkja uppgávuna.

*Serlig ráðgeving*
Í teimum førum, har serlig ráðgeving er neyðug, er meginreglan tann, at serligi ráðgevarin er undirráðgevari hjá høvuðsráðgevaranum. Undantøk kunnu tó gerast, har byggiharrin ger seravtalu við viðkomandi ráðgevara, og sum meginregla skal kostnaðurin fyri ráðgevingina tá avtalast frammanundan.

**Vegleiðing frá Bygherreforeningen ísv útboð**

vegleiðing hjá Bygherreforeningen ísv útbjóðing

indkøbs og udbudsstrategier

Meginregla er at alt arbeiðið verður boðið út. Mett verður um í hvørjum einstøkum føri hvat slag av útboðið er best hóskandi. T.d. almenn, innboðin kapping ella undirhondsboð.

**Ráðgeving**

Ráðgeving verður boðið út smb. værdibyg leistinum. Leisturin dømast skal eftir skal javnan eftirmetast og dagførast. Støða verður við atliti av verkætlan tikin til, um talan verður um kapping, undirhondsboð, innboðin tilboð ella alment útboð. Ráðgevi skal hava nøktandi tíð at gera tilboð, men hugsast skal eisini um, at ikki ov long tíð skal vera til tað.

Í sambandi við kapping er tað vanligt, at ráðgevarar streingja seg eyka, og brúka alla tíðina teir hava tøka, næstan óansæð hvussu long tíðin er. Tað kann tískil gerast óneyðuga kostnaðarmikið fyri ráðgeva um hann hevur ov góða tíð.

Dómsnevnd verður sett at døma innkomin tilboð, øll innkomnu tilboðini skulu kannast og dømast samanhangandi, frágreiðing skal lýsa í karakterskjalið hvat orsøkin er til høgan ella lágan karakter..

1 umboð fyri hvørja yrkisgrein Arkitekt, verkfrøðingar og byggifrøðingar situr í dómsnevndini.

Vinnari av kappingini skal finnast skjótast til ber, og boðini sendast skrivliga til allar luttakararnar alt fyri eitt vinnarin er funnin.

## Dømi um útbjóðingarskriv

Til

Tórshavn xx.xx.20xx

xxxxx
xxxxxx
xxxxxx
xxxx
xxxxx

**Útbjóðingarbræv viðv. xxxxxxxxxxxx í xxxxxxxxx**

Vegna xxxxráðið bjóðar Landsverk hervið ráðgevingina í sambandi við xxxxxxxxxxx í xxxxxxx út í heildarráðgeving.

**Útbjóðingartilfarið inniheldur:**

- Hetta útbjóðingarskriv
- Møgulig rættingarskriv
- Byggiskrá
- Tekningar yvir xxxxxxxxxx smb. Tekningarlista

Samlaði fíggjarkarmurin til verkætlanina er xx,x mió.

Av samlaða fíggjarkarminum eru xx,x mió. kr. avsettar til samlaðar handverkaraútreiðslur, forkanningar og prosjektering.

Prosjektering byrjar beinanvegin sáttmáli er skrivaður. Prosjekt skal vera klárt til útboð í xxxx xxxx. Byggingin skal vera liðug xxxx í 20xx. Prosjektinnihald skal vera smb Ydelsesbeskrivelsen 2012, umframt nøgdarlista til útboð, og som udført tekningum smb. ydelsesbeskrivelse for ”som udført”. Prosjekterast skal í 3D. Arkitekta og konstruktiónsprosjekt skulu gerast í Revit.

Onnur fak skulu prosjekterast í Revit ella í 3d forriti, ið kann koyra saman við Revit.
Endaliga prosjektið skal handast byggiharranum í Revit, umframt eisini í Pdf.

Øll virki í ráðgevaratoyminum skulu vera skrásett í Føroyum og hava føroyskt vinnutal.
Hvør fasa skal granskast internt í ráðgevarabólkinum, og skulu øll fak verða samskipað áðrenn hon verður handað byggiharranum. Hvør fasa skal góðkennast av byggiharranum áðrenn farið verður víðari við projekteringini.

**Útboðsgrundarlag:** Almindelige bestemmelser for teknisk rådgivning og bistand (ABR89) við ískoytum, sum semja kann fáast um.

Ydelsesbeskrivelsen, Byggeri og planlægning, FRI og DANSKE ARK dec. 2009 (B&P).
Ydelsesbeskrivelse for “som udført”.
Verkætlanin verður væntandi boðin út alment í xxxxxxxarbeiðstøkum.
Støða er ikki tikin til hvørt fakeftirlitið verður boðið út.

x ráðgevaravirki fáa høvi at bjóða uppá hetta arbeiðið.

Víst verður til “Værdiskabende byggeproces”, sum vegleiðing til døming av tilboðunum.
www.vaerdibyg.dk

## Tilboð frá ráðgevum verða dømd eftir niðanfyristandandi leisti:

| Pkt | Evni | Við í tilboðnum skulu hesir høvuðsbólkar lýsast | Vekting |
|---|---|---|---|
| 1 | Yvirskipað | Fremjan av verkætlanini, herundir eisini tíðarætlan.<br>Manning við lívsgongdarlýsing, royndum, skipan og ábyrgdarbýti.<br>Yvirlit yvir byggiverkætlanir ráðgevaravirkið hevur luttikið í.<br>Frágreiðing um KT-útbúnað, skipanir og royndir.<br>Skjalprógv fyri ráðgevaratrygging. | 30% |
| 2 | Loysn av uppgávuni | Frágreiðing um:<br>Hvussu henda uppgávan verður loyst yvirskipað<br>Hvørji evni verða roknað sum stýrandi.<br>Hvørjar avbjóðingar/vandar sær ráðgevin í mun til hesa verkætlanina.<br>Hvussu verður projekteringin góðskutryggjað<br>Hvussu verður projekteringin skipað<br>Hvussu kann góðskustýring fremjast undir útinning av bygginigini<br>Hvussu verður talgilda projekteringin framd og skipað. | 30% |
| 3 | Prís<br><br>Tilboðið skal gevast við føstum prísi. | Tilboðslisti<br><br>Prísir skulu útgreinast í fasur fyri ráðgevar,  soleiðis at kostnaðurin fyri hvørt fak er sjónligt fyri hvørja fasu.<br><br>Tilboðið skal eisini innihalda prís fyri projekteringsleiðslu og skipan av talgildari projektering | 40% |

Fyri at tryggja, at metingin av pkt. 1 og 2 er óheft i mun til 3, skulu tilboðini latast inn í 2 brævbjálvum.

Brævbjálvi 1 inniheldur pkt. 1 og 2.
Brævbjálvi 2 inniheldur pkt. 3.

Møguligir spurningar til útbjóðingina skulu sendast xxxxxxx hjá Landsverki í seinasta lagi xx.xx.20xx.
Svar uppá spurningar verða send í seinasta lagi xx.xx.20xx.

Tilboð (við brævbjálva 1 og brævbjálva 2)  skulu handast Landsverki í afturlatnum brævbjálva merktur ”xxxxxxxxxxxx” í seinasta lagi xx.xx.20xx. kl xx.00.

# Tilboð uppá ráðgeving í sambandi við xxxxxxxxx í xxxxx

**Tilboðslisti:**

| Evni: | Fak: | Ábyrgd og manning: | Prís: |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Ráðgeving ísv prosjekteringsleiðslu** | | | |
| Prosjekteringsleiðsla | | | |
| Skipan av talgildari prosjektering | | | |
| | | | |
| **Prosjektering** | | | |
| Skipanaruppskot | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| **Prosjektuppskot** | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| **Forprosjekt** | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| **Høvuðsprosjekt** | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| **Prosjektuppfylging** | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Íalt

| Evni: | Fak: | Ábyrgd og manning: | Prís: |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Eykaarbeiði** | | | |
| Tímaprís fyri møgulig eykaarbeiði | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Innkomni prísurin verður mettur og vektaður í mun til metingina hjá Landsverki.

### Útbjóðing av arbeiðum

Sum meginregla verður boðið út í almenna lisitatión. Í serligum førum verður tó boðið út í innbodna lisitatión, møguliga aftan á eina alment innbodna undangóðkenning, eitt nú um verkætlanin er so stór, at verkætlanin krevur serliga stóra manning og ein tilsvarandi bygnað, ella um verkætlanin krevur fakliga vitan og royndir av serligum slag.

Um talan er um smærri arbeiði, kann tað verða mett til fyrimuns, at biðið verður um undirhondsboð. Tað merkir, at minst 2 arbeiðstakarar verða bidnir um at koma við einum tilboði uppá.  At seta eitt krónutal á nær talan er um smærri arbeiði er torført, men mett verður um tað í hvørjum einstøkum føri.

Undirhondsboð kann eisini verða nýtt, tá ið tíðarfreitin fyri arbeiðið er knøpp. Ì hesum føri verður á sama hátt biðið um undirhondsboð eins og omanfyri. Í serligum førum kann eisini verða boðið út í øvugta lisitatión. Sí útbjóðingarskriv. Arbeiði verða boðin út smb. licitatiónslógini. Sí niðanfyristandandi lýsing av útbjóðingarhættum og arbeiðstøkum.

### Hvussu verða arbeiði boðin út?
### Hvørjum bjóða vit við?

Meginreglan er, at eingin frammanundan kann útihýsast frá luttøku í útbjóðingum, um tað kann skjalprógvast ella gerast sannlíkt, at viðkomandi er førur fyri at útinna uppgávuna innan fyri givnar karmar og sett krøv. Hesar reglur skulu eisini havast í huga, tá ið undirhondsboð skulu innheintast, ella tá ið innbodnar lisitatiónir verða hildnar.

### Útbjóðingartilfar og treytir

Uttan mun til, hvussu ein verkætlan verður boðin út skulu øll krøv, ið sett verða til ætlanina verða sundurgreinað í útbjóðingartilfarinum á ein slíkan hátt, at tilboðsgevararnir fáa eina greiða mynd av uppgávuni við atliti at eitt nú vavi, góðsku v.m., soleiðis at tilboðini verða givin á einum felags grundarlagi og eru samanberandi. Krøv skulu setast til tilboðsgevarnar, ið tryggja, at hesir eru førir fyri at útinna arbeiðið innan fyri givnu karmarnar.

### Hvørjir eru karmarnir

Alment galdandi karmar fyri allar byggiverkætlanir eru:

- Játtan á fíggjarlógini
- Verklagslóg (er ikki galdandi fyri smáar verkætlanir, í verða framdar í einum fíggjarári, eisini kunnu onnur undantøk vera)
- Lógar- og myndugleikakrøv
- Politisk krøv og ynskir

Møguligir aðrir karmar, ið settir verða til einstøku verkætlanina, skulu lýsast væl og virðiliga í útbjóðingartilfarinum.

### Hvussu tryggja vit eins viðferð

Miðjast skal ímóti, at gjøgnumskygnið í sambandi við útbjóðingar er so gott, sum gjørligt, eins og havast skal í huga rættin til alment innlit. Eisini skal í útbjóðingartilfarinum og í tilgongdini annars takast fyrilit til grundregluna um javnbjóðis rættindi.

## Útbjóðingarhættir

### Almenn lisitatión

Lýst verður í fjølmiðlum og/ella á heimasíðu. Øll kunnu geva boð upp á arbeiðið. Byggiharrin hevur rætt til at velja frítt millum innkomnu tilboðini ella at vraka tey øll. Byggiharrin kann seta minstakrøv til tilboðsgevarar, fyri at tilboð kunnu góðtakast, eitt nú til manning og útgerð, fíggjarorku og viðkomandi royndir. Minstukrøvini eiga at vera 2-5 í tali, skulu verða eintýdd og skulu kunna váttast.

### Innboðin (bundin) lisitatión uttan undangóðkenning

Byggiharrin velur nakrar arbeiðstakarar út, ið fáa eina innbjóðing til at geva boð. Byggiharrin hevur í hesum førinum frammanundan góðkent tilboðsgevararnar sum skikkaðar til at bjóða og útinna verkætlanina, og tí hevur hann skyldu til at velja lægsta boð ella at vraka tey øll. Bert í heilt serligum førum kann tað rættvísgerast, at valt verður annað boð, enn tað lægsta.

### Innboðin (bundin) lisitatión við undangóðkenning

Áhugað verða alment boðin at bjóða seg fram til at luttaka í einari innbodnari lisitatión. Úrvalsmetingarstøðini eiga at vera 2-4 í tali (bert góðskumetingarstøði), og stig verða givin á einum skala frá 0 til 10. Upplýst verður, hvørji úrvalsmetingarstøðini eru, og hvussu tey verða vektað. Fyri at kunna góðkennast, má eingin karakterur verða lægri enn 3 áðrenn vekting. Av teimum, sum hava bjóðað seg fram, verða tey 5-7, ið hava hægstan meðalkarakter, boðin at luttaka í eini innbodnari lisitatión, har bert verður kappast upp á prís.

### Undirhondsboð

At biðið verður um undirhondsboð merkir, at tilboðini verða fingin, uttan at ein útbjóðingartilgongd verður framd. Sambært orðingini í lisitatiónslógini er bert loyvt at biða um 2 undirhondsboð, hvørki meira ella minni. Veljast kann frítt ímillum boðini, eins og bæði kunnu vrakast. Eisini stendur tað byggiharranum frítt fyri at samráðast við báðar tilboðsgevararnar.

### Øvugt lisitatión

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er ásettur frammanundan eins og aðrir yvirskipaðir karmar. Tann av tilboðsgevarunum, sum byggiharrin metir veitir mest fyri pengarnar, hevur vunnið kappingina.

## Arbeiðstøkur

### Fakarbeiðstøkur

Hvørt fak (betong-, timbur-, el-, málaraarbeiðstøkan o.s.fr.) verður boðið út fyri seg sum ein sjálvstøðug arbeiðstøka. Byggiharrin hevur ábyrgdina av at samskipa øll arbeiðini á arbeiðsplássinum.

### Stórarbeiðstøkur

Alt eftir, hvat hildið verður hóskandi, verða tvey ella fleiri fak (t.d. jørð-, kloakk- og betongarbeiði) sett saman til eina stórarbeiðstøku. Talan kann verða um eina stórarbeiðstøku saman við einari ella fleiri fakarbeiðstøku, fleiri stórarbeiðstøkur saman við einari ella fleiri fakarbeiðstøkum, ella kunnu allar arbeiðstøkurnar verða samansettar til stórarbeiðstøkur. Byggiharrin hevur ábyrgdina av at samskipa stórarbeiðstøkurnar, meðan hvør einstakur stórarbeiðstakari hevur ábyrgdina av at samskipa sínar undirarbeiðstøkur.

### Høvuðsarbeiðstøka

Øll fakini verða boðin út undir einum, soleiðis at byggiharrin hevur bert ein avtalupart. Høvuðsarbeiðstakarin hevur sjálvur ábyrgdina av at samskipa allar fakarbeiðstøkurnar.

### Heildararbeiðstøka (totalentreprise)

Byggiharrin setir upp síni krøv til ta lidnu byggiverkætlanina, og tilboðsgevarin gevur boð upp á allar tær veitingar, sum krevjast, fyri at fremja ætlanina, eitt nú er projektering, neyðugar góðkenningar, leiðsla og stýring íroknað tilboðið.

# Fylgiskjal 4:

## Vøru- og tænastukeyp, ognarar og útgjøld

## 3.1 Skipan av innkeypi

### 3.1.1 Alment um innkeyp

Alt innkeyp skal samskipast gjøgnum goymsluna hjá Landsverki í Kollafirði, tó undantikið keyp av skrivstovulutum, innbúgvi, teldum, telefonum, sum skulu keypast gjøgnum høvuðsskrivstovuna (stjórnardeildina) í Havn. So vítt gjørligt, skal verða biðið um tilboð frá minst 2 veitarum, tó ikki um talan er um smærri innkeyp (undir 20.000 kr.) Alt keyp úr útlondum skal ígjøgnum innkeypsfunktiónina í Kollafirði.

Annars verður víst til rundskriv um keyp av vørum og tænastum hjá landinum.

http://gjaldstovan.gov.fo/Keypsportal/Skjol/Rundskriv%20um%20keyp%20av%20vørum%20og%20tænastum.pdf

### 3.1.2 Annað nýtslutilfar (sertilfar)

Er talan um serlig amboð, t.d. veðurboyur og vevmyndatól, kann deildin, sum hevur raksturin av hesum, eisini taka sær av innkeypinum. **Hetta skal gerast í samráð við innkeypsfunktiónina í Kollafirði**.

### 3.13 Smærri innkeyp

Keyp til tann dagliga raksturin, sum t.d. spakar, seym, skrúvur o.a., sum verður brúkt alla tíðina í tí dagliga rakstrinum, kunnu økisleiðararnir/økisformenninir sjálvir ráða fyri.

# Fylgiskjal 5:

## Rakstrarroknskapur inntøkufíggjað virksemi

### Rakstrarroknskapur skervverkið frá 2012-2014 (1.000 kr.)

| | Miðal |
|---|---|
| Skiftisavlop | 7.176 |
| Kapasitetskostnaður | -5.062 |
| **Úrslit, áðrenn avskriving og renting** | **2.114** |
| Avskrivingar | -972 |
| Renting | -222 |
| **Úrslit** | **920** |

### Rakstrarroknskapur asfaltframleiðsla frá 2009-2014 (1.000 kr.)

| | Miðal |
|---|---|
| Skiftisavlop | 2.723 |
| Kapasitetskostnaður | -1.792 |
| **Úrslit, áðrenn avskriving og renting** | **931** |
| Avskrivingar | -841 |
| Renting | -248 |
| **Úrslit** | **-158** |

### Rakstrarroknskapur Bitumengoymslan 2011-2014

| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 (fyrbilstøl) |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | | 18.167 | 13.832 | 12.605 |
| Vørukeyp | | -12.040 | -10.169 | -9.311 |
| Orkunýtsla | | -1.221 | -881 | -891 |
| Goymslubroyting | | 118.767 | -43 | 764 |
| **Bruttovinningur** | | **5.025** | **2.738** | **3.167** |
| | | | | |
| Kapasitetkostnaður | | -1.625 | -1.453 | -1.670 |
| Yvirskotspartur til Sundsverkið | | -431 | -247 | -357 |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar** | | **2.969** | **1.038** | **1.140** |
| | | | | |
| Avskrivingar | | -378 | -378 | -378 |
| Renting | | -444 | -431 | -439 |
| **Úrslit** | | **2.147** | **229** | **323** |

**Viðmerking:**
2014 roknskapurin verður grannskoðaður av SPEKT, og er ikki heilt liðugur, men hendan uppsetingin er gjørd í samráði við SPEKT.

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

# Fylgiskjal 6:

## Samstørv og sambond

Sum liður í menningini av virkseminum hjá Landsverki, luttekur Landsverk í samstørvum í Føroyum og uttanlands. Her er eitt yvirlit yvir tey týdningarmestu samstørvini:

**Samstørv í Føroyum**
Byggiharrasamtak Føroya (**BSF**), er stovnað við tí endamáli at menna føroyskt byggivirksemi í samstarvi við aðrar partar í byggivinnuni. BSF skal stuðla undir at fremja eina jaliga, ábyrgdarfulla menning, m.a. við at betra góðsku og framleiðslumegi í byggivinnuni. Hetta verður m.a. gjørt við at vera forum fyri umrøðu av felags sjónarmiðum, hava ávirkan á høvuðstreytirnar fyri byggivirksemi, at fremja eitt skipað skifti av royndum og mangt annað. Landsverk er skrivstova hjá Byggiharrasamtaki Føroya

**Samstørv uttanlands**
Bygherreforeningen, sum BSF hevur ætlanir um at lima seg inn í, og samstarv við limir í Bygherreforeningen.

SBI, sum Landsverk hevur nakað av samstarvi við í sambandi við bygningsreglugerðina.

Byggeskadefonden, sum Landsverk samstarvar við, fyri at seta á skrá eina ERFA skipan til at skráseta valdar loysnir, ið ikki vísa seg at hóska í sambandi við bygging í Føroyum.

NVF, sum er Norðurlendska Vegasambandið.

**Luttøka í nevndar og verkætlanarbólkaarbeiði**
Byggideildin luttekur í nevndar og verkætlanarbólkaarbeiði, sum er fevnt av byggilistarligum ella byggifrøðiligum málum.

Arbeiði fevnir um:

- Luttøku í verkætlanarbólkaarbeiði í sambandi við gerð av reglum og lógum – seinast “Lóg um mentanararv og náttúruvernd”.
- Luttøka í felagsskapinum Nordic Built, sum er norrønt samstarv at nýskapa og menna orku- og umhvørvisvinaliga bygging, sum tekur hædd fyri varandi loysnum eisini í sambandi við renovering.

Kanning um upphiting av føroyska samfelagnum í framtíðini. Hvussu kunnu vit, sum frá líður, fara yvir til varandi orkuskipanir. Talan er um eitt samstarv millum Jarðfeingi, SEV, Fjarhitafelagið, Tórshavnar kommunu, Landsverk og Kommunufelagið.

Fylgiskjal B

# Vinnusjónarmið um virksemið hjá Landsverk




**Fylgiskjal til frágreiðing um Landsverk, dagfest 30. apríl 2015**

# Indhold

Samandráttur ........ 3
Inngangur ........ 3
Alment ........ 4
Vanlig skipan av byggimálum ........ 4
Aðrar skipanir av byggimálum ........ 5
Vágastýring ........ 6
Landsverk sum vitanarstovnur ........ 6
Ráðgevaravinnan ........ 6
  Sjónarmið ........ 7
Entreprenørvinnan ........ 8
  Sjónarmið ........ 8
Útveiting ........ 9
  Útveiting av bygningsviðlíkahaldi ........ 9
  Útveiting av rakstur, viðlíka-, og vetrarhald av landsvegakervinum. ........ 10
Fylgiskjal: Uppskot til 5 avtaluøki ........ 12

## Samandráttur

Føroya Arbeiðsgevarafelaag, Føroya Handverksmeistarafelag og Ráðgevarafelagið hava grundleggjandi tað sjónarmið, at almennir stovnar, í hesum førinum Landsverk, eiga at veita út alt tað sum veitast kann út. Tað merkir í hesum førinum, at tær uppgávur, sum natúrliga liggja hjá Landsverk, er keypsuppgávan og sáttmálagerð við vinnuligar veitarar.

Samanumtikið hevur vinnan hesi sjónarmið:

- Mannagongdir, sum Landsverk nýtir í sambandi við størri verkætlanir, eru í høvuðsheitum góðar, tó hevur Landsverk viðhvørt lyndi til at "veita" tænastur til sín sjálvs, í staðin fyri at keypa tænasturnar frá vinnuni.
- Landsverk eigur beinanveg at avmarka sín leiklut, og bert vera "keypari og sáttmálahaldari" í øllum verkætlanum.
- Landsverk eigur altíð at halda seg til "agreed documents" so sum ABF06 og ABR 89.
- Fyri at venda gongdini innan vega- og bygningsviðlíkahald, eigur Landsverk at gera rammuavtalur við ráðgevara-, entreprenør- og byggifyritøkur um alt viðlíkahalds-arbeiði.
- Landsverk eigur at byrja eina tilgongd, sum hevur til endamáls at privatisera alt framleiðslu- og entreprenørvirksemi, soleiðis at Landsverk við tíðini bert verður "keypari og sáttmálahaldari" í øllum vega- og bygningsviðlíkahaldi.
- Landsverk eigur at verða við til at skapa tryggar karmar fyri vinnuna at virka undir.

## Inngangur

Hetta fylgiskjal er evnað til, í sambandi við frágreiðingina um Landsverk, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum bað um í januar 2015. Ein bólkur við umboðum frá Landsverk, vinnuni og Fíggjarmálaráðnum varð settur at gera hetta arbeiðið. Hetta fylgiskjal er eitt sjónarmið um Landsverk sæð "uttanífrá", frá tí partinum av vinnuni, sum samskiftir við, og ávirkast mest av virkseminum hjá Landsverk.

Feløgini í Vinnuhúsinum; Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG), Føroya Handverksmeistarafelag (FHMF) og Ráðgevarafelagið (RF) umboða fyritøkur, sum selja vørur og tænastur til Landsverk. Hesar fyritøkur hava ein natúrligan áhugað í leiklutinum hjá Landsverk innan ráðgevara- og arbeiðstakara-virksemi. Tað eru hesi sjónarmið, ið her verða lýst, so stutt og greitt sum gjørligt.

Áðrenn sjónarmiðini verða lýst, er eitt petti um grundleggjandi skipan og reglur fyri byggivinnuna.

Í síðsta petti er uppskot til framferðarhátt, sum vinnan mælir til at brúka, tá Landsverk útveitir sítt virksemi.

## Alment

Stóri spurningurin er; hvat skal vinnan gera og hvat skal Landsverk gera? Ella spurt enn meira yvirskipað: Hvat skal almenni geirin gera, og hvat skal privati geirin gera? Yvirskipaða sjónarmiðið hjá vinnuni er púra greitt. Tað almenna skal *keypa* vørur og tænastur frá vinnuni. Vinnan skal framleiða og *selja* tí almenna vørur og tænastur.

Tað at *keypa* og *selja* vørur og tænastur í byggi- og annleggsvinnuni verður regulerað sambært skipaðum reglum. Keyparin verður altíð nevndur "byggiharri" (eintal), ímeðan tað sum oftast eru fleiri seljarar.

Vanliga eru tvey sløg av seljarum, sum byggiharrin skal handla við, tað eru arbeiðstakarar og ráðgevarar. Viðhvørt ynskir byggiharrin bert at fyrihalda seg til ein seljara, og tá kann henda, at ráðgevingin verður løgd undir ein arbeiðstakara. Arbeiðstakarin verður tá nevndur "heildar-arbeiðstakari" (totalentreprenør).

Uttan at fara í smálutir við reglunum, so er vert at nevna nøkur yvirskipaða skjøl, sum regulera keyp og sølu í byggi- og annleggsvinnuni.

Arbeiðstøkur (á donskum "entrepriser")

- ABF06 (Almindelige betingelser for arbejder og leverancer) við føroyskum viðmerkingum
- ABT93 (Almindelige betingelser for totalentreprise)
- Prosjekttilfar (útbjóðingartilfar), sum keyparin (byggiharrin) hevur latið gjørt
- Lóg um útbjóðing (Licitatiónslógin)

Ráðgeving

- ABR89 (Almindelige betingelser for rådgivning)
- Ydelsesbeskrivelser for Bygherrerådgivning
- Ydelsesbeskrivelser for Byggeri, Anlæg og Planlægning

## Vanlig skipan av byggimálum

Í byggitilgongdini eru nógvir ymiskir aktørar, har hvør hevur sín serkunnleika. Byggiharrin, byggiharraráðgevin og brúkararnir luttaka frá byrjan til endan. Aðrir aktørar koma og fara.

Byggiharrin stýrir byggingini. Hetta ger hann, við at seta fortreytirnar upp umframt at hava ábyrgdina fyri fremjanini av byggingini. Hann skal harumframt skapa ein bygnað fyri byggingina, sum tryggjar gott samskifti millum brúkarar og ráðgevarar.

- Brúkararnir orða krøv og ynskir til funktiónir í bygninginum og koma við allari teirra vitan, royndum og hugskotum fyri at finna og menna tær bestu loysnirnar.
- Byggiharraráðgevin umsitur verkætlanina fyri byggiharran.
- Ráðgevarnir eru: Arkitekturin, sum skal umseta krøvini frá byggiharranum og ynskini hjá brúkarunum til konkret uppskot til loysnir og ráðgevandi verkfrøðingurin, sum ger útrokningar, tekniskar frágreiðingar fyri berandi konstruktiónir og installatiónir til vatn,

hita, ventilatión, belýsning, akustik og orkutørv v.m. Ráðgevarnir hava eisini ábyrgd av, at byggingin heldur lógir og reglugerðir. Ráðgevarnir hava eisini fakeftirlit við byggingini.

- Byggileiðarin stýrir byggingini sambært tíðarætlanini, játtan og góðskumáli.
- Arbeiðstakarin útinnir sjálvt byggiarbeiðið.

Tað er rættuliga vanligt at skipa byggimál, við einum sáttmála fyri ráðgeving og einum fyri bygging. Hetta verður nevnt ávikavist heildarráðgeving og høvuðsarbeiðstøka.

Tað ber eisini til at býta verkætlanina upp í smærri bitar, til dømis um ein ynskir at loyva smærri fyritøkunum framat. ABF06 og ABR89 kalla hesar sjálvstøðugu sáttmálar fyri ávikavist "fakarbeiðstøkur" og "deild ráðgeving".

Umframt at hugsa um skipan av sáttmálum, skal verkætlanarleiðarin hugsa um at skipa verkætlanina í smærri arbeiðspartar. Á fakmáli verður hetta rópt "WBS" ella "Work Breakdown Structure". Tað snýr seg einfalt um at býta byggimálið upp í passalig byggistig.

Vinnan mælir til, at Landsverk heldur seg til hesar yvirskipaðu reglum fyri byggivinnuna.

## Aðrar skipanir av byggimálum

Í frágreiðingini um Landsverk sæst, at Landsverk hevur ætlanir um royndarverkætlanir, sum fara út um viðmældu mannagongdirnar í ABF06 og ABR89.

Ein ESCO verkætlan er eitt sokallað "alment privat samstarv" har mørkini millum byggiharra, arbeiðstakara og brúkara verða viskað burtur. Í bóklinginum *Innkeyps- og útboðspolitikkurin hjá landinum fyri keyp av vørum og tænastum* verður mælt frá hesum samstarvsháttinum við grundgevingum um høgar transanktións kostnaðir og ivasom útlit fyri lønsemi í tílíkum samstarvi. Vinnan er ivasom um hendan samstarvshátt. Hóast hetta, hava feløgini í Vinnuhúsinum samskift við Landsverk um útboðshátt og annað í sambandi við eina ESCO royndarverkætlan.

Ein onnur roynd, sum Landsverk ætlar at fremja, er at keypa tilfar fyri smáar arbeiðstakarar áðrenn hesir fáa sáttmála um tímarnar. Hesin háttur brýtur grundleggjandi við reglur og mannagongdir í ABF06. Í § 10 stk.2 í ABF 06 stendur "entreprenøren skal levere alle materialer og præstere alle fornødne biydelser til arbejdets færdiggørelse" og í stk. 4. "Materialer og andre leverancer til arbejdet skal være leveret med 5 års leverandøransvar ..." Sostatt hongur ábyrgdin av tilfari og arbeiði saman. Vinnan er sera ivasom um hesa royndina hjá Landsverk, tí í veruleikanum tekur Landsverk harvið ein vága á seg, sum er sera trupul at handfara. Vinnan fatar hetta sum eitt greitt brot við meginreglurnar í ABF06, sum er eitt samtykt skjal millum Byggiharrasamtakið og byggivinnuna í Føroyum. Um endamálið er at minka vágan hjá smáum arbeiðstakarum og hinvegin økja um vágan hjá LV, so eiga partarnir, ið hava semju um ABF06, at seta seg saman, at finna loysnir, sum sampakka við meginreglurnar í ABF06.

## Vágastýring

Ein av høvuðsuppgávunum hjá verkætlanarleiðaranum er at hava eina vælvirkandi vágastýring av verkætlanini. Ein av høvuðstáttunum í vágastýring, er at lata vágan upp í hendurnar á teimum, sum best eru før fyri at taka vágan á seg. Við at sáttmálabinda aðrar partar kann Landsverk avhenda stóran part av vágnum, sum er í eini byggiverkætlan.

Eitt tonkt dømi kundi verði ein byggileiðari, sum misrøkir sína uppgávu sambært Ydelsesbeskrivelser at ...*"forelægge opståede problemer og eventuelle forslag til projektændringer under udførelsen for projekteringslederen og træffe aftale om, hvorledes sådanne problemer eller ændringer håndteres"*...Allir byggileiðarar kunnu gera tílík mistøk, tí hevur tað stóran týdning, at sáttmáli er um byggileiðaraveitingin, við tilhoyrandi ráðgevara-trygging.

Tað er av stórum týdningi, at Landsverk ger sær greitt hvørjar uppgávur stovnurin tekur á seg í eini verkætlan. Í frágreiðingini um Landsverk sæst, at Landsverk sum oftast ger byggiskrá og útinnir verkætlanarleiðslu.

Viðhvørt útinnir Landsverk eisini byggileiðslu. Vinnan hevur eitt greitt sjónarmið um, at Landsverk altíð eigur at halda seg til byggiharra leiklutin. Byggiharrin eigur ikki at útinna veitingar í sambandi við byggingina, tí harvið átekur tað almenna sær vágar, sum eru truplir at handfara.

## Landsverk sum vitanarstovnur

Tað er eitt ynski í vinnuni um, at Landsverk, umframt at verða byggiharri, eisini virkar sum eitt slag av "vitanarstovni" sum stuðlar undir skilagóða skipan av byggimálum. Flestu arbeiðstakarar og ráðgevarar ynskja støðugar karmar og mannagongdir kring útboðshættir, sáttmálagerð o.s.fr.

Millum annað eigur Landsverk at hava eina breiða vitan um marknaðin sum bjóðar seg fram. Í frágreiðingini sæst, at arbeiðsbólkurin tekur undir við at Landsverk hevur eina skipan, har fyritøkur fáa okkurt slag av "licensi" til at bjóða upp á uppgávur sum hóskar til fyritøkuna. Endamálið við eini slíkari skipan eigur at verða tvíbýtt: Tað eina er at menna smærri fyritøkur. Hitt er at tryggja, at fyritøkur, sum bjóða upp á stórar og torgreiddar uppgávur hava neyðuga fakliga og fíggjarliga støði. Tað er umráðandi, at ein møgulig licensskipan, stimbrar heldur enn hindra kappingina.

Vinnan eftirlýsir, at Landsverk, sum almennur stovnur, er við til at skapa og menna tryggar karmar fyri vinnuna at virka undir.

## Ráðgevaravinnan

Ráðgevarnir eru fyrst og fremst arkiteka- og verkfrøðingavirkið, sum skulu tekna og projektera verkætlanina.

Harafturat virka arkitekta- ella verkfrøðingavirkir eisini sum byggiharra-ráðgevarar.

Veitingarnar, sum privata vinnan er von at gera og flestu virkini hava royndir og førleikar at gera, eru:

- Byggiharraráðgeving herundir eisini forkanningar, byggiskráir og verkætlanarleiðsla
- Hugskot
- Projektering
- Projekteringsleiðsla
- Fakeftirlit
- Byggileiðsla
- Projektgransking
- Orkukanningar
- Uppmátingar
- Inniklimakanningar
- Landslags- og býarplanlegging
- Akustisk ráðgeving

## Sjónarmið

Ráðgevarafelagið hevur sum mál at arbeiða fyri eini kompetentari ráðgevaravinnu, sum er før fyri at lyfta allar uppgávur í Føroyum, umframt standa seg í kappingini við útlendskar fyritøkur.

Byggiharrin eigur ikki ráðgeva sær sjálvum. Útgangsstøðið hjá Ráðgevarafelagnum er, at alt, sum kann útveitast, skal útveitast. Stórsti partur av virkseminum hjá Landsverk, ið hevur við bygging og anlegg, kann útveitast. Ráðgevarafelagið er av tí greiðu áskoðan, at Landsverk eigur at keypa ráðgeving frá vinnuni heldur enn, at stovnurin átekur sær hesa uppgávu sjálvur og harvið eisini ráðgevaraábyrgd.

Ráðgevarafelagið ynskir framhaldandi, at Landsverk skal verða ein kompetentur innkeypari av tænastum frá vinnuni. Ráðgevarafelagið er av tí fatan, at Landsverk eigur at verða byggiharri og sáttmálapartur á økjum, sum hava við bygging og infrakervið at gera.

Grundgeving hjá felagnum til hetta sjónarmið er, at ein slíkur politikkur hevði givið vinnuni møguleikan fyri áhaldandi menning, at kunna bjóða avbjóðandi størv, kappingarførar prísir, umframt at ábyrgdin hevði verið flutt frá tí almenna til privatu vinnuna.

Verður hetta gjørt, skapast fortreytin fyri kappingarførinum hjá ráðgevaravinnuni í Føroyum og upp á sikt eisini uttanlands. Hetta gerst best við at útveita allar ráðgevarauppgávur.

Ráðgevarafelagið vísir somuleiðis á, at tað er ikki bert byggi- og annleggsuppgávur sum kunnu útveitast. Eitt annað dømi er tilbúgvingararbeiði, sum vinnan fyrr hevur tikið sær av, men sum Landsverk er byrjað at útinna.

## Entreprenørvinnan

Tað er eitt stórt spenni í stødd og virkisøki hjá entreprenørfyritøkum í Føroyum. Í FHMF eru 171 fyritøkur, sum allar liva at selja vørur og tænastur innan byggivinnuna. Nakrar eiga eisini entreprenør maskinur og gera annlegsarbeiði. Fleiri feløg, sum eiga lastvognar og gravkýr, eru limir í FAG. Tað eru tó nógvar fyritøkur, sum hvørki eru limir í FHMF ella FAG. Mett verður, at eini 30 til 40 fyritøkur veita tænastur og vørur innan entreprenørvirksemið. FAG og FHMF arbeiða fyri at menna vinnufyritøkurnar soleiðis, at hesar gerast betri førar fyri, at lyfta allar uppgávur í Føroyum, umframt at standa seg í kappingini við útlendskar fyritøkur.

### Sjónarmið

Entreprenørvirksemi av týdningi, sum Landsverk útinnir í dag:

- Viðlíkahald av landsvegum og tunlum
- Fresing og asfaltering
- Vetrarhald á landsvegunum
- Framleiðsla og søla av gróti, skervi og asfalti

Stórsti partur av entreprenørvirkseminum hjá Landsverk kann útveitast. Jú størri marknaðarparturin hjá Landsverk er, jú størri er áhugin hjá vinnufyritøkum at sleppa upp í part. Tað sigur seg sjálvt, at lutfalsliga stóri marknaðarparturin, sum Landsverk situr á, er ein sera áhugaverdur møguleiki at økja um umsetningin hjá vinnufyritøkunum.

Útgangsstøðið hjá vinnuni er, at alt, sum kann útveitast, skal útveitast. Vinnan er av ta greiðu áskoðan, at Landsverk eigur at keypa vørur og tænastur frá vinnuni heldur enn, at stovnurin átekur sær hesa uppgávu sjálvur.

Landsverk eigur í minst møguligan mun, at verða partur av kappingini um entreprenørvirksemi. Í staðin fyri at brúka orku upp á at áseta tann "rætta" prísin fyri at tryggja gjøgnumskygni, og harvið royna at halda kappingarlógina, skuldi Landsverk heldur brúkt orkuna upp á at lagt seg eftir at vera ein  kompetentur innkeypari. Verður hetta gjørt, skapast betri fortreytir fyri kapping og sostatt kappingarførinum hjá vinnuni í Føroyum og eisini uttanlands.

Kanningar vísa, at standardkendar, tekniskar uppgávur og rutinuarbeiði (rakstraruppgávur) eru lutfalsliga lættari at útveita. Í eini smidligari tilgongd, har landið verður býtt í økir, ber saktans til at útveita viðlíkahald og vetrarhald á landsvegunum. Sjónarmiðið í  vinnuni er, at Landsverk eigur at brúka orku upp á smidligar og góðar skipanir og mannagongdir, at útveita virksemið, í staðin fyri, at verja sín marknaðarpart.

Landsverk er í beinleiðis kapping við vinnuna um framleiðsla av gróti, skervi og asfalti. Vinnan hevur tó við tíðini, yvirtikið størra partin av framleiðsluni. Jú meira verður útveitt, tess fleiri fyritøkur koma til, sum tryggja kappingina.

Landsverk eigur at byrja eina tilgongd, í samstarvi við kappingareftirlitið, (ein og gjørt verður við asfaltframleiðsluni) at útseta alt entreprenørvirksemi fyri javnari kapping.

Sjónarmiðið í vinnuni er, at henda tilgongd eigur at hava til endamáls at privatisera alt framleiðslu- og entreprenørvirksemið hjá Landsverk.

# Útveiting

Í arbeiðinum at gera frágreiðing um Landsverk, er semja í bólkinum um, at Landsverk, tá tað kemur til byggiverkætlanir, fyri tað mesta heldur seg til kendar mannagongdir. Einastu viðmerkingarnar frá vinnuumboðnum, vóru í mun til byggiharraleiklutin (keyparaleiklutin) og vágastýring; sí omanfyristandandi pettir um hesi evni. Bólkurin er samdur í tilmælinum um *"at tað støðugt verður hildið eyga við, hvørt tað kann farast longur í sambandi við tað at bjóða verkætlanir, ráðgevara- og eftirlitsuppgávur og arbeiðstøkur út".*

Tá tað kemur til yvirskipaðar mannagongdir fyri alment innkeyp vísir Vinnan til frágreiðingina *Innkeyps- og útboðspolitikkurin hjá landinum fyri keyp av vørum og tænastum* sum Vinnumálaráðið lat gera, og sum almenna innkeypið er skipað eftir. Mælt verður somuleiðis til framhaldandi at menna útboðsportalin, sum eitt amboð til alment innkeyp.

Tá tað kemur til *bygningsviðlíkahald* og *viðlíkahald av landsvegakervinum*, førdi umboðið úr vinnuni fram í bólkinum, at Landsverk átti at gjørt meira burturúr at útveita. Vinnuumboðið gjørdi í tí sambandi uppskot til framferðarhátt til útboð av rammusáttmálum fyri hesi virkisøki. Sí hesi uppskot niðanfyri.

## Útveiting av bygningsviðlíkahaldi

Rammuavtalur

Landsins bygningar verða býttir í bólkar. Bólkarnir verða skipaðir í mun til samlaða fermetratal og meting av tørvi á umvælingum. Atlit verða eisini tikin til býtið kring landið, og talið av møguligum veitarum í økinum. Rammuavtalur, ið ganga yvir 5 ár verða gjørdar fyri hvønn av bólkinum. (Sambært kontoini *"umvæling av almennum bygningum"* eru knappar 104 mió. brúktar árini 2009-2013)

Rammuavtalur verða gjørdar fyri ráðgeving sambært ABR 89 meðan byggiarbeiði og veitingar verður avtala sambært ABF06.

Ráðgevaraavtala

Landsverk skipar fyri avmarkaðum útboðið, til tess at velja ráðgeva til uppgávuna.

Ráðgevaraveitingin snýr seg um at formulera krøv fyri einstøku bygningarnar. Víst verður til fyridømi úr Danmark *"vejledning i udbud af vedligeholdelse af kommunale bygninger"*, tó verða krøvini lagað til føroysk viðurskifti.

Eisini skal útbjóðingartilfarið greina umfatan av viðlíkahaldsarbeiðnum. Her eiga verandi markarmót millum Landsverk og stovnarnar at endurskoðast, soleiðis at arbeiðstøkuavtalurnar

fevna um ávísar viðlíkahaldsveitingar.

Ráðgevin ger útbjóðingartilfar og stuðlar í sáttmálagerð við arbeiðstakara. Ráðgevin hevur eftirlit og byggileiðslu í avtalutíðarskeiðnum. Víst verður til *"ydelsesbeskrivelse for byggeri og planlægning".* Veitingin eigur millum annað at fevna um endaligan byggiroknskap yvir veitingartíðarskeiðið hjá arbeiðstakara.

Arbeiðstakaraavtala

Ráðgevin skipar fyri avmarkaðum útboðið millum arbeiðstakarar, sum frammanundan skulu skjalprógva neyðug minstukrøv fyri luttøku. Arbeiðstakaraveitingin snýr seg um viðlíkahaldsarbeiði sambært útbjóðingartilfarinum í útbodna bólkinum av bygningunum.

Landsverk

Uppgávan hjá Landsverk verður at gera og at røkja sáttmálar, umframt at tryggja góðsku og kapping yvir tíð, í mun til játtan. Avtalur við ráðgevarar og arbeiðstakarar, verða bodnar út av nýggjum eftir 5 árum.

## Útveiting av rakstur, viðlíka-, og vetrarhald av landsvegakervinum.

Avtaluøkir

Við atliti til ferðslumynstur og støðd, verður landið býtt í økir. Atlit verða eisini tikin til talið av møguligum veitarum av tænastum í økinum. Økini verða skipað sum rammuavtalur, ið ganga yvir 5 ár. Sí fylgiskjal við uppskoti til 5 avtaluøkir. Møguleiki skal vera at bjóða upp á eitt ella fleiri økir. Mælt verður til, at viðlíkahald av tunnlum verður útboðið fyri seg.

Avtalur verða gjørdar fyri ráðgeving eftir ABR 89 og arbeiði og veitingar eftir ABF06.

Ráðgevaraavtala

Landsverk skipar fyri avmarkaðum útboðið, til tess at velja ráðgeva til uppgávuna.

Ráðgevaraveitingin snýr seg um, at formulera krøv fyri einstøku økini og vegastrekkir. Víst verður til dømi úr Noreg *"Standard for drift og vedlikehold av riksveger".* Krøvini verða lagað til føroysk viðurskifti.

Ráðgevin ger útbjóðingartilfar og stuðlar í sáttmálagerð við arbeiðstakara. Ráðgevin hevur eftirlit og byggileiðslu í avtalutíðarskeiðnum. Víst verður til *"ydelsesbeskrivelse for anlæg og planlægning".* Veitingin eigur millum annað at fevna um endaligan roknskap yvir veitingina frá arbeiðstakara.

Arbeiðstakaraavtala

Ráðgevin skipar fyri avmarkaðum útboðið millum arbeiðstakarar, sum frammanundan skulu skjalprógva neyðug minstukrøv fyri luttøku.

Arbeiðstakaraveitingin snýr seg um alt rakstrar-, viðlíka og vetrarhaldi av landsvegakervinum í útbodna økinum. Møguleiki skal vera at bjóða upp á eitt ella fleiri økir.
Krøvini, sum arbeiðstakarar skulu lúka, kunnu til dømis líkjast teimum, ið Landsverk hevur á heimasíðuni, viðvíkjandi flokking av vegastrekkjum, í mun til kavarudding. Sí brot niðanfyri.

*"A og B vegir eru teir við mestu ferðsluni. Málið er tí at gera tað trygt at koyra á A og B vegunum fyrst. Undir vanligum umstøðum eru allir vegir í flokki A farbarir frá kl. 6 á morgni – leygardagar frá kl. 07 og sunnudagar frá kl. 08. Málið við B vegum er at hava teir farbarar yrkadagar frá kl. 06 og í vikuskiftunum frá kl. 08. C eru vegir við minni ferðslu, og D eru vegir við næstan ongari ferðslu. Málið fyri C vegir er, at tað skal bera til at ferðast við lagaligheit eftir hesum vegum. D vegirnir verða bara ruddaðir eftir áheitan í vanligari arbeiðstíð, eftir at A, B og C vegirnir eru ruddaðir."*

Fyrimynd
Norska "Statens Vegvesen" lýsir rakstraravtalurnar leysar á hvørjum ári. Hetta verður gjørt árið fyri at veitingin byrjar. Sí leinkju:
http://www.vegvesen.no/Fag/Veg+og+gate/Drift+og+vedlikehold/Driftskontrakter

Landsverk
Uppgávan hjá Landsverk verður, at tryggja góðsku og kapping yvir tíð, í mun til játtan. Fyri at minka um transaktiónskostnaðir, í mun til Noreg, kunnu avtalur við ráðgevarar og arbeiðstakarar bjóðast út 5. hvørt ár.

Fylgiskjal:

- Uppskot til 5 avtaluøkir til rakstur, viðlíka-, og vetrarhald av landsvegakervinum.

## Fylgiskjal: Uppskot til 5 avtaluøki



**Spurningar til aðalráð og stovnsleiðarar, sum hava samstarvað við Landsverk á ymiskum økjum:**

a) **Lýs í stuttum tykkara royndir av viðlíkahaldsarbeiði á bygningar, sum Landsverk ger vegna tykkum og tykkara stovn(-ar):**

b) **Lýs í stuttum tykkara royndir av at nýta Landsverk sum byggiharra í sambandi við byggiverkætlanir innan tykkara málsøki. Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta fakliga støðið og ráðgevingina at vera nøktandi og uppgávurnar loystar nøktandi, ella hvussu hetta kann betrast:**

c) **Lýs í stuttum tykkara royndir av at nýta Landsverk sum ráðgeva í sambandi við byggiverkætlanir innan tykkara málsøki. Her verður m.a hugsað um , hvørt tit meta fakliga støðið og ráðgevingina at vera nøktandi og uppgávurnar loystar nøktandi, ella hvussu hetta kann betrast:**

d) **Er nakað dømi um virksemi innan tykkara málsøki, sum í løtuni verður umsitið av Landsverki, sum við fyrimuni kundi verið hjá tykkum ella privatum fyritøkum? Meta tit, at onnur kundu loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur?**

e) **Er nakað dømi um virksemi, sum í løtuni er hjá tykkum, ella stovni undir tykkum, sum eins væl kundi verið umsitið av Landsverki ella privatum fyritøkum? Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta at Landsverk kundi loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur.**

f) **Hvat halda tit sum heild um gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki? Meta tit t.d., at tit hava nóg gott innlit í tær uppgávur, sum Landsverk umsitur fyri tykkum? Kundi hetta verið betri?**

g) **Aðrar møguligar viðmerkingar, sum hava við Landsverk at gera:**

MENTAMÁLARÁÐIÐ

STÝRISDEILDIN

Fylgiskjal D

Svar frá Mentamálaráðnum

Spurningar til aðalráð og stovnsleiðarar, sum hava samstarvað við Landsverk á ymiskum økjum:

**a)** Lýs í stuttum tykkara royndir av viðlíkahaldsarbeiði á bygningar, sum Landsverk ger vegna tykkum og tykkara stovn(-ar): *Mentamálaráðið varar av nógvum bygningum, ið LV viðlíkaheldur fyri okkum. Vit hava eina skipaða mannagong, har LV áðrenn fund hevur sent leiðsluni í ráðnum eina nágreiniliga útgreining yvir ætlaða viðlíkahaldið komandi ár. Á fundi saman verða møgulig ivamál umrødd, og annars er hetta viðlíkahaldsætlanin. So hvørt sum árið líður, verður ein dagførd viðlíkahaldsætlan send ráðnum og annars gjøgnumgingin á samstarvsfundi saman við leiðsluni í LV. Er nakað áfat hjá onkrum av okkara stovnum, so er eftir okkara fatan, gott samskifti millum viðlíkahaldsdeildina hjá LV og okkara stovnar.*

**b)** Lýs í stuttum tykkara royndir av at nýta Landsverk sum byggiharra í sambandi við byggiverkætlanir innan tykkara málsøki. Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta fakliga støðið og ráðgevingina at vera nøktandi og uppgávurnar loystar nøktandi, ella hvussu hetta kann betrast: *Tað er eitt sindur ringt hjá okkum at meta um fakliga støðið hjá LV. Okkara fatan er, at vit møta starvsfólki hjá LV, ið eru væl skikkaði til tær uppgávir, ið vit hava.* O*kkara royndir vísa, at tað er týdningamikið, at eftirlitsfólkið frá LV er nógv á byggiplássinum og fylgir við arbeiðnum, so hvørt sum tað líður fram.*
*Tá ið miðnámsskúlin í Suðri var endurbygdur í 2014, var eftirlitsfólk á staðnum mest sum alla tíðina. Eftir okkara fatan hevur hetta givið eitt gott úrslit.*
*Tá ið Mentamálaráðið yvirtók byggingina av Sjónámi (Trygdarmiðstøðin í Klaksvík), var eftirlitsfólk frá LV á staðnum næstan dagliga bæði morgun og kvøld. Hetta arbeiðið eyðnaðist eisini væl.*
*Vit hava út frá okkara royndum mælt LV til at manna eftirlitsarbeiðið soleiðis, at eftirlitsfólk nevnt fylgir arbeiðnum úti á byggiplássinum - betri enn higartil.*

**c)** Er nakað dømi um virksemi innan tykkara málsøki, sum í løtuni verður umsitið av Landsverki, sum við fyrimuni kundi verið hjá tykkum ella privatum fyritøkum? Meta tit, at onnur kundu loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur? *Tað kann verða eitt sindur ringt at siga, hvat kundi verið loyst betri av privatari fyritøku heldur enn av LV av verandi uppgávum, men Mentamálaráðið hevur royndir av, at LV hevur latið privatari fyritøku átaka sær uppgávu. Fakeftirlitið, tá ið miðnámskúlin í Suðri varð bygdur, var latið privatari fyritøku. Hetta eftirlitið var ikki útinnt serliga gott. Áðrenn eftirlitsfólkið kom suður úr Havn, syrgdi arbeiðstakarin fyri at pláta alt, sum var gjørt, soleiðis at alt sá gott út uttan á. Søguna, hvat síðani hendi, kenna vit.*

**d)** Er nakað dømi um virksemi, sum í løtuni er hjá tykkum, ella stovni undir tykkum, sum eins væl kundi verið umsitið av Landsverki ella privatum fyritøkum? Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta at Landsverk kundi loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur. *Mentamálaráðið hevur útveitt rættuliga nógvar tænastur. Tað, at røkja bygningin uttan, er útveitt, at røkja flaggstongina er útveitt, kavarudding og salting er útveitt, at røkja telduskipanina er útveitt (til privatan veitara inntil á heysti í 2010, tá henda uppgávan var yvirtikin av KTF á Gjaldstovuni), reingerð er útveitt, enntá at bera dagsins post á posthúsið er útveitt.*
*Í nøkur á var alt bókhaldið útveitt, hetta verður enn røkt av starvsfólki, ið hevði uppgávuna, tá ið henda var útveitt.*
*Vit hava ikki uppgávur, ið kundu verið fluttar til LV at umsita. Vit hava heldur ikki orku at yvirtikið uppgávur, ið LV røkir í dag.*

**e)** Hvat halda tit sum heild um gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki? Meta tit t.d., at tit hava nóg gott innlit í tær uppgávur, sum Landsverk umsitur fyri tykkum? Kundi hetta verið betri? *Fyri at fylgja við teimum uppgávum, ið LV loysir fyri Mentamálaráðið, er ein mánaðarligur samstarvsfundur millum ovastu leiðsluna hjá LV og ráðið. Landsstýrismaðurin luttekur á hesum fundum. Fyri fundin verður ein statusfrágreiðing fyrireikað, ið framgongdin síðani seinasta fund í hvørjum einstøkum byggimáli verður lýst. Henda frágreiðing verður stemmað av við okkara stovnsleiðarar, soleiðis at tey eisini kenna status í málinum, og harvið hava tey høvi at kunna okkum, er nakað, vit áttu at vitað og tikið upp á samstarvsfundinum.*
*Á hendahátt fær ovasta leiðslan í ráðnum eina góða kunning um okkara byggimál hvønn mána.*

**f)** Aðrar møguligar viðmerkingar, sum hava við Landsverk at gera: *Mentamálaráðið hevur altíð havt eitt gott samstarv við leiðsluna hjá LV. Skuldi vit komið við uppskoti um betringar, so vildi tað eftir okkara tykki verið ein styrki hjá LV at havt egin fakfólk innin byggitøknina úti um landið, heldur enn at alt eftirlitið var framt av fólki, ið annars arbeiða í Havn, og koyra út á einstøku byggiplássini. Men um ein slík decentralisering ber seg fíggjarliga, og hvussu ein slík loysn fæst at virka fakliga duga, vit ikki so væl at meta um.*

Fylgiskjal E

## SVAR frá Kringvarpi Føroya ísv spurningar um Landsverk

a) Lýs í stuttum tykkara royndir av viðlíkahaldsarbeiði á bygningar, sum Landsverk ger vegna tykkum og tykkara stovn(-ar):

*Viðm.: Kringvarp Føroya hevur seinastu árini fingið gjørt viðlíkahald av bygningum, bæði í Sortudíki og í M.A.Winthersgøtu, sum Landsverk hevur tikið sær av; skift tak, vindeygu, glaspartí v.m. Burtursæð frá, at ofta er gingin ov long tíð, áðrenn viðlíkahaldsarbeiðið er gjørt, so er okkara meting, at sjálvt arbeiðið og samskiftið við LV hevur verið nøktandi.*

b) Lýs í stuttum tykkara royndir av at nýta Landsverk sum byggiharra í sambandi við byggiverkætlanir innan tykkara málsøki. Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta fakliga støðið og ráðgevingina at vera nøktandi og uppgávurnar loystar nøktandi, ella hvussu hetta kann betrast:

*Viðm.: Í sambandi við útbyggingina, har ein framleiðslubygningur skal byggjast aftan fyri KvF, hevur samstarvið við Landsverk higartil verið á eini góðari leið. Fólkini eru fyrikomandi og dugnalig, men ov nógv útskifting hevur verið á fólki, sum eru knýtt at verkætlanini, og tí er eisini trupult at meta um fakliga støðið. Viðhvørt hevur sama fólk havt fleiri aðrar bóltar í luftini samtíðis, og tað er helst orsøkin til, at nøkur ting í verkætlanini áttu at verið loyst øðrvísi til frama fyri sunna fornuft.*

c) Lýs í stuttum tykkara royndir av at nýta Landsverk sum ráðgeva í sambandi við byggiverkætlanir innan tykkara málsøki. Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta fakliga støðið og ráðgevingina at vera nøktandi og uppgávurnar loystar nøktandi, ella hvussu hetta kann betrast:

*Viðm.: Í skrivandi stund hava vit fingið upplýst frá MMR, at verkætlanin, sum skuldi kosta 8,4 mió. kr, kostar 11,2 mió.kr. MMR kennir ikki orsøkina, men hevur fingið tølini upplýst frá Landsverki.*

*Hetta fyrikemur okkum eitt sindur løgið, at ein verkætlan dýrkar 2,8 milliónir krónur stutt eftir, at hon er farin úr barkastokki, og uttan at Bygginevndin hevur fingið eitt orð at vita um hækkingina. Helst er ein frágreiðing til, at bygningurin brádliga kostar 1/3 ella 33% meira enn avtalað, og at Bygginevndin ongantíð hevur havt hesi tøl á borðinum.*

*Um tað er soleiðis, at verkætlanir kunnu taka slík útreiðslu-lop í favninum á Landsverki, ímeðan bygginevndarlimir liggja og sova, so er okkurt spinnandi galið. Landsverk hevur upplýst og alla tíðina vitað, at framleiðslubygningurin skal kosta 8,4 mió.kr. og dýrkar hann nú við einum triðingi, so vil Kringvarp Føroya staðiliga mæla frá at brúka Landsverk sum ráðgeva í sambandi við byggiverkætlanir.*

d) Er nakað dømi um virksemi innan tykkara málsøki, sum í løtuni verður umsitið av Landsverki, sum við fyrimuni kundi verið hjá tykkum ella privatum fyritøkum? Meta tit, at onnur kundu loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur?

*Viðm.: Í løtuni umsitur Landsverk okkara útbygging, men vit eru komin lutfalsliga stutt og kunnu tí ikki gera so nógvar viðmerkingar til gongdina. Men tilgongdin í sambandi við bygginina hevur tikið rúma tíð. Var talan um eitt privat byggarí, hevði ferðin á tilgongdini verið skjótari og helst eisini bíligari, men tað vita vit ikki.*

*Vit hava aðrar royndir, har vit hava gjørt smærri umbyggingar og ikki hava brúkt Landsverk. Tað vísir seg at ganga væl skjótari og er minni roksut. Tað er torført at siga, um tað loysir seg betri fíggjarliga, tí vit hava ikki roynt Landsverk í smærri verkætlanum.*

*Sum heild meta vit, at tá ein almennur stovnur ger eina minni útbygging, sum ikki er so torskyld at fremja, so er tað munandi effektivari og helst eisini bíligari, um stovnurin keypir sær teir førleikar, sum Landsverk bjóðar.*

e) Er nakað dømi um virksemi, sum í løtuni er hjá tykkum, ella stovni undir tykkum, sum eins væl kundi verið umsitið av Landsverki ella privatum fyritøkum? Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta at Landsverk kundi loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur.

*Viðm.: Ongin viðmerking.*

f) Hvat halda tit sum heild um gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki? Meta tit t.d., at tit hava nóg gott innlit í tær uppgávur, sum Landsverk umsitur fyri tykkum? Kundi hetta verið betri?

*Viðm.: Í meðan útbyggingin fer fram, fær Kringvarp Føroya byggifundarfrágreiðingar við jøvnum millumbilum. Annars er ikki so nógv samband við Landsverk, uttan so at onkur trupulleiki er. Ynskiligt hevði verið, at KvF var eitt sindur meira við í sjálvari byggi-tilgongdini.*

g) Aðrar møguligar viðmerkingar, sum hava við Landsverk at gera.

*Viðm.: Ongin viðmerking.*

*Í Sortudíki, tann 12-02-2015*

Dia Midjord,
*stjóri í Kringvarpi Føroya*

Svar frá Føroya Stiftsstjórn

Fylgiskjal F

Tórshavn 28. januar 2015

Svar uppá spurnarblað frá Landsverki um samstarv um viðlíkahald av bygningum.

a) Føroya Stiftsstjórn varar av nítjan prestagørðum umvegis Kirkjugrunnin og samstarvar við LV um dagføring og viðlíkahaldi av teimum. LV hevur sjálvstøðugt tikið sær av størru verkætlanum sum á Brekku í Klaksvík, á Todnesi á Sandi, Bispagarðin og í løtuni á Eiði. LV hevur veitt ráðgeving / góðkenning til arbeiði, ið Føroya Stiftsstjórn hevur sett í verk.
b) Eftir trilvandi byrjan fyri sjey árum síðani hevur samstarvið ment seg fyrimyndarliga. Fakliga støðið er professionelt. Samskiftið liðiligt og eyðmerkt av skjótum aftursvari. Ráðgevingin hevur verið framúr. Uppgávurnar á Brekku, á Todnesi og á Biskupsgarðinum eru hildnar innan settan tíðarkarm og ásettan kostnað. Úrslitið talar fyri seg. LV hevur stóran kunnleika til byggimarknaðin og er hollur ráðgevi, tá finnast skal fram til aðra ráðgeving og framferðarhættir. Í praktiska samstarvinum er torført at vísa á beinleiðis betran, men hægri játtan og vissa um sama hevði verið ynskilig, um okkara tíðarætlan skal halda.
c) Arbeiðið at umvæla og dagføra verður gjørt av privatum fyritøkum, hóast LV stendur fyri ráðgeving og eftirliti. Til dømis stóð byggifelagið “Malltek” fyri dagføringini á Brekku, “Multitænastan” fyri arbeiðinum á Todnesi og Arkitektar 99 saman við Valbjørn Dalsgarð fyri dagføringini av Biskupsgarðinum. Har hevði LV saman við Føroya Stiftsstjórn ábyrgdina sum eftirlit vegna byggiharran. Vit meta, at javnvág er millum alment og privat í hesum føri. Nevnast skal, at bústaðarskyldan ger, at prestagarðarnir mugu nøkta almenn krøv til trygd, heilsu og trivna. Tískil er tað avgerandi at hava serkunnleikan hjá LV inni í myndini.
d) Vísandi til brotið omanfyri er tað ikki heppið at leggja meira virksemi út til privat í løtuni. Føroya Stiftsstjórn er alsamt í sambandi við brúkararnar (prestahúskini ) á gørðunum og hevur tørv á at kunna raðfesta og seta tiltøk í verk við stuttum skotbrái í samráð við hesar. Viðmerkjast skal, at yvirskipað hevur verið arbeitt við dagføringini eftir støðufrágreiðingini, ið bygningadeildin hjá LV eftir áheitan frá Føroya Stiftsstjórn læt donsku ráðgevingafyritøkuna Bascon A/S gera í desember 2008. Við verandi skipan er trygd fyri, at arbeiðið hevur tað støðið, ið krevst í føroyska nútíðarsamfelagnum. Føroya Stiftsstjórn er sannførd um, at peningurin er væl umsitin á sama støði sum almenn føroysk bygging er á í løtuni.
e) Verandi samstarv við LV er fullgott á tann hátt, at Føroya Stiftsstjórn støðugt er kunnað um gongdina og sjálv kennir ognarlut í øllum verkætlanum. Skilnaður er millum dagføringar og viðlíkahaldi á skynsaman hátt. LV er við í lutvísari fígging og hevur ábyrgd av nevndu størru verkætlanum, meðan Føroya Stiftsstjórn hevur ábyrgd av restini og ber kostnaðin. Viðmerkjast skal, at Kirkjugrunnurin hevur rindað mvg fyri sín lut av dagføringunum.
Fyri framman liggja tríggjar dagføringar á Kirkjuteigi í Kvívík, í Óðnagerði á Viðareiði og prestagarðurin í Miðvági. Ynskiligt hevði verið, um LV kundi veitt okkum eina hond her. Tá má metast verið komið undir land við dagføringini.
Møguliga kundi LV veitt kirkjunum ráðgeving á sama hátt sum okkum. Her er tó talan um viðurskifti, ið liggja uttanfyri heimildirnar hjá Føroya Stiftsstjórn av tí, at kirkjuráðini eru at meta sum sjálvstøðugir staðbundnir myndugleikar.
f) Nevnt hevur verið, at LV kann leggja Føroya Stiftsstjórn og Próstadømisráðnum lag á, hvussu verkætlanir skulu handfarast. Ynskiligt hevði verið, um hettar varð veruleiki.

Skrivað hevur Andrias Ziska

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: ( 00 298 ) 34 33 00 Fax: ( 00 298 ) 37 11 42
T-post: ssh@ssh.fo Heimasíða: www.ssh.fo

Fylgiskjal G

Heilsumálaráðið
Eiragarður 2
100 Tórshavn

*Att.: Terji Petersen*

*Dagfest* 05-02-2015

SS/0227-20150001-8
Okkara tilv. RM/jb

Tygara tilv. & j. nr.

Vísandi til skriv tykkara har biðið verður um at útfylla spurnarblað viðv. samstarvi við Landsverk, fara vit við hesum, í stuttum, at gera okkara viðmerkingar.

a) Av tí hesir spurningarnir eru ættiliga eins, hava vit valt at svara hesum trimum undir einum.
b) Í stuttum kann upplýsast, at vit als ikki halda eftirlitið við byggiarbeiðinum hevur verið
c) nøktandi. Hóast vit fleiri ferðir hava víst á manglar, sum eftirlitið sjálvt skuldi sæð, so eru hesir nú, eftir fleiri ár enn ikki gjørdir.

d) Vit meta at okkara viðlíkahaldsarbeiði kundi verið eins væl umsitið av okkum sjálvum, ella tá neyðugt varð, keypt okkara hjálp frá privatum fyritøkum.

e) Nei.

Við heilsan
Suðuroyar Sjúkrahús

Rønnie Miðjørð
sjúkrahússtjóri

Fylgiskjal H

Svar frá Landssjúkrahúsinum

Spurningar til aðalráð og stovnsleiðarar, sum hava samstarvað við Landsverk á ymiskum økjum:

a) Lýs í stuttum tykkara royndir av viðlíkahaldsarbeiði á bygningar, sum Landsverk ger vegna tykkum og tykkara stovn(-ar):

   *Sv. Tá LS og bygningar tess, í mong ár ikki hava verið umfatað av víðlíkahaldskontuni til almennar bygningar, hava vit lítlar og ongar royndir hesum viðvíkjandi.*

b) Lýs í stuttum tykkara royndir av at nýta Landsverk sum byggiharra í sambandi við byggiverkætlanir innan tykkara málsøki. Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta fakliga støðið og ráðgevingina at vera nøktandi og uppgávurnar loystar nøktandi, ella hvussu hetta kann betrast:

   *Sv. Vit hava sera misjavnar royndir. Hetta kann best lýsast við einum konkretum dømi, viðv. skannara & røntgenverkætlanini. LV valdi at útbjóða verkætlanina sum totalenterprisa, og hevur hetta víst seg at verða óheppið. Nú trý ár eftir at verkætlanin var avleverað til LV (ikki LS, tí vit boðaðu frá, at vit mettu at manglarnir vóru ov nógvir og týdningarmiklir), eru tað enn, sera stórir trupuleikar av, at verkætlanin ikki eru liðug og avhendað LS. Sum støðan er í løtuni, so skal tað nýtast týðandi upphædd til liðugtgerð av verkætlanini. Verkætlanin, hevur eisini verið til stóran ampað fyri LS.*
   *Vit hava eisini royndir av øðrum verkætlanum, har ráðgevingin als ikki hevur verið nøktandi. Tó so, tað eru eisini dømir um, har tað er gingið betri.*

c) Lýs í stuttum tykkara royndir av at nýta Landsverk sum ráðgeva í sambandi við byggiverkætlanir innan tykkara málsøki. Her verður m.a hugsað um , hvørt tit meta fakliga støðið og ráðgevingina at vera nøktandi og uppgávurnar loystar nøktandi, ella hvussu hetta kann betrast:

   *Sv. Royndirnar hjá LS eru, at tað er stórur gjøgnumtrekkur av ráðgevarum, sum koma frá LV. Sum dømi kann nevnast, at tá tað kemur til kontuna LSH –Ymiskt viðlíkahald, sum LS umsitur saman við LV, hava tað seinastu trý árini, verið 6 ymiskir ráðgevarar við skiftandi førleikum.*

*Hvørja ferð tað kemur ein nýggjur ráðgevið, kennist tað lutvíst sum at byrja av nýggjum aftur eins og hetta órógvar. Tó so, við verandi ráðgeva hava vit góðar royndir.*

d) Er nakað dømi um virksemi innan tykkara málsøki, sum í løtuni verður umsitið av Landsverki, sum við fyrimuni kundi verið hjá tykkum ella privatum fyritøkum? Meta tit, at onnur kundu loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur?

*Sv. Um ráðgevararnir á LV eru dunaligir nokk, so er tað fyrimunur at lata teir ráðgeva, hetta hóast ráðgevarakostnaðin, sum vanliga er áljóðandi 8%, og verður tikin beinleiðis av verkætlanunum. Hetta er tó treyta av, at LV ikki í ov stóran mun brúkar ekst. ráðgeving, til teirra ráðgeving.*

e) Er nakað dømi um virksemi, sum í løtuni er hjá tykkum, ella stovni undir tykkum, sum eins væl kundi verið umsitið av Landsverki ella privatum fyritøkum? Her verður m.a hugsað um, hvørt tit meta at Landsverk kundi loyst uppgávurnar betur, og at hetta kundi verið ein fíggjarligur fyrimunur.

*Sv. Ja, viðlíkahaldið av bygnings-skalinum og uttanum økið á LS.*

f) Hvat halda tit sum heild um gjøgnumskygnið í virkseminum hjá Landsverki? Meta tit t.d., at tit hava nóg gott innlit í tær uppgávur, sum Landsverk umsitur fyri tykkum? Kundi hetta verið betri?

*Sv. Hetta er nógv tengt at, hvør ráðgevarin/persónur á LV er, sum umsitir ráðgevingina. LS hevur eisini misjavnar royndir av privatum ráðgevarum, so torført at taka dagar í millum.*

g) Aðrar møguligar viðmerkingar, sum hava við Landsverk at gera:

*Sv. Kann til tíðir, taka langa tíð til at fáa mál avgreidd á stovninum, eins og avgerðinar eru ógreiðar. Ráðgevararnir eru sera bundnir av, at avgerðir skulu konfimerast, av leiðarinum omanfyri.*

Svar frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Eg vísi til spurnarskemaði og svari frá a til g:

a) Vit hava góðar og eisini minni góðar royndir í smb. við viðlíkahald, sum verður umsitið av Landsverk. Í onkrum førum verða vit ikki so nógv innvolveraði. Teir hava t.d. pening til viðlíkahald av røktarheiminum og har seta teir fólk at viðlíkahalda ymiskt. Talan er her um minni viðlíkahaldsarbeiði, eingin útbjóðing og har ein staðkendur kemur og ger arbeiðið fyri landsverk. Hetta virkar væl og skjótt. Tað hevur verið serligt alment projekt á skránni har ymiskir almennir bygningar vórðu bjálvaðir, fingu nýggja hitamiðstøð o.a. Hetta i smb. við at minka um útlát. Tað riggaði fínt og tað stóð Landsverk fyri. Vit kendu ikki eingong upphæddina. Trupulleikar uppstanda tá administratión, ymiskir eksternir ráðgevar o.s.v. koma inn í myndina. Órógv, nógvar áskoðanir, útskifting av leiðandi fólki, ella samanumtikið, trupulleikar við projektstýring. Hvat sjálvum arbeiðnum viðvíkur, hondverksmessiga, er alt OK.

b) og c) Vit hava ikki so nógvar royndir av hesum, men fakliga støðið, ráðgeving v.m. er OK. Kontinuteturin kundi verið betur. Við nógvari útskifting av fólki (leiðandi), er trupult at halda saman uppá projektið.

d) Stutt sagt, so kann stovnurin sjálvur umsita játtanina til smærri broytingar. Tað er bíligari og óivað betri. Serliga um broytingin ikki setur høg faklig krøv, men meira er av ”handverkaramessigum” slag. Tað ber væl til at ímynda sær, at ein privat fyritøka fekk uppgávuna sum Landsverk hevur, t.d. eina umbyggingarætlan, ið kostar 15-20 mió. kr. Sjálv uppgávan, at gjøgnumføra projektið, kundi verið útbjóða. Tá fyritøkan fekk hesa einu uppgávu í útboðisumfari, høvdu teir gjørt alt fyri at loyst uppgávuna til UG.

e) Nei

f) Tað er trupult at siga. Haldi tað kundi verið áhugavert við roknskaparframløgu regluliga. Kritikkurin um manglandi gjøgnumskygnið gongur oftast uppá tøl, manglandi játtan, meirnýtslu o.s.v.

g) Nei

Heri Ellingsgaard
*Sjúkrahússtjóri*

Klaksvíkar Sjúkrahús
Víkavegur, 700 Klaksvík, Føroyar
Tel. +298 404623 Mobiltel. +298 216960 Fax 457363
heri@ks.fo * www.ks.fo

Fylgiskjal J

Svar frá Apoteksverkinum

HMR
Att Terji Petersen

Halló Terji

Her er svar okkara til spurningarnar, settir í viðhefta skjali:

Ad a. Apoteksverkið er ikki fevnt av viðlíkahaldsskipanini hjá Landsverk, men má sjálvt fíggja útreiðslurnar yvir raksturin.

Ad b. Landsverk hevur bert luttikið í tí einu verkætlanini hja apoteksverkinum seinastu mongu árini – liðugtgerð av framleiðsludeildini á Staravegi 15. Hetta varð gjørt eftir politiskari avgerð.
Umboð fyri Landsverk hevur sitið í stýrisbólkinum (umframt landsapotekaran og umboðið fyri Heilsumálaráðið) og hevur Landsverk annars samskift við projektleiðara, ávíst rokningar, eftirlitsarbeiðið v.m.

Ad c. Fakliga støðið og ráðgevingin hava verið nøktandi. Samstarvið hevur eisin verið gott í stýrisbólkaarbeiðinum.

Ad d. Landsverk hevur ikki luttikið í øðrum virksemi hjá Apoteksverkinum.

Ad e. Tað vildi verið ein fíggjarligur fyrimunur fyri Apoteksverkið um tað varð fevnt av víðlíkahaldskontuni hjá Landsverki. Í aðrar mátar er ikki nakað, ið Landsverk kundi umsiti.

Ad f. Vit hava sum longu nevnt bert ta einu uppgávuna at meta út frá. Í so máta hevur tað verið nøktandi gjøgnumskygni við virkseminum og generelt hvur kunningin eisini verið í lagi.

Ad g. Um gongdin at gera verkætlanina lidna hevði verið øðrvísi, um Landsverk ikki varð komið inn í myndina, fáa vit ongantíð svar uppá. Apoteksverkið var eisini væl nøgt við tann leist, ið var áðrenn Landsverki politiskt varð álagt at koma inn í verkætlanina.

**Viðmerkingar frá Landsverki til svar frá aðalráðum og stovnsleiðarum um samstarvið við Landsverk.**

Arbeiðsbólkurin hevur sent eitt spurnarblað til aðalráð og stovnsleiðarar, har spurt verður um samstarvið við Landsverk og um, hvussu ráðini og stovnsleiðarar halda Landsverk røkir sínar uppgávur.

Ráðini og stovnsleiðararnir hava nú svarað spurningunum og sent svarini til arbeiðsbólkin.

Landsverk vil við hesum gera viðmerkingar til partar av tí, sum verður svarað aftur, tí Landsverk hevur ta fatan, at partar av hesum afturmeldingum frá ráðunum skyldast misskiljingar og manglandi upplýsing.

**Svar frá Kringvarpi Føroyar**

Kringvarpið vísir í sínum svari á, at stovnurin er ónøgdur við, at kostnaðarætlanir ikki halda, og at arbeiðið tekur ov langa tíð at avgreiða.

Viðmerking:

Víst verður í svarinum til eitt ítøkiligt byggimál, sum hevur verið sera trupult. Orsøkin hevur verið tann, at Løgtingið hevur samtykt ein verklagslóg, sum heimilar eina útbygging svarandi til ein byggikostnað upp á 16,7 mió. kr. Prosjektið varð fyrireikað og bjóðað út undir teimum fortreytum, at Løgtingið samtykti at játta neyðugu játtanina til at fremja arbeiðið.

Eftir at hetta arbeiðið varð bjóðað út, sáttmálar gjørdir og klárt var at fara undir byggiarbeiðið var greitt, at Løgtingið ikki vildi játta meira enn 10,25 mió. kr. til arbeiðið.

Hetta hevur tí seinkað arbeiðinum nógv og gjørt tað neyðugt hjá Landsverki at fremja stórar sparingar í verkætlanini.

Landsverk skilir tí væl, at tey í Kringvarpinum eru ónøgd við gongdina í málinum, men stovnurin metir ikki, at Landsverk kundi havt handfarið málið øðrvísi ella betur. Kostnaðarætlanin hevur ikki hildið, tí samsvar ikki hevur verið millum verklagslóg og játtan á Fíggjarlógini. Hetta hevur havt við sær, at tað hevur tikið tíð at tillaga prosjektið og gera nýggjar avtalur.

**Svar frá Suðuroyar Sjúkrahúsi.**

Sjúkrahússtjórin fyri Suðuroyar Sjúkrahús vísir í sínum aftursvari á, at hann er ónøgdur við, hvussu Landsverk umsitur viðlíkahaldið á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Viðmerking:

Játtanin til viðlíkahaldið av almennum bygningum var í 2009 flutt til Landsverk at umsita. Hetta merkir, at Landsverk skal umsita og raðfesta viðlíkahaldið av øllum almennum bygningum í landinum. Suðuroyar Sjúkrahús hevði fram til 2009 eina serliga játtan á Fíggjarlógini til vanligt viðlíkahald av bygningum sum Sjúkrahúsið varðar av, men varð játtanin strikað, eftir at viðlíkahaldið varð flutt til Landsverk at umsita.

Samlaða játtanin til viðlíkahaldið av almennum bygningum í Føroyum er ov lítil, og tí hevur ikki borið til hjá Landsverki at raðfesta øll ynskir hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi um viðlíkahald. Hetta hevur elvt til eitt ávíst ónøgdsemi, tí Sjúkrahúsið í summum førum hevur fingið ein minni part av játtanini enn áður.

Fylgiskjal K

